HEILSUPOLITIKKUR

2026-2035

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Ministry of Health

Okkara heilsa og heilsan hjá okkara næstringum er av allar størsta týdningi fyri flest menniskju. Einki kann sum sjúka broyta alt lívið hjá okkum og okkara familjum.

Tí vil eg við hesum heilsupolitikki leggja serligan dent á, hvussu vit halda okkum frísk og fyribyrgja sjúku, so leingi sum gjørligt.

Heilsupolitikkurin snýr seg sjálvsagt eisini um, hvussu vit skulu menna eitt sera gott heilsuverk, ið er ført fyri at hjálpa, tá ið sjúka rakar.

Tí er fremsta málið í heilsupolitikkinum:

"at allir borgarar sum longst varðveita sálarliga, kropsliga og sosiala vælveru, og at rætt og dygdargóð viðgerð verður veitt, tá hon krevst".

Heilsa hevur ikki bert týdning fyri tann einstaka. Sunnir íbúgvar eru eisini avgerandi fyri samfelagið. Tíverri síggjast tekin um, at fólkaheilsan er undir trýsti, tí vit liva meira ósunt enn áður. Vit vita eisini, at tað verða fleiri eldri borgarar í komandi árum, og hóast hetta er sera jaligt, so fer tað eisini at elva til meira sjúku.

Hetta eru orsøkir til, at tørvur er á einum samanhangandi og haldførum heilsupolitikki, sum leggur dent á at menna bæði fólkaheilsu og heilsuverk.

Heilsupolitikkurin hevur langtíðarmál fyri, hvussu vit vilja, at fólkaheilsan og heilsuverkið skulu mennast komandi 10 árini. Ítøkilig átøk fyri tey fyrstu trý árini eru eisini orðað í heilsupolitikkinum. Hesi átøk eru fyrstu stigini til at røkka langtíðarmálunum.

Heilsa er viðkomandi fyri øll. Tí hevur arbeiðið við heilsupolitikkinum verið lagt soleiðis til rættis, at so nógv sum gjørligt eru sloppin til orðanna gjøgnum hoyringarfundir, viðmerkingar frá borgarum og spurnakanning.

Eg takki tykkum øllum hjartaliga, sum hava givið íkast til heilsupolitikkin við uppskotum og góðum ráðum.

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna

8096
3445

Innihaldsyvirlit

Fororð frá landsstýriskvinnuni í heilsumálum 3
Innihaldsyvirlit 5

I. INNGANGUR OG ÍKAST TIL HEILSUPOLITIKKIN 6

1. Inngangur 7
2. Arbeiðsháttur og íkast til heilsupolitikkin 11
3. Lýsing av heilsustøðini 16

II. LANGTÍÐARMÁL OG ÁTØK 24

4. Heilsuframi og fyribyrging 25
5. Heilsutænastur í nærumhvørvinum 32
6. Samanhangandi sjúklingagongdir 36
7. Sjúkrahúsverkið 42
8. Góðska og data 58
9. Útbúgvin starvsfólk og uppgávuflyting 63
10. KT og tøkni 67
11. Onnur viðurskifti 71

III. VERKSETAN 74

IV. FYLGISKJØL 82

- Bólkar við fakfólki og politikarum 82
- Bygnaður í heilsuverkinum 84
- Luttakarar í hoyringarfundum 87

INNGANGUR OG ÍKAST TIL HEILSUPOLITIKKIN

Í teimum næstu trimum pørtunum verður greitt frá, hví tørvur er á einum nýggjum heilsupolitikki. Greitt verður eisini frá visjónini fyri politikkin og tilgongdina at seta arbeiðið í gongd.

Eisini verður greitt frá teimum íkastum, sum er komin til heilsupolitikkin. Talan er um:

- **Ymiskar bólkar,** sum hava verið settir ísv. heilsupolitikkin: Ráðgevarabólkur, politiskur fylgibólkur, stýrisbólkur og fylgibólkur við stovnsleiðarum
- **Spurnakanning** um heilsupolitikk
- **Viðmerkingar** frá borgarum
- **Hoyringarfundir** við heilsustarvsfólk, sjúklingafeløg, stovnar, yrkisfeløg o.o.
- Eina **lýsing** av heilsustøðuni, sum Heilsustýrið hevur gjørt

1. Inngangur

Heilsupolitikkurin er ein liður í strembanini eftir at tryggja landsins borgarum góða heilsu og vælveru sum longst. Í fyrsta partinum verður komið inn á høvuðsorsøkirnar til at gera ein heilsupolitikk. Greitt verður frá visjónini fyri politikkin og tilgongdini at seta arbeiðið í gongd.

Síða

- 1.1 Hví er neyðugt við heilsupolitikki **8**
- 1.2 Avbjóðingar **9**
- 1.3 Neyðugar raðfestingar **10**

1.1 Hví er neyðugt við heilsupolitikki

Verður hugt at miðallivialdrinum hjá føroyingum, kann ein freistast at halda, at ein heilsupolitikkur er óneyðugur. Føroyingar eru jú millum tey fólkini í heiminum, sum hava hægst miðallivialdur.

Tó gera fleiri viðurskifti seg galdandi, sum bæði kunnu ávirka heilsustøðuna hjá føroyingum frameftir, og møguleikarnar hjá samfelagnum at veita dygdargóðar heilsutænastur. Nevnast kann m.a.

- Broytt fólkasamanseting við lutfalsliga størri tali av eldri fólki
- Heilsuvandar, sum standast av lívsstíli sum til dømis royking, ovurfiti, ov lítlari rørslu, rúsdrekka, rúsevnismisnýtslu og lágum trivnaði
- Størri krøv til heilsuverkið
- Nýggir viðgerðarmøguleikar
- Avbjóðingar at útvega heilsustarvsfólk

Ásannandi hesar avbjóðingar, setti landsstýrið í samgonguskjalið frá 22. desembur 2022, at nýggjur heilsupolitikkur skal orðast, og langtíðarætlanir við ítøkiligum málum og visjónum verða lagdar.

Landsstýrið hevur gjørt av, at politikkurin skal hava eina visjón fyri heilsuverkið, sum røkkur 10 ár fram, og leggja eina greiða kós fyri, hvussu heilsuverkið skal mennast fram móti 2035.

Harafturat er avgjørt, at ítøkilig mál og átøk skulu orðast fyri styttri tíðarskeið (fyrstu trý árini). Hetta eru fyrstu stigini fram móti at útinna visjónina. Politikkurin skal eftirmetast árliga, har hugt verður eftir, hvussu langt er komið farna árið. Samstundis skal gerast av, hvørji nýggj átøk skulu raðfestast fyri at halda kósina fram móti visjónini í 2035.

Visjónin fyri heilsupolitikkin er hendan:

"Politikkurin skal hava sum ovasta mál, at allir borgarar sum longst varðveita sálarliga, kropsliga og sosiala vælveru, og at rætt og dygdargóð viðgerð verður veitt, tá hon krevst."

Lagt verður soleiðis upp til týðandi broytingar av heilsuverkinum, har heilsufremjan og fyribyrging fáa størri leiklut, har dentur verður lagdur á fakliga menning og góðsku, og har kapasiteturin í heilsuverkinum hóskar til tørvin. Hetta setur krøv til ein samlaðan, langtíðarhaldføran politikk fyri heilsuverkið.

Sostatt skulu vit venda sjónarhornið á heilsuøkinum soleiðis, at vit í nógv størri mun enn áður, arbeiða við heilsufremjan og fyribyrging av sjúku. Hetta gevur grundarlag fyri, at borgarar sum longst varðveita góða heilsu og vælveru. Og so skal samfelagið tryggja rætta og dygdargóða viðgerð, tá ið borgarin hevur tørv á tí.

1.2 Avbjóðingar

Nýggi heilsupolitikkurin er eitt týðandi stig at møta avbjóðingum, sum seta okkara heilsu og heilsuverk undir trýst. Niðanfyri verða nakrar av hesum avbjóðingum nevndar.

BROYTT FÓLKASAMANSETING

Fólkafrøðiliga gongdin er ein stór avbjóðing fyri heilsuverkið. Parturin av borgarum eldri enn 80 ár økist nógv næstu 30 árini. Væntað verður, at vøksturin verður uml. 116%, svarandi til 3.300 fleiri fólk.

Broytta fólkasamansetingin setur heilsuverkið undir trýst, tí eldri fólk hava munandi størri tørv á heilsutænastum enn ungu ættarliðini.[1] Lutfalsliga lága talið á yngri fólki merkir eisini, at færri fólk í arbeiðsførum aldri skulu fíggja økjandi útreiðslurnar til heilsugeiran, umframt at avbjóðingin at útvega neyðugu starvsfólkini til heilsuøkið verður størri.

FLEIRI HEILSUVANDAR

Ábendingar eru um, at fólkaheilsan í Føroyum versnar. Útgangsstøðið skuldi annars verið gott við høga miðallivialdrinum hjá føroyingum. Tíverri vísa tøl frá heilsukanningini, *Hvussu hevur tú tað?*, sum Heilsustýrið almannakunngjørdi í vár, at tað gongur skeivan veg við heilsu og heilsuvanum hjá føroyingum á fleiri økjum.[2]

Kanningin vísir, at vit roykja nógv meira enn í grannalondunum, røra okkum ov lítið og eta ov nógv og ósunt. Eisini gevur kanningin hjá Heilsustýrinum ábendingar um, at trivnaðurin hjá ungum versnar.

STØRRI KRØV TIL HEILSUVERKIÐ[3]

Borgarar í dag vænta sær meira av heilsuverkinum. Hetta er í roynd og veru ein jalig gongd, ið sæst í nógvum londum. Áður tóku fólk oftast til takkar við tí, tey fingu bjóðað, men í dag seta sjúklingar og avvarðandi krøv til heilsuverkið. Tey søkja sær sjálvi vitan um sjúkur og hava greiða meining um, hvørjar kanningar ella viðgerðir, tey skulu hava.

At fleiri keypa heilsutrygging[4] og leita sær viðgerð í privata geiranum, t.d. uttanlands, um bíðitíð er í Føroyum eftir viðgerð, vísir eisini øktu krøvini til heilsuverkið. Tað er gott, at sjúklingar og avvarðandi gerast meira tilvitað, men hetta setur eisini nýggj og økt krøv til heilsuverkið.

NÝGGJAR VIÐGERÐIR

Altjóða menningin innan heilsugransking, nýggjan heilivág, kanningarhættir og viðgerðir gongur við rúkandi ferð. Hetta er eisini ein jalig gongd. Tað er gott, at tað nú finnast viðgerðir fyri nógv fleiri sjúkur enn áður, og viðgerðarmøguleikarnir gerast uppaftur betri í framtíðini. Samstundis verður heilsuverkið sett undir trýst av hesi gongdini, tí tað noyðist at fylgja við. Tað er torført at ímynda sær, at viðgerðir, sum fáast í grannalondunum, ikki verða bjóðaðar føroyskum sjúklingum. Men tað er kostnaðarmikið og setur krøv til heilsuverkið.

ÚTVEGAN AV HEILSUSTARVSFÓLKI

Ein stór uppgáva hjá føroyska samfelagnum er at útvega nóg mikið av starvsfólkum til heilsuverkið. Broytta fólkasamansetingin fer ikki at gera avbjóðingina minni.

Longu í dag er kapping um arbeiðsmegina, og heilsugeirin hevur eisini avbjóðingar at útvega starvsfólk.

MØGULEIKAR

Hóast heilsuverkið sostatt hevur stórar avbjóðingar, er týdningarmikið at gera vart við, at heilsuverkið eisini hevur stórar møguleikar, ið kunnu troytast. Her verður serliga hugsað um, at útbúgvingarstøðið í landinum er høgt, at borgarar hava grundleggjandi álit á heilsuverkinum (sí part 2.3 um spurnakanning), og at heilsuverkið hevur eina avmarkaða stødd, sum gevur møguleika fyri einum samanhangandi heilsuverki.

[1] ***Sundhedsstrukturkomissionens rapport - Beslutningsgrundlag for et mere lige, sammenhængende og bæredygtigt sundshedsvæsen***, *Indenrigs- og Sundhedsministeriet, 2024*
[2] ***Hvussu hevur tú tað?***, *Heilsustýrið, 2023*
[3] *Heilsuverkið er teir stovnar, ið hoyra undir Heilsumálaráðið (sí fylgiskjal 2). Men heilsuuppgávur verða eisini loystar uttan fyri heilsuverkið. Her er talan um uppgávur í kommununum, almannaøkinum og barna- og útbúgvingarøkinum. Tí er eitt breiðari øki, ið kann nevnast "heilsuøkið". Heilsupolitikkurin snýr seg um at menna heilsuverkið, men í mongum førum er neyðugt, at nevndu samstarvspartar verða tiknir við. Tá ið talan er um heilsuframa og fyribyrging, fevnir heilsupolitikkurin um alt samfelagið.*
[4] *Upplýsingar frá føroysku tryggingarfeløgunum vísa, at fleiri túsund føroyingar - vaksin og børn - eru fevndir av privatum heilsutryggingum.*

1.3 Neyðugar raðfestingar

Samanumtikið kann sigast, at uppgávan hjá heilsuverkinum gerst størri, heilsustøðan tykist versna, krøvini til heilsuverkið økjast, viðgerðarmøguleikarnir gerast fleiri og betri, avbjóðingarnar at útvega starvsfólk økjast, og fíggjarkarmarnir undir heilsuverkinum verða settir undir trýst.

Sostatt hevur heilsuverkið stórar avbjóðingar fyri framman. Neyðugt er at gera ætlanir og finna nýggjar loysnir til heilsuavbjóðingarnar.

Tí er denturin í heilsupolitikkinum lagdur á átøk, sum fyribyrgja sjúku, betra heilsutænastur og gera raksturin av heilsuverkinum skynsamari. Í høvuðsheitunum snýr hetta seg um:

- Heilsuframa og fyribyrging
- Samanhangandi sjúklingagongdir innan geirar og millum geirar
- Staðseta uppgávurnar, har tær kunnu loysast best og bíligast
- Betra arbeiðsgongdir og ráðlegging
- Faklig menning og gransking
- Faklig góðska, ið tryggjar rættar loysnir beinanveg
- Útbúgving og førleikamenning
- Gagnnýta nýggjar, tøkniligar møguleikar og KT
- Beina burtur svinn (kanningar og viðgerðir, ið ikki geva sjúklinginum virði)

Átøkini skulu betra lívsgóðskuna hjá borgarunum, og vera við til at tálma ávirkanina av støðugt vaksandi uppgávuni, ið heilsuverkið møtir komandi árini. Her má eisini havast í huga, at menningin av heilsuverkinum komandi 10 árini, fer at krevja íløgur í tól, starvsfólk, tøkni o.a.

Tí er týdningarmikið við einum samlaðum og langskygdum heilsupolitikki. Einum politikki, sum fevnir breitt og ikki bert setur sjóneykuna á heilsuverkið sjálvt. Vit skulu arbeiða við eini hugburðsbroyting í øllum geirum – heilsuverki, eldraøki, almannaøki, barnaøki, útbúgvingarøki, heima og á arbeiðsplássum - har vit hugsa heilsuframa og fyribyrging inn. Allir samfelagsgeirar hava ábyrgd og ágóða av, at vit varðveita góða heilsu sum longst. Heilsuverkið hevur ábyrgdina, tá ið tørvur er á læknahjálp og aðrari serkønari heilsufakligari hjálp.

2. Arbeiðsháttur og íkast til heilsupolitikkin

Heilsa og heilsuverk kemur okkum øllum við. Vit hava øll áhuga í at varðveita góða heilsu sum longst, og vit hava øll samband við heilsuverkið, antin sum sjúklingar ella avvarðandi. Tí hevur arbeiðið við heilsupolitikkinum verið lagt soleiðis til rættis, at so nógv sum gjørligt eru sloppin til orðanna í tilgongdini.

	Síða
• 2.1 Bólkar við fakfólki og politikarum	12
• 2.2 Spurnarkanning	12
• 2.3 Viðmerkingar frá borgarum	14
• 2.4 Hoyringarfundir	15

2.1 Bólkar við fakfólki og politikarum

Fyri at tryggja, at heilsupolitikkurin hvílir á sterkum, fakligum grundarlagi og breiðari, politiskari umboðan, hevur arbeiðið verið skipað í fleiri bólkum. Landsstýriskvinnan útnevndi ein ráðgevarabólk við sjey heilsufakligum luttakarum úr ymiskum pørtum av heilsuverkinum og trý sjúklingaumboð.[5] Bólkurin hevur verið ráðgevi hjá Heilsumálaráðnum og verið við til at raðfesta tilmælini í heilsupolitikkinum.

Harafturat var arbeiðið skipað við einum politiskum fylgibólki við umboðum úr øllum flokkum á tingi og formanninum í Kommunufelagnum.

Arbeiðið er gjørt undir leiðslu av einum stýrisbólki við fýra aðalstjórum, deildarstjóra í Heilsumálaráðnum og stjóranum í Kommunufelagnum.

Ein umsitingarligur fylgibólkur við leiðarum á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommununum hevur eisini verið knýttur at arbeiðinum, og ein verkætlanarbólkur í Heilsumálaráðnum hevur skipað praktiska arbeiðið við heilsupolitikkinum.

2.2 Spurnarkanning

Ein spurnakanning[6] er gjørd, har 789 borgarar svaraðu spurningum um teirra meting av heilsuverkinum, hvørjar raðfestingar eiga at gerast, og hvat tey halda um fyribyrging.[7] Høvuðsniðurstøðurnar eru hesar:

Talva 2.1 vísir nøgdsemið við heilsuverkið. Fólk vórðu spurd, hvørjar tænastur tey høvdu havt samband við seinastu tvey árini. Tey, sum høvdu havt samband við heilsutænastur hetta tíðarskeiðið, vórðu síðan spurd um nøgdsemi ella ónøgdsemi við tænastuna. Tí síggjast ymisk tøl á svarum til ymsar tænastur.

Spurnakanningin vísir, at yvirskipað er stórt nøgdsemi við heilsuverkið. Serliga sjúkraflutningstænastan og viðgerð uttanlands hava nógv jalig svar, meðan nøgdsemið við læknavaktina er tað lægsta í kanningini.



Talva 2.1 Nøgdsemi við heilsuverkið

[5] *Sí fylgiskjal 1*
[6] *Kanningin er gjørd soleiðis, at lutfallið millum kyn, aldur og bústað hjá luttakarunum er rættvísandi. Spyr.fo gjørdi kanningina.*
[7] *Spurnakanningin, sum varð gjørd 30. januar 2025, er at finna á heimasíðuni hjá Heilsumálaráðnum: http://www.hmr*

Síðan vórðu fólk spurd um teirra álit á heilsuverkið og fakligu førleikarnar hjá heilsustarvsfólkum. Úrslitini síggjast í talvu 2.2. Tey vísa, at stórur meiriluti yvirskipað hevur álit á heilsuverkinum og fakligu førleikarnar hjá starvsfólkunum.



Talva 2.2 Álit á heilsuverkið

Luttakararnir vórðu eisini spurdir, hvørji øki teir halda, at politikarar eiga at raðfesta. Her var møguleiki at raðfesta upp til trý evni, og tí gerast úrslitini samanlagt meira enn 100%.

Úrslitini síggjast í talvu 2.3. Her leggja fólk serliga dent á bíðilistar, røkt/viðgerð av eldri, at loysa trupulleikan við starvsfólkatroti, og at øll hava fastan kommunulækna. Eisini aðrar raðfestingar verða nevndar, m.a. at menna psykiatriska økið, samstarv millum sjúkrahús, kommunur og kommunulæknar, umframt fyribyrging og talgilt innlit í egnar heilsuupplýsingar.



Talva 2.3 Svar upp á spurningin "Hvørji av hesum økjum heldur tú, at politikarar eiga at raðfesta?"

At enda vórðu fólk spurd um teirra støðu til fyribyrging og ítøkilig fyribyrgingarátøk. Talva 2.4 vísir úrslitini. Yvirskipað taka fólk undir við, at tað almenna hevur ábyrgd av fyribyrging. Undirtøkan er størst, tá ið talan er um fyribyrgingarátøk vend móti børnum. Undirtøkan er lægst, tá ið tað snýr seg um at hjálpa (vaksnum) fólki at leggja av at roykja.



Talva 2.4 Svar upp á spurningin "Hvussu samd(ur) ella ósamd(ur) ert tú í, at hesi øki eru ábyrgd hjá tí almenna?"

2.3 Viðmerkingar frá borgarum

Í tíðarskeiðnum 5. til 28. februar 2025 høvdu allir borgarar møguleika at skriva til Heilsumálaráðið, um hvat tey halda skal vera við í einum heilsupolitikki. 99 borgarar nýttu henda møguleika. Summi skrivaðu fleiri viðmerkingar, og tískil eru tilsamans 131 ítøkilig uppskot komin inn.

Tað er til stórt gagn í arbeiðinum við heilsupolitikkinum, at so nógv hava tikið sær tíð at koma við viðmerkingum. Hetta vísir, at nógv eru sera áhugað í heilsustøðuni í landinum.

Nógvar viðmerkingar eru um heilsuframa og fyribyrging, t.d. sunnan kost, rørslu og royking.

Aðrar snúgva seg um at betra psykiatriina, samanhangandi sjúklingagongdir, styttri bíðitíðir, betri kommunulæknaskipan, gagnnýta tøkni og telemedisin, betri endurvenjing og endurmenning, betri røktartilboð til eldri, samskipan av sjúkrahúsunum og tryggja einsháttað tænastustig í øllum landinum. Harafturat er ein stórur blandaður bólkur av viðmerkingum.

Innkomnu viðmerkingarnar snúgva seg soleiðis í stóran mun um somu evnini, sum vóru í spurnakanningini, hóast vektin er ymisk á ymsu økini. Evnini síggjast eisini aftur á mongu hoyringarfundunum, sum verða viðgjørd í næsta parti.

2.4 Hoyringarfundir

Heilsustarvsfólk, sjúklingafeløg, stovnar, yrkisfeløg o.o. hava verið til hoyringarfundir, har tey hava havt høvi til at greiða frá, hvat tey halda vera styrkir og veikleikar í heilsuverkinum, og hvussu tey vilja, at heilsuverkið skal mennast frameftir.

Tilsamans vóru 26 hoyringarfundir, umframt tvær verkstovur við Sjúkrahúsverkinum.[8]

Hoyringarfundirnir hava verið gevandi. Luttakararnir vóru væl fyrireikaðir, og fundirnir løgdu sterkar lunnar undir arbeiðið við heilsupolitikkinum.

Sum heild hava áhugapartarnir álit á heilsuverkinum og starvsfólkunum har. Tað samsvarar eisini við úrslitið av spurnakanningini.

Hetta merkir ikki, at broytingar eru óneyðugar. Sum nevnt seta stórar broytingar í samfelagnum og í altjóða høpi, heilsuverkið undir trýst. Hoyringarfundirnir vísa greitt tørvin á nýhugsan, menning og broyting í heilsuverkinum, um heilsuuppgávurnar skulu loysast komandi árini.

Á hoyringarfundunum var breið semja um, hvønn veg heilsuverkið skal mennast. Sjálvsagt hava allir hoyringarpartarnir ikki sagt nett tað sama, og eisini er munur á, hvar størsti dentur verður lagdur. Men yvirskipað sæst ein rættiliga einsháttað mynd. Tá ið útsagnirnar frá hoyringarfundunum verða bólkaðar, síggjast í stóran mun hesi evni:

- Nógv størri dentur skal leggjast á heilsuframa og fyribyrging
- Tørvur er á at menna heilsutænastur í nærumhvørvinum
- Samanhangandi sjúklingagongdir
- Sjúkrahúsverkið herundir:
  - Eitt fakliga burðardygt og sameint sjúkrahúsverk
  - Styttri bíðilistar
  - Faklig menning og gransking
- Góðskumenning og dáta
- KT og tøkni – troyta møguleikarnar
- Tryggja nóg mikið av vælútbúnum starvsfólkum og uppgávuflyting
- Onnur evnir

[8] *Luttakaralistin sæst í fylgiskjali 3*

3. Lýsing av heilsustøðuni

Tá ið heilsupolitikkur skal orðast er týdningarmikið at kenna heilsustøðuna í landinum. Tí hevur Heilsustýrið gjørt hesa lýsingina av heilsustøðuni.[9]

Samanumtikið er heilsustøðan hjá føroyingum góð. Hetta sæst serliga á høga, væntaða miðallivialdrinum, sum eftir tølum frá Hagstovuni er 84 ár fyri kvinnur og 82 ár fyri menn.[10] Men okkurt bendir á, at heilsustøðan versnar. Niðanfyri er yvirlit yvir teir mest týðandi heilsuvandarnar, sum gera seg galdandi í Føroyum, og sum ein heilsupolitikkur eigur at fevna um.

	Síða
• 3.1 Royking og nikotinnýtsla	17
• 3.2 Rørsla, kostur og yvirvekt	18
• 3.3 Rúsdrekka	18
• 3.4 Rúsevni	19
• 3.5 Trivnaður og sálarheilsa	20
• 3.6 Skíggjar	21
• 3.7 Sjúka	21
• 3.8 Krabbameinsøkið	23
• 3.9 Koppseting	23
• 3.10 Sosialurinójavni í heilsu	23



[9] *Heilsustýrið ger vart við, at tað er trupult at gera eina fullfíggjaða lýsing, tí hagtøl og dátur á heilsuøkinum um t.d. sjúkuútbreiðslu mangla. Tí er lýsingin í høvuðsheitunum grundað á kanningina,* ***Hvussu hevur tú tað?****, har borgarar fjórða hvørt ár svara spurningum um heilsuna. Á onkrum økjum, til dømis krabbameinsøkinum, eru tó nýtiligar dátur.*

[10] *https://hagstova.fo/fo/folk/livsaevi/livialdur*

3.1 Royking og nikotinnýtsla

Sambært heimsheilsustovninum, WHO, eru øll sløg av tubbaki skaðilig.[11] Tubbaksroyking er einstaki tátturin, sum hevur størst neiliga ávirkan á heilsuna, og hvørt ár krevur royking mannalív í milliónatali.[12] Royking økir um vandan fyri at doyggja tíðliga, og er orsøk til flestu tilburðirnar av lungnakrabba og KOL. Royking økir eisini um vandan fyri at fáa aðrar krabbasjúkur, hjarta- og æðrasjúkur og typu 2 diabetes, eins og tað ávirkar útlitini fyri at gerast frískur, skeivan veg.

*Talið á roykjarum í Føroyum er høgt sammett við grannalondini, og tað broytist lítið. Í kanningini, **Hvussu hevur tú tað?**, siga 18% seg roykja dagliga. Tó sæst ein lítil minking av ungum roykjarum, men stór øking í nýtsluni av nikotinvørum sum snúsi, e-sigarettum o.ø. Nikotinvørur hava við sær nikotintrongd, og økja harvið um vandan fyri at gerast roykjari seinni í lívinum. Afturat hesum elva nikotinvørur til skaða á tenn og tannkjøt.*

Nikotinnýtsla hjá børnum og ungum kann darva kognitivu menningina, serliga minni, læring og uppmerksemi.[13] [14] Nikotin kann eisini elva til varandi broytingar á bygnaðin av heilanum. Tí er týdningarmikið at fyribyrgja nýtslu í ungum aldri, fyri at verja mentala heilsu og framtíðarførleikar.[15] Kanningar vísa, at høgur tubbaksprísur, roykfrí heim, lýsingarbann, handhevjað sølubann til ómyndug, handhevjað roykibann á skúlaøkjum og átøk, har ung læra ung, kunnu fyribyrgja og/ella minka um vandan fyri, at børn og ung byrja at roykja.[16]

Væl fleiri roykjarar eru í Føroyum enn í øðrum Norðurlondum. Í Svøríki, Noregi og Íslandi roykja 6-7% av íbúgvunum, meðan talið er 12% í Danmark.

Kanningin *Hvussu hevur tú tað?* fevnir ikki um fólk undir 18 ár, men evropeiska ESPAD-kanningin millum børn í 9. flokki vísir, at royking eisini er ein trupulleiki millum børn og ung.[17] Samanborið við hini ESPAD-londini er lættari hjá 15 ára gomlum í Føroyum at fáa fatur á sigarettum. 66% siga tað vera rættiliga lætt ella sera lætt. Hetta er ørkymlandi, og er tekin um vantandi eftirlit við sølu í handlum. 46% av 15 ára gomlum í Føroyum hava roykt sigarettir. Hetta talið er væl hægri enn í hinum Norðurlondunum (Noreg 25%, Svøríki 26%, Ísland 15% og Danmark 42%).

Tørvur er sostatt á tiltøkum, ið skulu minka um royking og nikotinnýtslu, serliga millum ung.

[11] *WHO clinical treatment guideline for tobacco cessation in adults, WHO, 2024*
[12] *WHO Tobacco, 2025, https://www.who.int/news-room/fact-sheets/detail/tobacco*
[13] *Yuan M et al. **Nicotine and the adolescent brain,** 2015*
[14] *Goriounova NA & Mansvelder HD, **Short- and long-term consequences of nicotine exposure during adolescence for prefrontal cortex neuronal network function,** 2012*
[15] *U.S. Surgeon General (2016). **E-Cigarette Use Among Youth and Young Adults: A Report of the Surgeon General***
[16] *Vestbo J, Pisinger C, Bast L, Gyrd-Hansen D. Forebyggelse af rygning blandt børn og unge. Hvad virker? København: Vidensråd for Forebyggelse, 2018:1-124*
[17] *ESPAD Report, 2019*

3.2 Rørsla, kostur og yvirvekt

Viðvíkjandi rørslu, kosti og yvirvekt gongur skeiva vegin í Føroyum. Stutt sagt, vit eta ov nógv og ov ósunt og røra okkum ov lítið.

Samanlagt fylgja 62% av vaksnum føroyingum ikki tilmælunum hjá WHO um kropsliga rørslu. WHO mælir til at røra seg í minsta lagi 150-300 minuttir um vikuna við miðal intensiteti, ella í minsta lagi 75-150 minuttir um vikuna við høgum intensiteti - ella samsvarandi samanseting av hesum báðum.[18]

Í evropeiskum høpi eru Føroyar millum tey londini, har fólk viga mest. Bara borgarar í Rumenia viga meira enn okkara borgarar.[19]

> *Samband er millum manglandi rørslu og yvirvekt og fleiri álvarsligar sjúkur og heilsutrupulleikar. M.a. høgt blóðtrýst, hjartasjúka, heilabløðing, typu 2 diabetes, pína í rørslulagnum, svøvnapnø og krabbamein, men eisini trupulleikar í sambandi við fruktabæri og viðgongutíð.*

Seinastu 10 árini er talið á føroyingum, ið viga ov nógv, økt í nærum øllum aldursbólkum. Tølini í kanningini hjá Heilsustýrinum vísa, at heili 66% av føroyingum hava BMI > 25, og 26% hava BMI > 30.[20] [21] Sostatt er tørvur á tiltøkum, sum broyta neiligu gongdina við ov lítlari rørslu og ovurfiti.



Talva 3.1 Gongdin í BMI hjá føroyingum 2015-2023

3.3 Rúsdrekka

WHO vísir í nýggjastu kanningunum á, at rúsdrekka hevur skaðilig heilsuárin, eisini í smáum nøgdum.[22] Hetta er orsøkin til, at WHO nú mælir frá at drekka rúsdrekka. Ovurnýtsla av rúsdrekka er tætt tengd at fleiri krabbameinssjúkum, hjartasjúkum, evnisskiftis-sjúkum og sjúkum í nervaskipanini. Ofta er rúsdrekka eisini orsøk til, at fólk koma í støður, har tey fáa skaða, umframt at sosialu avleiðingarnar av ov nógvum rúsdrekka eru stórar.

Serliga millum ung er rúsdrekkanýtslan stór. Somuleiðis sæst stór nýtsla millum føroyskar menn, har 21% av monnunum drekka meira enn 10 alkoholeindir um vikuna.[23]

Evropeiska ESPAD-kanningin vísir, at trupulleikar við alkoholnýtslu eisini er millum børn og ung.[24] Hóast aldursmarkið at keypa rúsdrekka er 18 ár, so meina 74% av teimum 15 ára gomlu, at tað er rættiliga lætt ella sera lætt at fáa fatur á rúsdrekka. 25% av dreingjum og 15% av gentum hava roynt rúsdrekka sum 13 ára gomul ella yngri.

[18] ***Hvussu hevur tú tað?**, 2023, síða 66*
[19] ***Hvussu hevur tú tað?**, 2023, síða 74*
[20] ***Hvussu hevur tú tað?** 2023, síða 71 - 75*
[21] *Heimsheilsustovnurin, WHO, skilmarkar BMI (Body Mass Index) oman fyri 25 sum yvirvekt. Er BMI oman fyri 30, er talan um stóra yvirvekt. BMI roknar lutfallið millum hædd og vekt hjá fólki. Frymilin er: Vekt í kg/hædd í m2 . BMI gevur eina skjóta ábending um heilsustøðuna hjá menniskjanum. Tó skal sigast, at tað ikki altíð er rættvísandi. BMI tekur nevniliga ikki hædd fyri viðurskiftum, sum m.a. feitt- og vøddamongd. Tí kann heilsustøðan vera ymisk hjá tveimum persónum við sama BMI.*
[22] *"No level of alcohol consumption is safe for our health", WHO 2023*
[23] ***Hvussu hevur tú tað? 2023**, síða 43*
[24] *ESPAD Report, 2019*

80% av føroyskum 15 ára gomlum hava roynt rúsdrekka. Hetta samsvarar við miðaltalið fyri ESPAD-londini, men er væl hægri enn onnur Norðurlond. Til dømis er talið 37% í Íslandi og 58% í Svøríki. Í Danmark er talið tó 92%.

> *Mongdin av rúsdrekkaeindum, ið verður drukkin við hvørt høvi, er ørkymlandi. Í ESPAD-kanningini eru tey ungu, sum drekka rúsdrekka, eisini spurd um, hvussu nógv tey drukku við seinasta høvi. Svarið er, at føroysk 15 ára gomul, í miðal drekka 6,1 cl av ethanol við hvørt høvi. Miðal fyri øll ESPAD-londini er 4,6 cl. Her liggja føroysk ung á einum fjórða plássi av 35 londum.*

Stór rúsdrekkanýtsla við sama høvi kann hava skaðilig árin á ung. Heilin er í menning heilt til 25 ára aldur, og stór rúsdrekkanýtsla ávirkar læruførleika og minni. Somuleiðis koma ung lættari illa fyri, tá ið tey drekka. Ung, sum byrja tíðliga og drekka nógv, eru harumframt í størri vanda fyri at gerast bundin av rúsdrekka seinni í lívinum.

Fyribyrgjandi átøk í Íslandi hava havt við sær, at rúsdrekkanýtslan millum ung er nógv minkað. Í Danmark hevur stóra rúsdrekkanýtslan millum ung, m.a. ført til íverksetan av átakinum "Fælles om ungelivet".[25] Royndir frá hesum átøkum, vera longu brúktar til íblástur her í Føroyum.

3.4 Rúsevni

Í *Heildarætlan um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028* sæst, at rúsevnismisnýtsla er ein stór avbjóðing í Føroyum. Av tí, at rúsevnisnýtsla er ólóglig, eru eingi hagtøl, sum nágreiniliga vísa, hvussu stórar avbjóðingarnar eru. Men frágreiðingin er gjørd við støði í samrøðum við fleiri hoyringarpartar við vitan um avbjóðingina.

Í frágreiðingini stendur: "Samrøðurnar við hoyringar-partarnar vístu greitt, at vit hava nógv rúsevni í Føroyum, og nøkur fólk hava stórar rústrupulleikar. Neyvt hvussu umfatandi hetta er, og hvussu nógv rúsevni eru, ber ikki til at siga". "Ein kanning á miðnámsskúlunum fyri umleið einum ári síðani vísti, at umleið 25% av næmingunum søgdu seg hava roynt rúsevni, ímeðan meiri enn helvtin hava fingið rúsevni bjóðað. Flestu næmingarnir kendu onkran, sum regluliga nýtti rúsevni".[26] Í arbeiðinum við heilsupolitikkinum hava hoyringarfundir verið við m.a. viðgerðarstovnar, sum vátta vavið av trupulleikanum. Rúsevnismisnýtsla er sostatt ein heilsulig avbjóðing.

Kanningar vísa, at rúsevnismisnýtsla hevur stórar heilsuligar avleiðingar.[27] Afturat hesum koma tær sosialu avleiðingarnar av rúsevnismisnýtslu.

> *Í áðurnevndu heildarætlan verður mælt til, at fleiri átøk um fyribyrging, viðgerð og eftirviðgerð í sambandi við rúsevnismisnýtslu verða sett í verk. Átøkini fyri at tálma rúsevnismisnýtslu, eiga at taka støði í hesum tilmælum.*

[25] *https://sst.dk/da/faellesomungelivet/Tre-principper/Beskyttende-faktorer/Den-Islandske-Model*
[26] ***Heildarætlan um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028**, Løgmansskrivstovan, 2022, s. 20*
[27] *Schulte, M.T, et al. (2014). Substance Use and Associated Health Conditions throughout the Lifespan*

3.5 Trivnaður og sálarheilsa

Sálarheilsa er ein týdningarmikil partur av okkara heilsu. Sambært WHO merkir góð sálarheilsa, at vit kenna okkum væl, duga at brúka okkara førleikar, klára at handfara strongd og avbjóðingar í gerandisdegnum, og kunnu vera ein virkin partur av samfelagnum og felagsskapum við onnur menniskju.

Tekin eru um, at trivnaður og sálarheilsa hjá føroyingum versnar. Í *Hvussu hevur tú tað?* kanningini, verður spurt um strongd, einsemi og sjálvsmetta heilsu.

Kanningin vísir, at talið á teimum, sum kenna seg strongdan, er vaksandi – serliga tá ið talan er um ungar kvinnur. Her sigur helvtin seg hava eitt høgt stig av strongd. Sami aldursbólkur kennir seg eisini, í størri mun enn tey eldru í kanningini, tyngdan av síni fíggar- og bústaðarstøðu. Kenslan av einsemi er eisini vaksandi millum tey ungu. Nógv tey flestu halda seg tó hava góða heilsu, men í seinastu kanningini er hetta talið tó eisini lækkað, serliga millum ungar kvinnur.

Sama gongd sæst í øðrum londum. Tó eru fleiri tekin um, at gongdin er jaligari her heima enn aðrastaðni. Nýggj tøl frá ESPAD-kanning 2024, sum ikki er almannakunngjørd enn, og sum fevnir um evropeisk ung í 9. flokki, vísa, at føroysk ung skora hægst á Well-Being indeksinum hjá WHO. Kanningin vísir, at 77% av teimum ungu hava góða sálarheilsu. Miðal fyri ESPAD-londini er 59%. Á øðrum og triðja plássi eru Ísland við 75% og Danmark við 72%.[28] Hetta er jaligt og gevur eitt gott útgangsstøði. Men tað er tó framvegis soleiðis, at nógv ung í Føroyum hava avbjóðingar við vánaligum trivnaði og ringari sálarheilsu.

Tá ið menniskju hava ringa sálarheilsu í langa tíð, kann tað hava álvarsligar avleiðingar. Hetta økir vandan fyri bæði likamligum og sálarligum sjúkum, so sum hjarta- og æðrasjúkum, tunglyndi og angist. Eisini kann hetta føra til styttri lívslongd. Tí er ring sálarheilsa ikki bara ein trupulleiki í sær sjálvum, men eisini ein týðandi vandafaktorur fyri aðrar sjúkur.

> *Nógv bendir sostatt á, at neyðugt er við øktum innsatsi viðvíkjandi sálarheilsu. Serliga millum ung. Frágreiðingin,* ***Mental sundhed og sygdom hos børn og unge i alderen 10-24 år,***[29] *lýsir tørvin á heildarátøkum á nógvum stigum - heilt frá yvirskipaðum, samfelagsligum átøkum (t.d. fyribyrgja happing í skúlum) til skjót stig viðvíkjandi børnum og ungum í mistrivnaði - til viðgerð av veruligari sálarsjúku. Í hesum sambandi eigur Barnaverkætlanin at verða nevnd. Barnaverkætlanin er eitt tvørgeiraligt átak, sum virkar fyri trivnaði og sálarheilsu hjá børnum og ungum í Føroyum.*

[28] *ESPAD 2024*
[29] *Jeppesen P, Obel C, Lund L, Madsen KB, Nielsen L, Nordentoft M,* ***Mental sundhed og sygdom hos børn og unge i alderen 10-24 år – forekomst, fordeling og forebyggelsesmuligheder****, Vidensråd for forebyggelse, 2020*

3.6 Skíggjar

Fleiri ágóðar eru við talgildu pallunum. Tað er lætt at knýta og varðveita sosial sambond, spæla spøl, fáa atgongd til kunning og tíðindi eins og læra ymiskt nýtt. Kortini uppliva nógv børn og ung, at tey brúka skíggja meira, enn tey í veruleikanum vilja, og nýtslan hevur neiliga ávirkan á m.a. svøvn, rørslu og skúlaavrik.

> *Kanningar vísa, at nógv skíggjanýtsla kann hava samband við styttri og verri náttarsvøvn. Góður og nógvur svøvnur er ein grundleggjandi partur av heilsuni og hevur stóran týdning bæði fyri lívsgóðsku, og kropsligar og sálarligar funktiónir.*

Børn og ung kunnu eisini uppliva happing, hóttanir, kynsligan ágang og aðrar álvarsligar støður á netinum.

Skíggjanýtsla verður eisini sett í samband við minni kropsligt virkni. Tá ið børn og ung sita still og nýta skíggjar í longri tíð, er minni tíð og møguleiki fyri rørslu, sum er avgerandi fyri at varðveita góða heilsu.

Heilsustýrið hevur tí gjørt eina vegleiðing um skíggjanýtslu. Endamálið er at hjálpa foreldrum, fakfólki og samfelagnum at finna eina góða javnvág millum skíggjanýtslu, svøvn, rørslu og sosialan trivnað.[30]

Við hesum í huga hevur landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum tikið stig til, at allir skúlar m.a. seta fyriskipanir í verk, fyri at tálma fartelefonnýtslu í skúladegnum.

Heilsustýrið er í samstarvi við Heilsumálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið og kommunurnar í eini tilgongd at menna nýggj skíggjatilmæli. Farið verður í næstum undir at gera eina kanning av skíggjanýtsluni hjá børnum og ungum. Vegleiðingarnar, sum nú eru tøkar, eru sostatt eitt ávegis úrslit av arbeiðinum. Eftir ætlan verða endaligu tilmælini klár í næstum.

3.7 Sjúka

Einki samlað yvirlit er yvir sjúkur og heilsutrupulleikar hjá føroyingum. Einasta fullfíggjaða yvirlitið yvir sjúkur, er árliga hagtalsfrágreiðingin hjá Landslæknanum um deyðsorsøkir. Bert í avmarkaðan mun sigur hagtalsfrágreiðingin nakað um almennu heilsustøðuna.

> *Tó ber til at siga rættiliga nógv um, hvussu sjúkur fara at menna seg komandi árini. Tað er við at hyggja at gongdini í øðrum londum, har broytingar í aldursbýti og lívsstíli hava við sær størri sjúkubyrðu - serliga øking av varandi sjúkum, multisjúkum, sálarligum sjúkum og sálarligum trupulleikum.[31] [32] Varandi sjúkur eru eitt nú diabetes, KOL og hjarta- og æðrasjúkur. Multisjúka merkir, at sami persónur hevur fleiri varandi sjúkur. Økingin av sálarligum avbjóðingum og sálarligum sjúkum sæst serliga sum strongd, angist og menningarórógv (sum t.d. ADHD) og rakar serliga yngru aldursbólkarnar.*

Heilsustýrið metir, at sama gongd fer at síggjast her á landi, og varandi sjúkur, multisjúka og sálarligar sjúkur og -trupulleikar fara at økjast.

Vit vita, at parturin av eldri fer at økjast komandi árini. Sum sæst í talvu 3.2, fer parturin av borgarum eldri enn 80 ár at økjast við heili 116% næstu 30 árini.

[30] *https://heilsustyrid.cdn.fo/savn/lr1mwwvu/skiggjarad_talva_a4.jpg?width=2560&rmode=min&s=38xVmdRxZ8mHglarlirFVWWm9lQ*
[31] ***Sundhedsstrukturkomissionens rapport - Beslutningsgrundlag for et mere lige, sammenhængende og bæredygtigt sundshedsvæsen**, Indenrigs- og Sundhedsministeriet, 2024, s. 81-87*
[32] *European health report 2024*



Talva 3.2 Framrokning av aldursbýtinum í Føroyum 2025 – 2055. Kelda: Hagstova Føroya

Sum nevnt frammanfyri eru eisini tekin um, at heilsustøðan versnar orsakað av broyttum lívsstíli. Hetta fer eisini at elva til fleiri føri av varandi sjúku. Harumframt eru tekin um øktan mistrivnað, serliga millum ung, og tað fer væntandi at elva til fleiri tilburðir av sálarligum trupulleikum og sjúkum.

Neyðugt er hjá heilsuverkinum at fyrireika seg til eina framtíð, har nógv fleiri sjúklingar hava varandi sjúku, multisjúku ella sálarsjúku. Tílíkar sjúkur eru ofta eyðkendar við, at tørvur er á langtíðarviðgerð og viðgerð/tænastu frá fleiri pørtum í heilsuverkinum og samstarvsfeløgum. Sostatt er neyðugt at menna samanhangandi tilboð til hesar sjúklingar og tryggja neyðugan kapasitet.

3.8 Krabbameinsøkið

Í 2023 var samlaða talið á nýggjum krabbameins-tilburðum 376, sum er ein øking samanborið við árini frammanundan (357 tilburðir í 2022). Í 2022 lógu Føroyar aftastar av Norðurlondum viðvíkjandi 5-ára yvirliving - bæði hjá monnum og kvinnum. Støðan viðvíkjandi yvirliving er batnað fyri 2023, men enn liggja Føroyar í lægra endanum millum Norðurlond.

Tørvur er sostatt framhaldandi á at menna krabbameinsøkið við tiltøkum innan fyribyrging, kanning, viðgerð og endurmenning sambært *Krabbameinsætlan fyri Føroyar 2022*.[33]

3.9 Koppseting

Koppseting fyri smittusjúkur er ein av grundsúlunum í føroysku smittutilbúgvingini. Koppseting er munadygg sjúkufyribyrging, sum bæði verjir einstaklingin og minkar smittubreiðsluna. Undirtøkan fyri barna-koppsetingum í Føroyum hevur verið støðug og ligið høgt, men sambært støðufrágreiðing hjá Lands-læknanum frá september 2024, er undirtøkan fyri barnakoppsetingum minkandi. Hetta er ein vandamikil gongd. Tí er neyðugt við átøkum, sum økja undirtøkuna fyri barnakoppseting og HPV-koppseting.

Harafturat skal haldast fram at koppseta eldri fyri influensu, lungnabruna og koronu.

3.10 Sosialur ójavni í heilsu

Í flestu vandatættum sæst ein sosialur ójavni í heilsu. *Hvussu hevur tú tað?* kanningin vísir, at fólk við stuttari útbúgving eru yvirumboðað, tá ið talan er um ósunnan heilsuatburð.

Tað er eisini hjá teimum, vit síggja størsta partin við ringari sjálvmettari heilsu, strongd, drúgvari sjúku og einsemi. Sostatt er ein stórur partur av vandatættunum savnaður í einum samfelagsbólki.

Ójavni í heilsu er ein torgreiddur trupulleiki, har ongar einfaldar loysnir eru. Ein trupulleiki, sum fokus áhaldandi eigur at vera á, og sum heilsuverkið ikki einsamalt kann loysa. Allir samfelagsgeirar mugu hjálpa til. Men heilsuverkið eigur at ganga á odda, fyri at tryggja javnað í heilsu. Heilsuverkið eigur sostatt altíð at geva gætur, um tørvur er á serligari tænastu við atliti at sosialum trupulleikum, tá ið heilsuverkið hevur samband við borgarar og sjúklingar.

[33] *https://www.hmr.fo/fo/kunning/tidindi/nyggj-krabbameinsaetlan-logartryggjad-vidgerdartrygd-fyri-krabbamein#*

II LANGTÍÐARMÁL OG ÁTØK

Við støði í hoyringarfundum, íkasti frá borgarum, lýsing av heilsustøðuni og viðgerð í bólkunum, sum hava arbeitt við heilsupolitikkinum, er tilmæli gjørt um langtíðarmál á heilsuøkinum, sum skulu røkkast fram til 2035.

Fyri at taka tey fyrstu stigini til at røkka langtíðarmálunum, eru eisini tilmæli gjørd um átøk, sum skulu setast í verk komandi trý árini.

Sum sást í parti 2.4 vísa ymisku íkastini til heilsupolitikkin, at menning og broyting serliga eigur at henda innan hesi øki:

- Nógv størri dentur skal leggjast á heilsuframa og fyribyrging
- Tørvur er á at menna heilsutænastur í nærumhvørvinum
- Samanhangandi sjúklingagongdir
- Sjúkrahúsverkið herundir:
  - Eitt fakliga burðardygt og sameint sjúkrahúsverk
  - Styttri bíðilistar
  - Faklig menning og gransking
- Góðskumenning og dáta
- KT og tøkni – troyta møguleikarnar
- Tryggja nóg mikið av vælútbúnum starvsfólkum og uppgávuflyting
- Onnur evnir

Í komandi pørtum (4 – 11) verður greitt frá langtíðarmálum og átøkum á hesum økjum, ið skulu vera við til at fremja visjónina um at *"...allir borgarar sum longst varðveita sálarliga, kropsliga og sosiala vælveru, og at rætt og dygdargóð viðgerð verður veitt, tá hon krevst."*

4. Heilsuframi og fyribyrging

Hesin parturin snýr seg um heilsuframa og fyribyrging. Greitt verður frá langtíðarmálum og átøkum, sum skulu fremjast komandi árini fyri at styrkja heilsugóðan lívsstíl og forða fyri sjúku.

	Síða
• 4.1 Íkast til heilsupolitikkin um heilsuframa og fyribyrging	**26**
• 4.2 Langtíðarmál	**26**
• 4.3 Átøk	**27**

4.1 Íkast til heilsupolitikkin um heilsuframa og fyribyrging

Ein afturvendandi táttur á hoyringarfundunum var, at heilsuverkið og alt samfelagið mugu skifta kós soleiðis, at heilsuframi og fyribyrging fáa munandi størri ans.[34]

Breið undirtøka tykist soleiðis at vera fyri ovasta málinum fyri politikkin:

> *"...at allir borgarar sum longst varðveita sálarliga, kropsliga og sosiala vælveru.."*

Grundgevingin fyri at broyta kós er, at tað er nógv betri at fyribyrgja enn at viðgera. Fyrst og fremst tí tað er betri fyri lívsgóðskuna, men eisini tí tað lættir um í heilsuverkinum. Heilsuverkið má raðfesta øðrvísi, tí uppgávan økist við fleiri eldri borgarum, fleiri lívsháttarsjúkum, nýggjum viðgerðarhættum og størri væntanum frá borgarum. Miðvíst arbeiði við heilsuframa og fyribyrging betrar møguleikarnar hjá heilsuverkinum at lyfta øktu uppgávuna.

Á hoyringarfundunum vórðu fleiri øki nevnd, har tørvur er á heilsuframa- og fyribyrgingarátøkum, undir hesum átøk viðvíkjandi royking, kosti, rørslu, rúsdrekka, rúsevnum og trivnaði millum ung.

Hetta er í tráð við úrslitið av spurnakanningini, har undirtøka yvirskipað var fyri, at tað almenna eigur part av ábyrgdini viðvíkjandi heilsuframa og fyribyrging, serliga tá ið talan er um børn og ung. Hetta er eisini í samsvari við fakligu tilmælini frá Heilsustýrinum.

4.2 Langtíðarmál

Fyrst og fremst skal munandi størri dentur leggjast á fyribyrging og heilsuframa enn higartil, har høvuðsdentur hevur verið á viðgerð. Strembast skal eftir, at færri gerast sjúk ella versna av sjúku. Málið er, at heilsuverkið miðvíst arbeiðir við heilsuframa og fyribyrging á jøvnum føti við viðgerð í 2035.

> *Heilsuverkið megnar ikki einsamalt at loysa hesa uppgávu. Alt samfelagið má vera við til at fremja heilsu og fyribyrgja sjúku. Fyrst og fremst nærmastu samstarvspartar heilsuverksins, t.e. eldraøkið, almannaøkið og barna- og undirvísingarøkið, men eisini einstaklingar, feløg, arbeiðspláss og onnur. Tí er eitt langtíðarmál, at heilsuframi og fyribyrging skulu vera partur av øllum samfelagsviðurskiftum.*

Tað er eisini eitt langtíðarmál, at miðallivialdurin heldur áfram at vaksa og framhaldandi er millum teir hægstu í heiminum - við góðari lívsgóðsku øll liviárini.

Harafturat verður mælt til at gera ítøkilig langtíðarmál fyri tær størstu heilsuavbjóðingarnar, sum eru: Royking, rørsla, yvirvekt, rúsdrekkanýtsla hjá børnum og ungum, trivnaður millum børn og ung og rúsevnismisnýtsla. M.a. við úrslitinum av spurnakanningini í huga, verður serligur dentur lagdur á langtíðarmál fyri heilsuna hjá børnum og ungum.

[34] ***Heilsuframi:*** *Átøk og virksemi sum styrkja møguleikarnar hjá fólki at betra og varðveita góða heilsu - ofta við at stuðla upp undir heilsugóð val og lívsstíl.*
Fyribyrging: *Átøk sum hava til endamáls at forða fyri sjúku, skaðum, ella at heilsustøða versnar - bæði áðrenn tey henda, tíðliga í sjúkugongdini og við at sleppa undan afturstigi.*

Langtíðarmálini fram til 2035 eru hesi:

- Heilsuverkið arbeiðir miðvíst við heilsuframa og fyribyrging á jøvnum føti við viðgerð
- Heilsuframi og fyribyrging skulu vera partur av øllum samfelagsviðurskiftum
- Miðallivialdurin heldur áfram at vaksa og er millum teir hægstu í heiminum - við góðari lívsgóðsku øll liviárini
- Talið á fólki, ið roykja dagliga, liggur millum tey Norðurlondini við fæst roykjarum
- Børn og ung undir 18 ár roykja ikki/nýta ikki nikotinvørur
- Fleiri fylgja tilmælunum hjá WHO um rørslu
- Færri hava BMI yvir 30
- Børn og ung undir 18 ár drekka ikki rúsdrekka
- Betri trivnaður millum børn og ung
- Nýtslan av rúsevnum er minkað

4.3 Átøk

Fyri at taka fyrstu stigini at røkka langtíðarmálum fyri heilsuframa og fyribyrging, verða átøk, sum skulu setast í verk 2026 – 2028 nevnd niðanfyri. So hvørt sum heilsupolitikkurin verður eftirmettur, verður støða tikin til nýggj átøk eftir 2028.

Átøk í 2026

1. **Rørsluátøk um alt landið:** Heilsustýrið vísir á, at vantandi rørsla er ein stór heilsuavbjóðing. Heilsumálaráðið, Heilsustýrið og ÍSF hava gjørt eina samstarvsavtalu um at fremja heilsu, sum byggir á eina felags sannføring um, at góð fólkaheilsa er ein fortreyt fyri trivnaði og vælferð, bæði hjá einstaklingum og í samfelagnum. Samstarvið snýr seg m.a. um at arbeiða saman um átøk, sum økja um rørslu og betra sálarligu heilsuna hjá føroyingum. Samstarvsavtala er eisini gjørd við ÍSF um skúlaleikir, sum snúgva seg um rørslu í fólkaskúlanum. Skotið verður upp, at ítøkilig átøk at fremja rørslu og felagsskapir fyri børn, ung og vaksin verða fyrireikað og sett í verk við støði í hesum avtalum. Fróðskaparsetrið eigur at vera við í arbeiðnum. Fróðskaparsetrið hevur longu ment verkætlanir fyri at fremja rørslu, sum kunnu vera íblástur fyri arbeiðið. Talan er t.d. um átøkini "11 for health" (málbólkur 10-13 ára gomul) og "Fit First" (málbólkur 6-20 ára gomul), sum verður roynt í Suðuroy og Eysturoy. Í 2026 verður ein ætlan gjørd, og fyrstu átøkini framd. Arbeiðið heldur fram í 2027. *Ábyrgd/partar: Heilsustýrið, ÍSF, Fróðskaparsetur Føroya og Undirvísingarstýrið.*

2. **Avgjøld á sunnar og ósunnar matvørur:** Heilsustýrið vísir á, at tað ein stór heilsuavbjóðing, at vit eta ov ósunt. Tí eiga vit at eggja fólki til at keypa sunnan mat. Prísurin hevur sjálvandi nógv at týða, tá ið vit keypa. Avgjøld á sunnar matvørur kunnu tí lækkast, og avgjøld á ósunnar matvørur kunnu hækkast, fyri at fáa fólk at raðfesta

sunnari matvørur.[35] Í hesum sambandi eigur eitt uppskot at verða gjørt um, hvørjar matvørur talan kann verða um, og hvussu avgjøldini skulu rættast til. Í samband við fíggjarlógaruppskotið fyri 2026 er lagt upp til at lækka meirvirðisgjald á m.a. grønmeti. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Heilsustýrið og TAKS.*

3. **Almenn kostráð frá Heilsustýrinum:** Heilsustýrið skal við jøvnum millumbilum gera vísindaliga grundað kostráð fyri at kunna borgararnar um sunnan kost. Fyrra hálvár í 2026, ger Heilsustýrið kostráð. *Ábyrgd/partar: Heilsustýrið og Heilsufrøðiliga Starvsstovan.*

4. **Tilboð um royki- og nikotinavvenjing:** Sambært WHO er royking tann einstaki tátturin, sum hevur størstu, neiligu ávirkanina á heilsuna. Eisini er nikotinnýtsla (t.d. snús) heilsuskaðilig. Tøl frá kanningini *Hvussu hevur tú tað?* vísa, at roykt verður munandi meir í Føroyum, samanborið við grannalondini. Kanningin vísir harafturat, at ein stórur meiriluti (85%) av roykjarunum vil leggja av.[36] Men onki alment tilboð um avvenjing er til fólk, sum vilja leggja av at roykja ella nýta nikotinvørur. Tí verður skotið upp, at Apoteksverkið og Heilsustýrið gera ætlan um og seta í verk eitt ókeypis tilboð um royki- og nikotinavvenjing í 2026 og 2027. *Ábyrgd/partar: Heilsustýrið og Apoteksverkið.*

5. **Roykilóg:** Tørvur er á at broyta roykilógina fyri at tryggja, at færri roykja ella nýta nikotin. Royking er ein stórur heilsutrupulleiki, og afturat hesum koma nógvar, nýggjar nikotinvørur á marknaðin (t.d. snús). Eisini vísir ESPAD-kanningin, at ung undir 18 ár hava lætta atgongd at keypa tubbaks- og nikotinvørur í Føroyum, tí aldursmarkið ikki verður handhevjað nøktandi. Tað skal tryggjast, at ung undir 18 ár, ikki hava atgongd at keypa tubbak og nikotinvørur. Tí eigur eitt uppskot at verða gjørt um at broyta roykilógina. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið.*

6. **Økja undirtøkuna fyri koppseting:** Tøl frá Heilsustýrinum og Landslæknanum vísa, at undirtøkan fyri barnakoppseting minkar. Tí ætlar Heilsustýrið at seta eina áminningarskipan til foreldur í verk, fyri at fáa betri luttøku, so forðað verður fyri, at barnasjúkur taka seg upp. Eisini skulu upplýsingarátøk gerast, og tryggjast skal lættari atgongd til koppseting. Somuleiðis ætlar Heilsustýrið at virka fyri at økja undirtøkuna fyri HPV-koppseting. *Ábyrgd/partar: Heilsustýrið, Heilsutrygd/kommunulæknar og Gigni.*

Átøk í 2027-28

7. **Fólkaheilsuætlan til 2035:** Ein fólkaheilsuætlan fyri tíðarskeiðið fram móti 2035 skal gerast. Átøkini fyri 2026-2028 eru bert fyrstu stigini á leiðini til at realisera langtíðarmálini fyri heilsuframa og fyribyrging í 2035. Tí er neyðugt at gera eina samlaða fólkaheilsuætlan fyri árini fram til 2035. Í ætlanini skal vera ein gjøllig lýsing av heilsustøðuni og teimum viðurskiftum, sum hótta fólkaheilsuna. Eisini skal ætlanin hava ítøkilig átøk til at styrkja fólkaheilsuna, árini fram til 2035. Harumframt eigur at verða ásett í lóggávu, hvør hevur ábyrgdina av heilsuframa og fyribyrging. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið og Heilsustýrið.*

8. **Heilsugóður skúla- og barnagarðsmatur:** Hagtøl hjá Gigni vísa, at yvirvekt er ein stórur trupulleiki millum skúlabørn. Í Klaksvíkar kommunu hevur ein skipan við skúlamati verið virkin í nøkur ár, har borðreitt verður við sunnum millummálum. Skipanin er uttan foreldragjald. Í øðrum londum eru góðar royndir við at skipa fyri skúlamati, av tí at góðir matvanar verða grundaðir tíðliga í lívinum.[37] [38] Tí eigur skipan við sunnum skúla- og barnagarðsmati at vera sett í verk. Í fyrstu

[35] *Preventing childhood overweight and obesity: Policy recommendations from the Nordic Cancer Societies, Nordic Cancer Union, 2024*
[36] *Hvussu hevur tú tað? 2023, s. 32*
[37] *Long-term effects of childhood nutrition; Evidence from a school lunch reform, Petter Lundborg et al., 2021 https://academic.oup.com/restud/article/89/2/876/6273674*
[38] *7 forslag til sund og grøn mad i skolen, Kost- og Ernæringsforbundet*

atløgu eigur hetta at verða sett í verk sum ein royndarskipan. *Ábyrgd/partar: Kommunur og Kommunufelagið.*

9. **Dýrari tubbak og nikotinvørur:** Talið av fólki, ið roykja dagliga, er høgt í Føroyum sammett við grannalondini. Royking er tann lívsstílsfaktorurin, sum hevur størst ávirkan á heilsuna. Royndir aðrastaðni vísa, at prísurin er avgerandi fyri nýtsluna av tubbaki og nikotinvørum (t.d. snús), serliga millum ung.[39] Tí verður skotið upp at hækka prísin á sigarettum og nikotinvørum. Sambært Heilsustýrinum skal prísøkingin muna fyri at fáa virknað, t.d. hækka upp í 100 kr. fyri ein pakka við 20 sigarettum. Í samband við fíggjarlógaruppskotið fyri 2026 er lagt upp til at hækka avgjaldið á sigarettum og snúsi. *Ábyrgd/partar: Fíggjarmálaráðið.*

10. **Heilsustarvsfólk vegleiða um royking (VeryBriefAdvice):** Í Bretlandi er ein granskingargrundaður leistur mentur, har heilsustarvsfólk, við at brúka heilt stutta tíð (niður í hálvan minutt), spyrja og vegleiða um royking í sambandi við viðtalu á eitt nú sjúkrahúsi ella hjá kommunulækna.[40] Eisini hava tey møguleika fyri at vísa til avvenjingartilboð. Royndirnar í Bretlandi vísa virknað í sambandi við at fáa fólk at leggja av at roykja. Hesin leistur eigur tí at verða brúktur í føroyska heilsuverkinum, bæði á sjúkrahúsum, í kommunulæknaviðtalum, í kommunalum heilsutænastum og hjá heilsufrøðingum. Tilboð um roykiavvenjing mugu so eisini verða tøk. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd/kommunulæknar, Kommunufelagið og Gigni.*

11. **Minka rúsdrekkanýtslu hjá ungum:** Rúsdrekkanýtslan hjá ungum (serliga mannfólki) er stór - eisini teimum undir 18 ár. Átøk eru longu sett í verk fyri at minka rúsdrekkanýtsluna millum børn og ung, við íblástri úr Íslandi og frá átakinum, "Fælles om ungelivet", sum er gjørt í Danmark, við íblástri úr Íslandi. Tað er avgerandi at styrkja hesi átøk, sum snúgva seg um at skapa eitt gott ungdómslív, við at savna foreldur og lokalar aktørar at seta á stovn sunnar felagsskapir fyri ung uttan rúsdrekka. Talan er um torgreiddar avbjóðingar, har einfaldar og lættar loysnir ikki finnast. Átakið fevnir um myndugleikar, skúlar, frítíðartilboð, feløg og foreldur. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Gigni, Heilsustýrið, Kommunufelagið o.o.*

12. **Átøk móti rúsevnismisnýtslu:** Rúsevnismisnýtsla er ein stór heilsuavbjóðing, sambært *Heildarætlan um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028*, sum Løgmansskrivstovan hevur gjørt saman við fleiri pørtum. Hetta verður eisini staðfest av viðgerðarstovnunum. Stovnarnar siga, at stórur tørvur er á tilboðum um avrúsing, viðgerð og eisini endurmenning, fyri at forða fyri afturfalli. Men viðgerðarstovnarnir hava ikki neyðuga kapasitetin til at nøkta økta tørvin. Í heildarætlanini verður mælt til fleiri átøk innan fyribyrging, viðgerð og eftirviðgerð. Stig eiga at verða tikin til at seta hesi átøk í verk. Heilsustýrið, viðgerðarstovnarnir o.o. eiga at verða tikin upp í hetta arbeiðið. *Ábyrgd/partar: Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Heilsustýrið, viðgerðarstovnar, Gigni o.o.*

13. **Lággáttartilboð til ung í mistrivnaði:** Nógv ung mistrívast, vísir kanningin, *Hvussu hevur tú tað?* Á hoyringarfundi við sjúklingafeløgini varð mælt til, at seta á stovn lággáttartilboð til ung av líknandi slagi sum í grannalondunum. Hugsað verður um samrøðutilboð, sum sjálvboðin – við stuðli frá fakfólki – standa fyri. Málbólkurin er ung í mistrivnaði, sum tó ikki hava viðgerðartilboð hjá sálarfrøðingi ella sálarlækna fyri neyðini. Hugsað verður um átøk sum "Headspace", ið finst í fleiri londum. Í sambandi við Barnaverkætlanina eru

[39] *Kjell Bjartveit, 1995, Den største utfordring til forebyggende helsearbeid, https://pdfs.semanticscholar.org/a89a/f166da7db9f2f8c36386b5d6bda88acbe55b.pdf*
[40] *Christopher Chi Wai Cheng et al., **Effectiveness of Very Brief Advice on Tobacco Cessation, 2024***

ætlanir um lággáttartilboð til ung í mistrivnaði. Skotið verður upp, at hetta átak verður gjørt í sambandi við Barnaverkætlanina. *Ábyrgd/partar: Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Gigni, Almanna- og mentamálaráðið og Kommunufelagið.*

14. **Sjúklingaundirvísing til fólk við varandi sjúku:** Heilsustýrið sigur, at fleiri sjúklingar við varandi sjúkum, kunnu væntast komandi árini. Tí er neyðugt við tiltøkum, sum hjálpa hesum borgarum. Sjúklingaundirvísing er eitt háttalag, sum stuðlar borgarum í at liva við varandi sjúku, fylgja viðgerðini og taka ábyrgd fyri egnari heilsu. WHO mælir til sjúklinga-undirvísing.[41] Í øðrum londum eru tilboð um sjúklingaundirvísing í bólkum vanlig, men her á landi finst ikki nógv av hesum. Steno Diabes Center hevur sjúklingaundirvísing innan diabetes. Sjúklingaundirvísing er viðkomandi fyri nógvar aðrar sjúklingabólkar, t.d. hjarta- og æðrasjúklingar, lungasjúklingar og ryggsjúklingar. Skotið verður upp, at ein ætlan verður gjørd fyri, at Sjúkrahúsverkið stigvíst kann bjóða sjúklingaundirvísing á fleiri sjúkuøkjum. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

15. **Tarmkrabbascreening og viðgerðir:** Í Krabbameinsætlanini frá 2022 er eitt fakligt tilmæli um at seta í verk screening fyri tarmkrabba. Hetta átakið hevur verið lívbjargandi í øðrum londum og eigur at verða sett í verk í Føroyum. Umráðandi er, at kapasiteturin til viðgerðir fylgir við, tí væntast kunnu fleiri tilburðir, tá ið hesar kanningar fara í gongd. Sjúkrahúsverkið hevur gjørt eitt tilmæli um, hvussu hetta kann setast í verk. Í 2025 eru fyrireikingar farnar í gongd. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið.*

16. **Screening og viðgerð fyri burðartunglyndi:** Kanningar vísa, at 10-12% av mammum og uml. 8% av pápum vera rakt av burðartunglyndi. Heilsufrøðingar screena allar mammur í Føroyum fyri burðartunglyndi, men hava onki sertilboð at vísa til. Tað er sera óheppið, tí burðartunglyndi kann gera stóran skaða á lítla barnið og familjuna annars, um tey ikki fáa hjálp rættstundis. Heilsufrøðingar í grannalondum hava screenað pápar fyri burðartunglyndi í fleiri ár. Skotið verður upp, at screening av pápum og viðgerðartilboð til bæði foreldur verður sett á stovn. *Ábyrgd/partar: Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Gigni.*

[41] *WHO: Therapeutic patient education, 2023 https://www.who.int/europe/teams/ncd-management/therapeutic-patient-education*

2026 Átøk	2027-28 Átøk	2029-35 Átøk	Langtíðarmál 2035
1. Rørsluátøk um alt landið	7. Fólkaheilsuætlan til 2035 (Fyrireiking og íverksetan byrjar)	Íverksetan av Fólka-heilsuætlan heldur fram	Heilsuverkið arbeiðir miðvíst við heilsuframa og fyribyrging á jøvnum føti við viðgerð
2. Avgjøld á sunnum og ósunnum matvørum	8. Heilsugóður skúla- og barnagarðsmatur		Heilsuframi og fyri-byrging skulu vera partur av øllum sam-felagsviðurskiftum
3. Almenn kostráð frá Heilsustýrinum	9. Dýrari tubbak og nikotinvørur		Miðallivialdurin heldur áfram at vaksa og er millum teir hægstu í heiminum – við góðari lívsgóðsku øll liviárini
4. Tilboð um royki- og nikotinavvenjing	10. Heilsustarvsfólk vegleiða um royking (VBA)		Talið á gerandis-roykjarum liggur millum tey Norðurlondini við fæst roykjarum
5. Roykilóg	11. Minka rúsdrekka-nýtslu hjá ungum		Børn og ung undir 18 ár roykja ikki
6. Økja undirtøkuna fyri koppseting	12. Átøk móti rúsevnismisnýtslu		Fleiri fylgja tilmælunum hjá WHO um rørslu
	13. Lággáttartilboð til ung í mistrivnaði		Færri hava BMI yvir 30
	14. Sjúklingaundirvísing til fólk við varandi sjúkum		Børn og ung undir 18 ár drekka ikki rúsdrekka
	15. Tarmkrabba-screening og viðgerðir		Betri trivnaður millum børn og ung
	16. Screening og viðgerð fyri burðartunglyndi		Nýtslan av rúsevnum er minkað

Talva 4.1 Heilsuframi og fyribyrging av sjúku – langtíðarmál 2035 og átøk fyri styttri tíðarskeið

5. Heilsutænastur í nærumhvørvinum

Hesin parturin snýr seg um heilsutænastur í nærumhvørvinum. Greitt verður frá langtíðarmálum og átøkum, sum skulu fremjast komandi árini, fyri at tryggja borgarum fleiri og betri heilsutænastur í nærumhvørvinum.

	Síða
• 5.1 Íkast til heilsupolitikkin um heilsutænastur í nærumhvørvinum	**33**
• 5.2 Langtíðarmál	**33**
• 5.3 Átøk	**34**

5.1 Íkast til heilsupolitikkin um heilsutænastur í nærumhvørvinum

Á hoyringarfundunum var stórt ynski um at styrkja heilsuverkið í nærumhvørvinum. Serliga tvey øki vórðu nevnd:

- ***Tørvur á fleiri kommunulæknum, so øll hava fastan kommunulækna og sleppast kann undan viðtalum við bert avloysarum. Ynski er um fleiri kommunulæknar at átaka sær uppgávur tætt at borgarunum t.d. uppgávur, sum í dag verða gjørdar á sjúkrahúsunum.***

- ***Ynski er um fleiri heilsutilboð tætt við borgaran, t.d. í heilsuhúsum ella -miðstøðum kring alt landið. Hoyringarpartarnir hava fleiri uppskot um ítøkilig tilboð í hesum heilsumiðstøðum, har man afturat kommunulæknatænastunum, t.d. kann taka blóðroyndir, ljósmóðir og heilsuframa- og fyribyrgingartilboð.***

Eisini verður nevnt, at sum alternativ til innlegging ber til at hava útkoyrandi funktiónir heim til borgaran.

5.2 Langtíðarmál

Nógvar viðmerkingar frá hoyringarfundunum snúgva seg um at menna heilsuverkið í nærumhvørvinum - bæði við heilsumiðstøðum og við at tryggja øllum fastan kommunulækna.

Kommunulæknin er vanliga fyrsti og týdningarmesti kontaktpersónur hjá borgaranum til heilsuverkið, og ein sera stórur partur av kanningum og viðgerðum verður gjørdur hjá kommunulækna. Bert ein minni partur verður sendur víðari til sjúkrahúsini. Kommunulæknar hava eisini ein týðandi leiklut í heilsuframa og fyribyrging. Gransking vísir, at sjúklingar við føstum kommunulækna eru frískari og liva longri enn onnur.[42] Tí er avgerandi at hava nøktandi tal á kommunulæknum.

Í álitinum, *Tørvurin á serlæknum í føroyska heilsuverkinum*,[43] verður mælt til, at hava tilsamans 46 fastar kommunulæknar svarandi til, at hvør kommunulækni hevur 1.200 sjúklingar. Hetta hevði styrkt heilsuverkið munandi og hevði harafturat gjørt tað møguligt fyri kommunulæknar at tikið nýggjar uppgávur.

Heilsumiðstøðir í nærumhvørvinum kunnu tryggja borgarunum lættari atgongd til heilsutænastur afturat kommunulæknatænastunum. Ítøkilig uppskot eru sum nevnt, møguleika at taka blóðroyndir, ljósmóðir og tilboð viðvíkjandi heilsuframa og fyribyrging. Onnur tilboð í heilsumiðstøðum kunnu vera sjúklingaundirvísing til fólk við varandi sjúkum, endurvenjing, fysioterapi o.a. At gera heilsumiðstøðir er í tráð við lógina um heilsutænastur í nærumhvørvinum, sum júst er samtykt.[44]

> *Øktur kapasitetur í nærumhvørvinum gevur møguleika fyri at flyta uppgávur út av sjúkrahúsunum og á tann hátt loysa tær einfaldari og bíligari av heilsustarvsfólki í nærumhvørvinum. Atlit skulu takast til at tryggja góðsku og tænastustøði, tá ið uppgávur verða fluttar til nærøkið.*

Eisini er ynski um fleiri heilsutænastur heima hjá borgaranum, fyri at sleppa undan innleggingum. Hetta er ein gongd, sum sæst í øðrum londum, og sum okkara heilsuverk eigur at leggja dent á.

Samanumtikið skal heilsuverkið í nærumhvørvinum útbyggjast munandi. Heilsumiðstøðir við fleirtáttaðum heilsutænastum skulu vera kring landið, og munandi fleiri kommunulæknar skulu vera, sum loysa nógv fleiri heilsuuppgávur, t.d. uppgávur sum sjúkrahúsini loysa í dag. Við tíðini skulu fleiri heilsutænastur kunna veitast heima við hús, sum alternativ til innlegging.

[42] *Hogne Sandvik et al., Continuity in general practice as predictor of mortality, acute hospitalisation, and use of out-of-hours care, 2022*
[43] ***Tørvurin á serlæknum í føroyska heilsuverkinum,*** *2024 https://landsstyri.cdn.fo/savn/ta0fhur5/serlaeknaaetlan-toervur-a-serlaeknum-i-foeroyska-heilsuverkinum-juni-2024.pdf?s=nX22FljnBCqHtxAIGrxbYOrBok0*
[44] *https://logir.fo/Logtingslog/66-fra-28-04-2025-um-at-skipa-heilsutaenastur-i-naerumhvorvinum-hja-borgaranum*

Langtíðarmálini fram til 2035 eru hesi:

- Eitt víðkað heilsuverk í nærumhvørvinum, um alt landið
- Heilsumiðstøðir kring landið við fleiri fakbólkum og heilsutænastum
- 46 kommunulæknar, sum taka sær av nógv fleiri uppgávum í nærumhvørvinum
- Viðgerð í heiminum er vanlig

5.3 Átøk

Fyri at røkka málunum um heilsutænastur í nærumhvørvinum, skulu fleiri átøk setast í verk komandi árini. So hvørt sum heilsupolitikkurin verður eftirmettur, verður støða tikin til nýggj átøk eftir 2028.

Átøk í 2026

17. **Fleiri fastir kommunulæknar:** Tað er av stórum týdningi fyri heilsuna, at fólk hava fastan kommunulækna. Í løtuni eru tó fleiri borgarar, sum ikki hava fastan kommunulækna. Við ársbyrjan 2026 eru 37 normerað kommunulæknastørv. Heilsutrygd væntar, at 28 av hesum størvum eru sett við føstum læknum, meðan vikarar røkja 9 av teimum. Tíbetur eru fleiri føroyingar í gongd við útbúgving til kommunulækna. Tí verður skotið upp, at næsta stig til at loysa kommunulæknatørvin verður tikið í 2026, við at Heilsutrygd útvegar fleiri fastar kommunulæknar, so at 31-32 fastir kommunulæknar eru í starvi við ársenda í 2026. *Ábyrgd/partar: Heilsutrygd.*

18. **Ætlan fyri tænastur í heilsumiðstøðunum:** Lóg um stovnan av heilsumiðstøðum er samtykt. Tørvur er á at leggja eina ítøkiliga ætlan fyri at víðka virksemið í heilsumiðstøðunum við fleiri fakbólkum og tænastum. Tað fer at vera ymiskur tørvur á tænastum millum støðini, og tískil nýtist innihaldið ikki at vera tað sama allastaðni. Heilsumiðstøðirnar skulu hava ein týðandi leiklut í sambandi við heilsuframa og fyribyrging, og tí skulu starvsfólkini hava førleikar á hesum økjum. Eisini eigur at verða umhugsað, um tilboð innan almanna- og barnaøkið skulu vera í heilsumiðstøðunum. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Heilsustýrið, Heilsutrygd/kommunulæknar, Sjúkrahúsverkið, Kommunufelagið o.o.*

Átøk í 2027-28

19. **Øll hava fastan kommunulækna:** Arbeiðið at menna heilsutænastur í nærumhvørvinum heldur fram, við at fleiri fastir kommunulæknar verða settir. Skotið verður upp, at talið á kommunulæknum verður økt við fimm nýggjum størvum, so at kommunulæknastørvini verða 42 tilsamans. Fleiri føroyingar eru í holt við at útbúgva seg til kommunulækna. Tí metir Heilsutrygd tað vera sannlíkt, at flestu størvini kunnu setast við føstum kommunulæknum. Hetta hevði ment heilsuverkið munandi til gagns fyri borgararnar. Um 42 kommunulæknar vóru, hevði hvør havt 1.300 sjúklingar í meðal. Á henda hátt hevði verið nóg mikið av kapasiteti til, at øll kundu havt fastan kommunulækna. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið og Heilsutrygd/kommunulæknar og Kommunufelagið.*

20. **Heilsumiðstøðir verða víðkaðar:** Við støði í ætlan fyri innihald í heilsumiðstøðunum, verða verandi heilsumiðstøðir útbygdar við alsamt

fleiri tilboðum. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Heilsustýrið, Heilsutrygd/kommunulæknar, Sjúkrahúsverkið og Kommunufelagið.*

21. **Uppgávuætlan fyri kommunulæknar:** So hvørt sum fleiri kommunulæknar vera, skulu teir taka sær av fleiri uppgávum, m.a. frá sjúkrahúsunum. Ein ætlan fyri, hvørjar nýggjar uppgávur, kommunulæknarnir skulu hava, skal gerast í samráð við Heilsutrygd, kommunulæknar, Sjúkrahúsverkið og Kommunufelagið. Dømi um nýggjar og øktar uppgávur eru heilsutilboð til fólk við varandi sjúku, fyribyrging av sjúkum, fyribyrging av ójavnað í heilsu og at tryggja samanhangandi sjúklingagongdir. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Heilsutrygd/kommunulæknar, Sjúkrahúsverkið og Kommunufelagið.*

22. **Heilsufaklig leiðsla av kommunulæknunum:** Heilsutrygd er setanarmyndugleiki hjá kommunulæknum. Sum er, er Heilsutrygd ein fyrisitingarlig eind, sum varðar av útgjøldum, manning o.ø. Har er ongin heilsufakligur leiðari, sum kann tryggja fakliga menning av økinum, og at arbeitt verður eftir felags, fakligum leiðreglum. Kommunulæknar eiga at hava eina læknafakliga leiðslu. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið.*

23. **Viðgerð í heiminum:** Í øðrum londum er vanligt at viðgera sjúklingar heima, sum alternativ til innlegging. Talan kann vera um viðgerðir, sum starvsfólk innan eldraøkið ella útkoyrandi starvsfólk frá sjúkrahúsunum taka sær av. Dømi um heimaviðgerðir eru intravenøsar antibiotikaviðgerðir, útkoyrandi geriatrisk[45] toymi og innlegging í heiminum (t.d. røktarheimsbúfólk), sum ein útkoyrandi serlækni/sjúkrarøktarfrøðingur hevur ábyrgd av. Ein ætlan eigur at verða gjørd fyri, hvussu heimaviðgerð kann setast í verk. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið, Kommunufelagið og Heilsutrygd.*

2026 Átøk	2027-28 Átøk	2029-35 Átøk	Langtíðarmál 2035
17. Fleiri fastir kommunulæknar	19. Øll hava fastan kommunulækna	Heilsumiðstøðir verða víðkaðar	Eitt víðkað heilsuverk í nærumhvørvinum, um alt landið
18. Ætlan fyri tænastur í heilsumiðstøðum	20. Heilsumiðstøðir verða víðkaðar	Fleiri kommunulæknar	Heilsumiðstøðir kring landið við fleiri fakbólkum og heilsutænastum
	21. Uppgávuætlan fyri kommunulæknar		46 kommunulæknar, sum taka sær av nógv fleiri uppgávum í nærumhvørvinum
	22. Heilsufaklig leiðsla av kommunulæknunum		Viðgerð í heiminum er vanlig
	23. Viðgerð í heiminum		

Talva 5.1 Heilsutænastur í nærumhvørvinum – langtíðarmál 2035 og átøk fyri styttri tíðarskeið

[45] *Sum hava við eldri fólk at gera.*

6. Samanhangandi sjúklingagongdir

Í hesum partinum verður greitt frá langtíðarmálum og átøkum, sum skulu tryggja meiri samanhangandi sjúklingagongdir á heilsuøkinum.

Síða

- 6.1 Íkast til heilsupolitikkin um samanhangandi sjúklingagongdir **37**
- 6.2 Langtíðarmál **37**
- 4.3 Átøk **38**

6.1 Íkast til heilsupolitikkin um samanhangandi sjúklingagongdir

Samanhangandi ella rættari ósamanhangandi sjúklingagongdir er tað evnið, ið hevur verið mest umrøtt á hoyringarfundunum. Ein afturvendandi atfinning er, at sjúklingarnir uppliva, at heilsuverkið ikki arbeiðir nóg væl saman, og samstarvið við næstu samstarvspartar – serliga kommunurnar og Almannaverkið – ikki er nøktandi.

Sjúklingarnir uppliva vánaligar sjúklingagongdir í nógvum ymiskum høpum, til dømis:

- ***Óneyðugar innleggingar***
- ***Liðugt viðgjørdir sjúklingar sum bíða eftir tilboði í primera geiranum***
- ***Vantandi tilboð um endurvenjing[46] og endurmenning[47] eftir innlegging/sjúku***
- ***Vantandi uppfylging aftan á viðgerð uttanlands***
- ***Óskynsom markamót***
- ***Vantandi samskipan av tilboðum til sjúklingar við varandi sjúkum***
- ***Vantandi samskipan millum sjúkrahús, millum deildir innanhýsis á sjúkrahúsunum og millum geirar***
- ***Bíðitíð eftir kanning og viðgerð í heilsuverkinum.***

Summir hoyringarpartar vísa á, at heilsuøkið í Føroyum er so mikið lítið, at tað skuldi verið lætt at tryggja góðar sjúklingagongdir. Hoyringarsvarini benda tó á, at vit ikki hava dugað nóg væl at gagnnýtt hendan møguleikan.

Summi nevna bygnaðin sum orsøk, og at ábyrgdin av heilsuøkinum er so smábýtt, bæði politiskt, umsitingarliga og á stovnsstøði.

Onnur íkast frá hoyringarfundunum snúgva seg um ógreiðar reglur, sum elva til ivamál um ábyrgdina av uppgávunum, og sum ger ójavna tænastu kring landið. Onnur vísa á tørvin á greiðum avtalum og føstum skipanum, sum tryggja samskipan av sjúklingagongdum.

Samanumtikið vísa hoyringarsvarini týðiliga, at samanhangurin millum partarnar í heilsuverkinum – og aðrar samstarvspartar, sum t.d. eldraøkið - ikki er nøktandi.

6.2 Langtíðamál

Samanhangur er ein avbjóðing hjá heilsuverkum í øllum heiminum. Heilsuøkið í Føroyum átti at havt stóran fyrimun vegna støddina, men tó vísa fleiri hoyringarpartar á trupulleikar við ósamanhangandi sjúklingagongdum. Hetta skal broytast.

Eitt langtíðarmál eigur at vera, at Føroyar skulu verða altjóða fyrimynd fyri samanhang og góðar sjúklingagongdir.

> *Eitt annað mál er at fáa eitt smidligt samstarv millum ymsu stovnarnar í heilsuverkinum og samstarvspartar í øðrum geirum, soleiðis at øll fáa hjálp eftir tørvi. Tað skal ikki vera sjúklingum til ampa, at hjálpin verður veitt av ymiskum myndugleikum og stovnum. Her skal nevnast, at kjarnin í Barnaverkætlanini júst er at virka fyri sameining av tænastum tvørtur um geirar.*

Serliga eitt øki, sum hevur verið í fokus hjá hoyringarpørtunum, er endurvenjing og endurmenning í breiðari merking. Arbeitt hevur verið við at betra tænastuna á hesum økjum seinastu árini. Hóast tað, er alsamt neyðugt at menna hendan týðandi partin av heilsuverkinum, og tí eigur hetta at vera eitt langtíðarmál.

[46] ***Endurvenjing:*** *Málrættað venjing, sum hevur til endamáls, at sjúklingurin heilt ella partvíst skal endurvinna mistan førleika. Hetta kann gera seg galdandi bæði við sjúku og skaða. Talan er bæði um likamligar, sálarligar og kognitivar førleikar, og harvið er tørvurin á endurvenjing ymiskur og fjøltáttaður.*

[47] ***Endurmenning:*** *Skal síggjast sum ein tilgongd og fevnir um meira enn endurvenjing. Sambært yvirlýsing hjá WHO skal endurmenning skiljast sum ein málrættað og tíðaravmarkað tilgongd av samskipaðum veitingum og tilboðum, sum hava til endamáls at geva borgaranum neyðug amboð at menna egið lív so sjálvstøðugt sum gjørligt og við so lítlari hjálp sum gjørligt. Endurvenjing kann vera liður í eini endurmenningartilgongd, men nýtist ikki at vera tað.*

Langtíðarmálini fram til 2035 eru hesi:

- Føroyar eru fyrimynd innan samanhang og góðar sjúklingagongdir
- Sama rætt til øll eftir tørvi
- Sjúklingar fáa samanhangandi sjúklingagongd tvørtur um markamót
- Endurvenjing og endurmenning eftir tørvi í øllum landinum

6.3 Átøk

Niðanfyri verður mælt til átøk, sum skulu fremjast komandi árini, fyri at tryggja borgarunum betri sjúklingagongdir.

Átøk í 2026:

24. **Fastir røktarheimslæknar:** Ov nógvar óneyðugar innleggingar av fólki frá røktarheimum er ein trupulleiki. Ein fastur røktarheimslækni, ið er knýttur at hvørjum røktarheimi, hevði tryggjað tætt, fakligt samstarv við starvsfólkini á røktarheimunum, og við hesum givið búfólkunum betri læknatænastu. Fastir røktarheimslæknar kunnu eisini fáa starvsfólkini at kenna seg tryggari og minka um tørvin at venda sær til læknavaktina, fyri at fáa búfólk innløgd. Hetta hevði eisini verið búfólkunum at gagni, av tí at ein óneyðug innlegging er til stóran ampa. Í løtuni verður arbeitt við at gera eina skipan við føstum røktarheimslæknum. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Heilsutrygd/kommunulæknar og Kommunufelagið.*

25. **Skjót boð aftan á ávísing:** Sjúklingar, ið verða vístir til sjúkrahúsini, fáa ikki altíð kvittan fyri ávísing og boð um, nær teir skulu koma til forkanning. Hetta kann fáa sjúklingin at ivast í, um ávísingin er móttikin, og nær hann/hon skal til kanning á sjúkrahúsinum. Ein støða sum kann elva til stúran og ótta. Krav eigur at verða sett um, at sjúkrahúsini innan fyri fáar dagar, senda kvittan til sjúklingin við boðum um, nær tíð er sett av til forkanning. Er sera long bíðitíð, kann sjúkrahúsið í fyrstu syftu upplýsa um metta bíðitíð og so venda aftur í góðari tíð við ítøkiligari tíð til forkanning, tá ið hendan er kend. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

26. **Betrað endurvenjing:** Fleiri viðmerkingar frá hoyringarfundunum snúgva seg um vantandi endurvenjing eftir viðgerð. Hetta hevur serliga við Sjúkrahúsverkið, eldraøkið og Almannaverkið at gera. Í *Álitinum um betri samskipan innan endurvenjing*[48] frá 2023, sæst at arbeitt hevur verið nógv við at betra hetta økið. Tíverri eru ikki allir trupulleikar loystir enn. Hoyringarpartarnir viðmerkja, at tað serliga er trupult at fáa samskipan millum partarnar á økinum at rigga. Hetta hevur við sær, at sjúklingar í nøkrum førum ikki fáa ta endurvenjing, teir eftir fakligari meting hava tørv á. Harafturat verður gjørt vart við, at endurvenjingarstøðið er ymiskt kring landið. Mælt verður til, at tilmælini í álitinum frá 2023 verða framd. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Kommunufelagið, Sjúkrahúsverkið og Almannaverkið.*

[48] ***Álit um betri samskipan innan endurvenjing,*** *Heilsumálaráðið, Almanna- og Mentamálaráðið og Kommunufelagið, 2023 https://landsstyri.cdn.fo/savn/ao2pi201/a-lit-samskipan-endurvenjing-endaligt.pdf?s=T8gn451F_tvY2qIrHufGelKT5zA*

27. **Loysa trupulleikan við liðugt viðgjørdum sjúklingum á sjúkrahúsunum:** Liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum bíða eftir tilboðum í primera geiranum, eru ein stórur trupulleiki (2.587 seingjadagar í 2024). Tað er á ongan hátt gagnligt fyri sjúklingin, at vera innlagdur longri enn neyðugt. Harafturat taka hesir sjúklingar pláss frá øðrum sjúklingum, sum tørva tey. Arbeitt verður við málinum. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið og Kommunufelagið.*

28. **Samanhangandi átøk á tannøkinum:** Samstarvið um barnatannrøkt og tannlæknatilboð til vaksin er vælvirkandi. Tó eru nakrir bólkar, sum ikki kunnu nýta vanligu skipanirnar, t.d. onkrir borgarar við rørslutarni, menningartarni ella sálarsjúk. Eisini kann talan vera um borgarar við serligum tørvi á tannviðgerð, t.d. borgarar við viðføddum tanntrupulleikum, borgarar sum hava fingið strálu- ella kemoviðgerð ella fólk við serligum sjúkum, sum ávirka tenninar. Neyðugt er at gera loysnir fyri hesar bólkar soleiðis, at eitt samanhangandi tilboð um tannviðgerð er til allar borgarar. Skotið verður upp at byrja við at nágreina tannrøktarveitingarnar í Sjúkrahúsverkinum, umframt stigvíst at kanna tørvin og finna loysnir, sum hóska seg til ávísar bólkar. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Heilsutrygd, Sjúkrahúsverkið, Kommunufelagið, Almannaverkið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Tannlæknafelagið og Tannrøktarafelagið.*

Átøk í 2027-28:

29. **Gjøgnumganga óskynsom markamót:** Fleiri hoyringarpartar – m.a. Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Almannaverkið - hava víst á óskynsom markamót millum heilsuverkið og ávikavist eldra-, almanna- og barnaøkið. Hetta snýr seg m.a. um hjálpartólaøkið og endurvenjing. Tí eigur ein gjøgnumgongd av markamótum at verða gjørd, sum grundarlag fyri einum uppskoti um einfalding. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Kommunufelagið*

30. **Sjúklingagongdir fyri fólk við varandi sjúkum:** Økta talið á eldri borgarum komandi árini, fer at økja talið á sjúklingum við varandi sjúkum, t.d. diabetes, hjartasjúkum og rørslulagssjúkum. Hetta merkir økta uppgávu í heilsuverkinum. Fólki við varandi sjúku tørva ofta hjálp úr fleiri pørtum av heilsuøkinum, serliga Sjúkrahúsverki, kommunulæknum og eldraøki. Tí er neyðugt við greiðum avtalum um, hvør ger hvat í sambandi við hesar sjúklingar. Hetta kann betrast við at gera lýsingar og fastar avtalur um innihald og ábyrgdarbýti í sjúklingagongdum. Tað er ein umfatandi uppgáva, og bæði lýsingar og íverksetan fara at taka tíð. Ein góður háttur at fara undir hetta, er at taka økini hvørt fyri seg og eitt í senn. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd/kommunulæknar og Kommunufelagið.*

31. **Ráðgeving til kommunulæknar:** Kommunulæknar hava ábyrgd av ymsum bólkum av sjúklingum og koma inn á allar sergreinar. Tí er neyðugt, at Sjúkrahúsverkið hjálpir teimum við at veita servitan, eitt nú við at serfrøðingar frá sjúkrahúsunum vegleiða kommunulæknunum í ítøkiligum málum. Hetta hendir í ávísan mun í dag, tá ið kommunulæknar ringja ella skriva til sjúkrahúslæknar. Neyðugt er við fastari skipan, har kommunulæknarnir kunnu senda spurningar og hava vissu fyri at fáa svar innan fyri t.d. tríggjar dagar. Soleiðis kunnu sjúkrahúsini vera við til at hjálpa kommunulæknunum og samstundis fyribyrgja, at sjúklingar óneyðuga verða vístir til sjúkrahúsini. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið og Heilsutrygd/kommunulæknar.*

32. **Útskrivingarfrágreiðing (epikrisa):** Ein annar háttur, har sjúkrahúsini hjálpa kommunulæknunum og samstundis eru við til

at tryggja góðar sjúklingagongdir, er at skriva ein stuttan samandrátt í journalina um, hvussu kommunulæknin skal fylgja upp upp á viðgerðina aftan á útskriving, ella tá ið ein ambulant tilgongd endar. Hetta verður gjørt í stóran mun í dag, men ikki altíð, og ofta við stórum seinkingum. Útskrivingarfrágreiðingin eigur at verða gjørd beinanvegin, tá sjúklingurin verður útskrivaður, ella tilgongdin endar - og í seinasta lagi innan fyri tríggjar dagar. Soleiðis kann tryggjast, at kommunulæknin fylgir upp, tá ið sjúklingurin fer av sjúkrahúsinum. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið og Heilsutrygd/kommunulæknar.*

33. **Praksiskonsulentskipan:** Tørvur er á tættari samskipan millum sjúkrahús og kommunulæknar. Tí verður skotið upp at seta eina praksiskonsulentskipan á stovn. Ein praksiskonsulentur er ein kommunulækni, sum er settur nakrar tímar um vikuna, til at vera sambindingarlið millum Sjúkrahúsverkið og kommunulæknarnar. T.d. kundi ein praksiskonsulentur verið knýttur at hvørjum størri fakøki á sjúkrahúsunum, eitt nú innan medisinska økið, skurðøkið og psykiatri. Uppgávan er m.a. at gera avtalur um kliniska samstarvið við sjúkrahúsini og miðla boð og vitan víðari til hinar kommunulæknarnar. Ein avtala um praksiskonsulentskipan skal gerast. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Heilsutrygd/kommunulæknar.*

34. **Sjúklingasamskipari:** Í Krabbameinsætlanini verður m.a. mælt til, at sjúklingasamskipanin verður styrkt við sjúklingasamskiparum, sum fáa ábyrgd av at skipa samanhang tvørtur um geirar og sergreinar – eisini viðgerðarstovnar uttanlands. Eisini skal sjúklingurin hava ein navnfestan persón, sum hann ella hon kann seta seg í samband við, tá ið spurningar um sjúklingagongdina stinga seg upp. Í dag eru tveir sjúklingaleiðbeinarar settir í Sjúkrahúsverkinum, sum í stóran mun hava fingið omanfyrinevndu uppgávur. Skipanin við sjúklingaleiðbeinarunum eigur at verða eftirmett, við atliti at fáa styrkt skipanina enn meira. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd/kommunulæknar og Kommunufelagið.*

35. **Menna palliativa økið:** Síðan 2005 er palliativa økið stigvíst ment. Palliativ toymi og palliativ tænasta eru sett í verk, bæði á sjúkrahúsunum, hjá kommunulæknunum og kommununum. Í 2019 varð eitt álit um víðari menning av palliativa økinum gjørt, har mælt varð til at skipa økið sum sergrein, at gera palliativa deild á Landssjúkrahúsinum og at styrkja primera heilsugeiran, við at heilsustarvsfólk hava grundleggjandi vitan innan palliatión. Hesi tilmæli eiga at verða fylgd, tá ið palliativa økið verður ment. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið, Kommunufelagið o.o.*

2026 Átøk	2027-28 Átøk	2029-35 Átøk	Langtíðarmál 2035
24. Fastir røktarheims-læknar	29. Gjøgnumganga óskynsom markamót	Arbeiðið at seta átøk um samanhangandi sjúklingagongdir heldur fram	Føroyar eru fyrimynd innan samanhang og góðar sjúklingagongdir
25. Skjót boð aftan á ávísing	30. Sjúklingagongdir fyri fólk við varandi sjúkum		Sama rætt til øll eftir tørvi
26. Betrað endurvenjing	31. Ráðgeving til kommunulæknar		Sjúklingar fáa saman-hangandi sjúklingagongd tvørtur um markamót
27. Loysa trupulleikan við liðugt við-gjørdum sjúklingum á sjúkrahúsunum	32. Útskrivingar-frágreiðing		Endurvenjing og endurmenning eftir tørvi í øllum landinum
28. Samanhangandi átøk á tannøkinum	33. Praksiskonsulent-skipan		
	34. Sjúklingasamskipari		
	35. Menna palliativa økið		

Talva 6.1 Samanhangandi sjúklingagongdir – langtíðarmál og átøk fyri styttri tíðarskeið

7. Sjúkrahúsverkið

Í parti 2 sást, at nógvar viðmerkingar frá hoyringarfundunum snúðu seg um Sjúkrahúsverkið og um, hvussu sjúkrahúsini veita sjúklingunum bestu viðgerðina. Viðmerkingar hava verið um, at tørvur er á at sameina sjúkrahúsini og stytta bíðilistarnar. Harafturat hevur dentur verið lagdur á fakliga menning, meira gransking, og tikið hevur verið undir við, at Sjúkrahúsverkið skal mennast til eitt universitetssjúkrahús.

Afturat omanfyrinevndu íkastunum til heilsupolitikkin, hava fundir eisini verið við alla sjúkrahúsleiðsluna. Fundirnir hava havt støði í núverandi strategi fyri Sjúkrahúsverkið fyri 2021 – 25, eisini í arbeiðinum við at orða langtíðarmál og átøk til heilsupolitikkin næstu tíðina.

Við støði í hesum hevur ein samlað sjúkrahúsleiðsla gjørt eitt felags uppskot. Partvís inniheldur uppskotið langtíðarmál og partvís átøk fyri styttri tíðarskeið. Átøkini fyri styttri tíðarskeið er eitt samlað uppskot, har atlit verða tikin at, at øll trý sjúkrahúsini skulu mennast, men eisini mugu øll sjúkrahúsini góðtaka broytingar, fyri at taka atlit at sameinda Sjúkrahúsverkinum. Tí skal uppskotið setast í verk parallelt á øllum trimum sjúkrahúsunum í tíðarskeiðnum 2026-2028. Undirstrikað verður, at talan er um eitt yvirskipað uppskot, sum skal gerast meira ítøkiligt, áðrenn tað kann setast í verk.

	Síða
• 7.1 Langtíðarmál fyri Sjúkrahúsverkið	**44**
• 7.2 Átøk fyri styttri tíðarskeið í Sjúkrahúsverkinum 2026-2028	**45**
• 7.3 Tættari felags planlegging	**46**
• 7.4 Tættari samstarv um starvsfólk millum sjúkrahúsini	**46**
• 7.5 Víðka planlagda virksemið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi.	**47**
• 7.6 Faklig menning, gransking og universitetssjúkrahús	**48**
• 7.7 Brúka tilfeingið betur og stytta bíðilistar	**48**
• 7.8 Hvussu skulu sjúkrahúsini mennast	**49**
• 7.9 Tilbúgving á sjúkrahúsunum 2026-28	**50**
• 7.10 Psykiatri og sálarlig heilsa	**56**

7.1 Langtíðarmál fyri Sjúkrahúsverkið

Tað mest týðandi langtíðarmálið er, at øll trý sjúkrahúsini skulu sameinast. Okkara Sjúkrahúsverk er lítið, og nógvar smáar og viðkvæmar funktiónir eru á sjúkrahúsunum - serliga á teimum báðum smáu sjúkrahúsunum. Avgerandi er tí at arbeiða tætt saman í øllum viðurskiftum, fyri at standa sterkari. Við at standa saman verður tryggjað, at vit í 2035 hava eitt sameint Sjúkrahúsverk við trimum sjúkrahúsum í menning.

Tað mest týðandi økið, har sjúkrahúsini skulu arbeiða tætt saman, er starvsfólkaøkið. Sjúkrahúsverkið hevur nógvar serligar funktiónir, sum ikki kunnu verða nøktandi í trimum støðum. Tí er avgerandi, at fakligu førleikarnir innan nógvar fakbólkar kunnu gagnnýtast smidligari, uppá tvørs av sjúkrahúsunum. Hetta er serliga týðandi á teimum mest spesialiseraðu økjunum, ikki minst innan læknaøkið. Ein fortreyt fyri at tryggja nøktandi og skikkaða læknamanning á teimum trimum sjúkrahúsunum er sostatt, at arbeitt verður fram ímóti, at Sjúkrahúsverkið í framtíðini hevur eina samlaða læknamanning.

Ein fortreyt fyri, at vit hava trý sjúkrahús í menning í 2035, er eisini, at talið á serlæknum í Sjúkrahúsverkinum veksur munandi. Sjúkrahúsverkið er alt ov bundið av útlendskum konsulentum og vikarum. Serlæknatørvurin tálmar fakligu menningini, avmarkar gransking og darvar ætlanini um at menna Sjúkrahúsverkið til at vera eitt universitetssjúkrahús. Serlæknatørvurin hevur harafturat fløskuhálsar við sær, sum elva til bíðilistar.

Í 2024 varð ein dimensioneringsætlan gjørd á serlæknaøkinum. Tað er avgerandi, at hendan ætlan verður sett í verk fram móti 2035. Við hesari ætlan fæst eitt Sjúkrahúsverk, ið er nógv minni bundið av kostnaðarmiklum, útlendskum konsulentum. Fleiri serlæknar fara harafturat at betra um møguleikan fyri sterkari fakligari menning, meira gransking, heimtøku av viðgerðum úr útlandinum og realisering av ætlanini um at gera Sjúkrahúsverkið til eitt universitetssjúkrahús, har partar av læknaútbúgvingini kunnu takast.

Sum tað seinasta er visjónin um, at Sjúkrahúsverkið skal miða eftir at verða meira effektivt. Hetta arbeiðið snýr seg um at fylgja altjóða ráki og menning í sambandi við at leggja um til meira effektivar viðgerðir, sum t.d. dagskurð og ambulantar viðgerðir, heldur enn innleggingar. Arbeiðið snýr seg eisini um at leggja betri til rættis í klinikkini, betri arbeiðs- og mannagongdir og samskipa og beina burtur svinn soleiðis, at planlagda virksemið økist frá ári til ár.

Langtíðarmálið er, at gjørligt verður at seta í verk eina viðgerðartrygd, so sjúklingarnir verða greiðir yvir, hvussu long bíðitíðin í mesta lagi er. Ein tílík útgreiningar- og viðgerðartrygd eigur at hava ymiskar hægstu bíðitíðir, sum eru grundaðar á fakligar fortreytir.

Langtíðarmálini fram til 2035 eru hesi:

Eitt burðardygt sjúkrahúsverk:

- Eitt sameint sjúkrahúsverk við trimum sjúkrahúsum í menning
- Eitt sameint sjúkrahúsverk, har fakligir førleikar í nógvum fakbólkum kunnu nýtast fleksibult millum sjúkrahúsini
- Ein felags læknamanning
- Dimensioneringsætlanin á serlæknaøkinum er framd (munandi fleiri serlæknar)
- Eitt sjúkrahúsverk, sum í nógv minni mun er bundið av útlendskum lækna-konsulentum (avgerandi at stýringin av sergreinum liggur í Føroyum).

Eitt sjúkrahúsverk, sum mennist fakliga:

- Miðvís faklig menning soleiðis, at viðgerðir í útlondum verða ein minkandi partur av útreiðslunum
- Gransking verður 2% av rakstrarútreiðslunum
- Sjúkrahúsverkið er eitt etablerað universitets-sjúkrahús
- Partar av læknaútbúgvingini kunnu takast í Føroyum.

Eitt effektivt sjúkrahúsverk:

- Leggja um til dagskurð, ambulanta viðgerð og viðgerð í heiminum
- Tað planlagda virksemið veksur á hvørjum ári (umleggja sjúklingagongdir, betri planlegging og beina burtur svinn)
- Viðgerðartrygd (differentierað).

7.2 Átøk fyri styttri tíðarskeið í Sjúkrahúsverkinum 2026-2028

Á hoyringarfundunum og fundum við alla sjúkrahúsleiðsluna hevur sum áður nevnt verið umrøtt, hvørji átøk eiga at gerast fyri styttri tíðarskeið, fyri at taka fyrstu stigini fram móti at røkka langtíðarmálunum. Áherðsla verður løgd á, at hetta bert eru fyrstu stigini til at røkka langtíðarmálunum. Um langtíðarmálini skulu røkkast, er neyðugt at seta uppaftur fleiri átøk í verk komandi árini.

Átøkini fyri styttri tíðarskeið eru:

- ***Tættari felags planlegging***
- ***Tættari samstarv um starvsfólk millum sjúkrahúsini***
- ***Víðka planlagda virksemið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi. Planlagt virksemi er (mótsett akuttum virksemi) ambulatorium, dagskurð ella planlagdar skurðviðgerðir, sum krevja innlegging***
- ***Faklig menning, gransking og universitetssjúkrahús***
- ***Brúka tilfeingið betur og stytta bíðilistar***
- ***Yvirskipað mál fyri menning og profilar fyri hvørt av teimum trimum sjúkrahúsunum.***

Átøk fyri styttri tíðarskeið eru nærri lýst niðanfyri.

7.3 Tættari felags planlegging

Sum nú er, verður virksemið á teimum trimum sjúkrahúsunum í stóran mun planlagt á hvørjum sjúkrahúsi sær. Tað fer ov lítil felags planlegging fram og eisini er samskipanin av virkseminum á sjúkrahúsunum ov lítil í sambandi við t.d. skurðviðgerðarætlanir, ambulatoriivirksemi ella kapasitetsplanlegging á seingjardeildunum.

Út frá hesum verður mælt til trý átøk, sum verða nevnd niðanfyri:

Átøk:

36. **Virksemisætlan:** Sjúkrahúsini gera hvørt heyst eina felags virksemisætlan, fyri tað komandi árið. Her skal avtalast, hvussu tey í felag best loysa samlaðu sjúkrahúsuppgávuna, undir hesum at fáa bíðitíðirnar niður. Talan er t.d. um at samskipa skurð- og ambulatoriivirksemið. Um nýggjar tænastur verða settar í verk á sjúkrahúsunum, skal hetta eisini vera partur av einari felagsætlan. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

37. **Felags visitatión.** Ein felags visitatión skal vera til sjúkrahúsini. Hetta er eitt gamalt mál, sum arbeitt hevur verið við gjøgnum fleiri ár. Í løtuni er felags visitatión í urologi og ortopædkirurgi. Afturat hesum manglar serliga felags visitatión innan parenkymkirurgi og endoskopi. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

38. **Kapasitetskonferensa:** Ein daglig, stutt og tvørgangandi kapasitetskonferensa skal setast í verk, har allar seingjadeildir luttaka fysiskt ella á netinum. Endamálið er at gera avtalur um, hvussu allar seingjadeildir og sjúkrahús tvørgangandi kunnu hjálpa hvørjum øðrum, soleiðis at samlaði seingjakapasiteturin verður gagnnýttur so væl sum gjørligt. Fundirnir eru serliga týdningarmiklir, tá ið talið á sjúklingum á deildunum er ov høgt. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

7.4 Tættari samstarv um starvsfólk millum sjúkrahúsini

Í partinum um langtíðarmál sást, at neyðugt er at arbeiða fram móti at gagnnýta førleikarnar hjá fleiri fakbólkum smidliga og tvørgangandi millum sjúkrahúsini. Hetta er serliga týdningarmikið á læknaøkinum. Her er neyðugt at hava eina felags læknamanning á øllum sjúkrahúsum. Hetta kemst av spesialiseringini og fyri at tryggja fakliga menning og góðsku. Læknaarbeiðið í dag er ikki longur einstaklingaarbeiði, men heldur eitt toymisarbeiði, har toymið er ein fakligur felagsskapur, sum tryggjar góðsku og fakliga menning.

Átøk:

39. **Gera felagsstørv millum sjúkrahúsini:** Stigvíst skulu skipast fleiri útitænastur og setanir í felagsstørv, har setanin hevur við sær, at læknin t.d. arbeiðir bæði á Landssjúkrahúsinum og Klaksvíkar Sjúkrahúsi ella Suðuroyar Sjúkrahúsi (felags lýsingar, felags setanarbólkar og felags starvs-/funktiónslýsingar eru ein fortreyt fyri tílíkum felagsstørvum). *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

40. **Útitænasta er ein møguleiki í øllum viðkomandi sáttmálum:** Í løtuni eru bert reglur um útitænastu í sáttmálanum hjá læknunum. Men møguleiki fyri útitænastu eigur at vera galdandi fyri allar fakbólkar soleiðis, at fakligu førleikarnir kunnu gagnnýtast smidliga á øllum sjúkrahúsunum. Á hendan hátt fara vit stigvíst at fáa ein fakligan felagsskap tvørtur um og millum sjúkrahúsini. *Ábyrgd/partar: Fíggjarmálaráðið.*

7.5 Víðka planlagda virksemið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi

Ongin ivi er um, at framtíðin fyri Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús er at menna tær planløgdu funktiónirnar. Orsøkin er, at júst á teimum planløgdu økjunum er vantandi kapasitetur og bíðilistar. Tað er eisini á planløgdu økjunum, at tørvurin á viðgerðum væntandi fer at økjast í framtíðini. Harafturat er planlagt virksemi best egnað til smærri sjúkrahús, av tí at her aloftast ikki er krav um tilbúgving. Omanfyri varð nevnt, at funktiónirnar á smærru sjúkrahúsunum ofta eru smáar og viðkvæmar, og tí snýr hetta seg eisini um at tryggja burðardygd við at leggja nýggjar uppgávur til Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús.

Mælt verður til hesi átøk:

Atøk:

41. **Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús fáa eina serliga uppgávu í sambandi við at stytta bíðilistarnar:** Í 2024 varð fígging sett av á fíggjarlógini til at fáa bíðitíðirnar niður. Játtanin varð brúkt til at fáa heilt nógvar sjúklingar av bíðilistunum. Hóast fleiri møguleikar eru fyri at stytta bíðilistarnar innanfyri verandi karm, verður eisini neyðugt við eyka fígging á nøkrum økjum. Tí eigur ein árlig játtan at verða givin, sum kann nýtast fleksibult á teimum økjum, har tørvurin er størstur. Hetta eyka virksemi eigur í so stóran mun sum gjørligt, at leggjast á Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús (á teimum økjum, har hetta er møguligt og viðkomandi. Talan kann vera um skurðviðgerðir, skopiir og ambulantar viðtalur). Sjúkrahúsini skulu í felag raðfesta, hvørjar viðgerðir skulu gerast, og raðfestingin skal góðkennast av landsstýrisfólkinum. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið.*

42. **Miðspjadd (decentraliserað) ambulatorium:** Fremjanin av dimensioneringsætlanini fyri serlæknar fer at hava við sær, at talið á serlæknum økist. Hetta eigur at koma øllum Føroyum at gagni. Skotið verður upp, at miðspjadd ambulatorium verða sett á stovn á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi í samstarvi við Landssjúkrahúsið, so hvørt sum fleiri serlæknar verða settir. Miðspjadd ambulatorium merkir, at eitt ambulatorium, ið hevur heima á Landssjúkrahúsinum, hevur viðtaludagar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi. Hetta kann gerast innan fleiri sergreinar, t.d. hjartamedisin, lungamedisin, diabetes, gynekologi/obstetrik og húðsjúkur. Tað eigur eisini at umhugsast, um miðspjadd ambulatorium á sama hátt kunnu gerast á Landssjúkrahúsinum í samstarvi við Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

43. **Plastikkkirurgiska funktiónin á Suðuroyar Sjúkrahúsi skal útbyggjast:** Tann plastikkkirurgiska landsfunktiónin á Suðuroyar Sjúkrahúsi hevur verið afturlatin vegna serlæknatørv. Men nú er ein samstarvsavtala gjørd við Ríkissjúkrahúsið. Stórur tørvur er á hesari funktiónini, og hon er tí neyðug at hava. Tí skal hon útbyggjast. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

44. **Aðrar funktiónir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi komandi árini:** Sum áður nevnt eru hetta bert tey fyrstu stigini. Tí er neyðugt í komandi árum at gera ætlanir um fleiri planlagdar funktiónir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi, fyri at tryggja burðardygg sjúkrahús. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

7.6 Faklig menning, gransking og universitetssjúkrahús

Á hoyringarfundunum var gjøgnumgangandi undirtøka fyri, at arbeiðast skal miðvíst við fakligari menning og meira gransking, har fleiri fakbólkar eru uppií, umframt at undirtøka var fyri, at ætlanin um universitetssjúkrahús og læknaútbúgving verður gjøgnumført. Útbyggingin av granskingarøkinum skal fevna um alt heilsuverkið, herundir eisini primera geiran og fyribyrging.

Harafturat var undirtøka fyri dimensioneringsætlanini, sum fer at økja talið av serlæknum. Hetta verður mett at vera ein fortreyt fyri, at ætlanirnar kunnu setast í verk. Íverksetan av dimensioneringsætlanini fer eisini at hava við sær, at Sjúkrahúsverkið í nógv minni mun er bundið av útlendskum konsulentum, og eitt miðvíst arbeiði við menning av nýggjum viðgerðarøkjum og heimtøku av sjúklingum í viðgerð uttanlands verður møguligt.

Eitt annað uppskot frá hoyringarfundunum er, at ein menningarætlan skal gerast fyri hvørja sergrein.

Átøk:

45. **Fremja ætlan um universitetssjúkrahús, undir hesum munandi meira gransking:** Ætlanin um universitetssjúkrahús verður framd. Granskingarøkið skal útbyggjast og skal fevna um fleiri fakbólkar - undir hesum eisini primera geiran og fyribyrging. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið.*

46. **Gera ætlan um læknaútbúgving:** (verður nærri lýst í átaki 66). *Ábyrgd/partar: Fróðskaparsetrið og Sjúkrahúsverkið.*

47. **Seta fleiri serlæknar (dimensioneringsætlan):** Dimensioneringsætlan verður roknað sum ein fortreyt fyri, at ætlanirnar kunnu setast í verk. Hon fer eisini at hava við sær, at Sjúkrahúsverkið í nógv minni mun verður bundið av útlendskum konsulentum, og fer at gera tað møguligt at menna nýggj viðgerðarøki og taka viðgerðir heim, sum sjúklingar í dag fáa uttanlands. Tað er eisini neyðugt at seta fleiri serlæknar fyri at minka um bíðilistarnar. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið.*

48. **Menningarætlanir fyri hvørt sergreinaøki:** Menningarætlan skal gerast fyri hvørja sergrein. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

7.7 Brúka tilfeingið betur og stytta bíðilistar

Í spurnakanningini siga borgararnir, at størsti trupulleikin í heilsuverkinum eru bíðilistarnir. Nógvar orsøkir kunnu vera til bíðilistar. Men ein orsøk er, at tað í yvirskipaðu stýringini av Sjúkrahúsverkinum ikki verður lagdur dent á, hvat Sjúkrahúsverkið veitir viðvíkjandi virksemi, góðsku og tænastu. Dentur verður einans lagdur á, hvussu nógvur peningur verður játtaður til Sjúkrahúsverkið, og at fíggjarætlanirnar verða hildnar.

Átøk:

49. **Krav um, at Sjúkrahúsverkið árliga økir planlagda virksemið:** Krøv eiga at vera sett um, at Sjúkrahúsverkið økir planlagda virksemið á hvørjum ári gjøgnum broyttar arbeiðsgongdir, umlegging frá innleggingum til ambulantar viðgerðir, betri planlegging í klinikkini og burturbeining av svinni. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið.*

50. **Miðvíst arbeiða fyri at leggja um frá innlegging til dagskurð, ambulanta viðgerð og subakutta viðgerð:** Sjúkrahúsverkið skal miða eftir at verða meira effektivt og fylgja altjóða ráki og menning, í sambandi við at leggja um til meira effektivar viðgerðir, sum t.d. dagskurð og ambulantar

viðgerðir, heldur enn innleggingar. Arbeiðið snýr seg eisini um at leggja betri til rættis í klinikkini, betri arbeiðs- og mannagongdir og at samskipa og beina burtur svinn soleiðis, at planlagda virksemið økist sum frálíður. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

51. **Árlig pulja til at minka bíðilistar:** Á nøkrum økjum eru kapasitetstrupulleikarnir so umfatandi, at tørvur er á serligum átøkum. Tí eigur ein føst játtan ella pulja at vera, sum skal nýtast fleksibult á teimum ymisku økjunum, har tørvurin er størstur, eins og gjørt varð í 2024 (sum skotið upp í átaki 41). Harafturat eigur puljan í størst møguligan mun at vera til Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús soleiðis, at hesi bæði sjúkrahúsini fáa ein serligan leiklut at minka um bíðilistarnar (á teimum økjum, har hetta er møguligt og viðkomandi). Málið er, at bíðilistarnir minka soleiðis, at gjørligt verður at seta eina útgreiningar- og viðgerðartrygd við ymiskum hægstu bíðitíðum, sum eru grundaðar á fakligar fortreytir. Hetta skal vera galdandi fyri bæði somatiska og psykiatriska økið. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið.*

52. **Bíðitíðir fyri allar viðgerðir verða almannakunngjørdar:** Fyri at geva sjúklingum góða kunning um bíðitíðir, skal eitt dagført yvirlit yvir bíðitíðir til forkanningar og viðgerð fyri øll viðgerðarsløg almannakunngerast. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

7.8 Hvussu skulu sjúkrahúsini mennast

Tørvur er á einari politiskari støðutakan til, hvørjar væntanir eru til tey trý sjúkrahúsini. Tað er neyðugt, at øll trý sjúkrahúsini fáa týðilig og gjøgnumskygd mál fyri, hvussu tey skulu mennast. Í løtuni er ógreitt, hvørjar væntanir eru til leiklutin hjá teimum trimum sjúkrahúsunum, og tað ger tað trupult hjá teimum at seta eina menningarkós, og tað ger eisini samstarvið millum sjúkrahúsini trupult.

Við støði í øllum tilfarinum, sum er fingið til vega í sambandi við heilsupolitikkin, og við støði í umrøðu í sjúkrahúsleiðsluni, verður mælt til hesi menningarmál og profilar fyri tey trý sjúkrahúsini:

Landssjúkrahúsið: Landssjúkrahúsið er í dag akutt-sjúkrahús fyri alt landið og hevur harafturat stórt planlagt virksemi í næstan øllum sergreinum.

Harafturat eru menningarmálini hjá Landssjúkra-húsinum at hava høvuðsábyrgd fyri fakligari menning í Sjúkrahúsverkinum, undir hesum fyri heimtøku av viðgerðum, meira gransking, einari vaksandi uppgávu við víðariútbúgving av yngri læknum, fremjan av ætlanini um universitetsjúkrahús og av komandi læknaútbúgving í samstarvi við Fróðskaparsetrið. Samstundis skal Landssjúkrahúsið økja planlagda virksemið í fleiri sergreinum, so hvørt sum talið á serlæknum veksur og vera við í arbeiðinum at stytta bíðilistarnar.

Suðuroyar Sjúkrahús: Í løtuni er Suðuroyar Sjúkrahús eitt økissjúkrahús við akuttum og planløgdum funktiónum. Afturat hesum hevur sjúkrahúsið nakrar funktiónir, sum fevna um alt landið.

Menningarmálið fyri sjúkrahúsið er at brúka tíðina, til tunnilin væntandi letur upp, til at økja planlagda virksemið munandi, soleiðis at sjúkrahúsið er til reiðar til eina framtíð við føstum sambandi, har tørvurin á akuttum virksemi verður nógv minni.

Sostatt skal sjúkrahúsið arbeiða fram móti, at høvuðs-uppgávan verður planlagdar funktiónir fyri nærøkið og fyri alt landið. Harafturat fær sjúkrahúsið nýggjar uppgávur í sambandi við at stytta bíðilistar, miðspjadd ambulatorium og víðkan av plastikkkirurgiskari funktión. Afturat hesum verður neyðugt, tey komandi árini, at gera ætlan um enn fleiri planlagdar funktiónir á Suðuroyar Sjúkrahúsi, fyri at tryggja eitt burðardygt sjúkrahús.

Klaksvíkar Sjúkrahús: Í løtuni er Klaksvíkar Sjúkrahús eitt sjúkrahús við planløgdum funktiónum, sum bæði fevna um nærøkið og alt landið. Eisini hevur sjúkrahúsið í dag eina avmarkaða akuttfunktión.

Menningarmálið fyri sjúkrahúsið er harafturat at útbyggja planlagda virksemið munandi. Sostatt skal sjúkrahúsið arbeiða fram móti, at høvuðsuppgávan verður planlagdar funktiónir fyri nærøkið og alt landið. Lagt verður upp til, at seingjadeildin heldur fram sum nú, við innløgdum sjúklingum eftir planlagda skurðviðgerð, planlagdir endurvenjingarsjúklingar (landsfunktión í neurorehabilitering) og medisinskir sjúklingar. Mælt verður til broyting í visitasiónini viðvíkjandi medisinskum sjúklingum, orsakað av sjúklingatrygdini.

Í løtuni verður bróðurparturin av medisinskum sjúklingum ikki innlagdir beinleiðis á Klaksvíkar Sjúkrahús, men á Landssjúkrahúsið. Aftan á, at teir eru útgreinaðir og settir í viðgerð á Landssjúkrahúsinum, verða sjúklingarnir fluttir til eftirviðgerð á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Við atliti at sjúklingatrygdini verður skotið upp, at hetta verður víðkað til at vera galdandi fyri allar medisinskar sjúklingar. Grundgevingin er, at tilbúgvingin á Landssjúkrahúsinum er størri, og at har er ein intensiv deild. Undantakið frá hesum eru sjúklingar við opnari innlegging (t.d. terminalir sjúklingar), sum eru heima á orlov. Um neyðugt er við endurinnlegging kann hetta fara fram beinleiðis á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Eisini fær sjúkrahúsið nýggjar uppgávur í sambandi við at minka um bíðilistarnar og við miðspjaddum ambulatorium. Afturat hesum verður neyðugt tey komandi árini at gera ætlan um uppaftur fleiri planlagdar funktiónir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, fyri at tryggja eitt burðardygt sjúkrahús.

Talva 7.1 sýnir eitt samlað uppskot til langtíðarmál og átøk fyri styttri tíðarskeið fyri Sjúkrahúsverkið. Í talvu 7.2 er ein gjølligari greining av menningarmálum og profilum fyri tey trý sjúkrahúsini.

Átøk:

53. **Menningarmál og profilar fyri tey trý sjúkrahúsini:** Sum lýst omanfyri og í talvu 7.2. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

54. **Broytt visitatión av medisinskum sjúklingum til KS**: Sum lýst omanfyri. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

7.9 Tilbúgving á sjúkrahúsunum 2026-28

Tilbúgvingarnar á sjúkrahúsunum hava næstan verið óbroyttar í nógv ár. Niðanfyri eru uppskot til tillaging av tilbúgvingunum, við støði í fakligu menningini og teimum broytingunum, sum eru hendar seinnu árini:

Landssjúkrahúsið: Læknaliga tilbúgvingin á Landssjúkrahúsinum hevur for- og millumvakt av yngri læknum innan medisin, kirurgi og psykiatri. Bert forvaktirnar eru vaktir á staðnum. Millumvaktin er tilkall. Tá ið talan er um bakvaktir, eru serlæknavaktir innan medisin, kardiologi, kirurgi, ortopedkirurgi, gyn/obs, pædiatri, anæstesiologi, radiologi og psykiatri í tilkall. Í løtuni er serlæknamanningin á sjúkrahúsinum ikki nóg stór til, at tað er gjørligt at hava vakt á staðnum á einum ella fleiri økjum. Fyri at styrkja akuttu tilbúgvingina, skal ein ætlan gerast fyri, at millumvaktir eru á staðnum. Hetta hevði eisini verið ein dyggur stuðul fyri forvaktirnar.

Suðuroyar Sjúkrahús: Læknaliga tilbúgvingin á Suðuroyar Sjúkrahúsi er ein forvakt í tilkall. Forvaktin er antin ein royndur, yngri lækni ella ein serlækni. Harafturat er ein serlækni í anæstesiologi og ein kirurgiskur serlækni í tilkall. Kirurgiska bakvaktin skiftir millum urologi, kirurgi og ortopædkirurgi. Eisini er ein medisinsk bakvakt. Medisinska bakvaktin hevur í fleiri ár virkað soleiðis, at tilkall bert hevur verið møguligt 2-3 dagar um vikuna. Restina av tíðini hevur medisinska bakvaktin verið ein telefonisk bakvakt. Tilbúgvingin á staðnum hevur soleiðis verið grundað á hinar læknarnar í tilkalli: Læknalig forvakt (royndur

yngri lækni ella serlækni), serlækni í anæstesiologi og kirurgiskur serlækni. Í løtuni koyrir ein royndarskipan, har ein akuttmedisinari er settur.

Flutningsviðurskiftini hava við sær, at enn er neyðugt við læknaligari tilbúgving á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Tí verður bert mælt til eina minni broyting. Sum nevnt hevur medisinska bakvaktin gjøgnum fleiri ár, meginpartin av tíðini, verið ein telefonisk bakvakt, og læknaliga tilbúgvingin á staðnum, hevur verið grundað á hinar læknaligu førleikarnar á sjúkrahúsinum. Tí verður skotið upp, at medisinska bakvaktin verður niðurløgd, og at sjúkrahúsið í staðin kann ringja til internmedisinsku ella kardiologisku bakvaktina á Landssjúkrahúsinum.

Afturat hesum skal viðmerkjast, at tað bert er sera fáar ferðir um árið, at akuttar skurðviðgerðir verða gjørdar á sjúkrahúsinum. Royndirnar at skurðviðgera akutt eru tí avmarkaðar. Akuttar skurðviðgerðir skulu tískil vera avmarkaðar til støður, har als ongir aðrir møguleikar eru. Eisini skulu klinisk audit[49] javnan gerast.

Klaksvíkar Sjúkrahús: Læknaliga tilbúgvingin er ein forvakt, sum kann vera ein royndur yngri lækni/sjúkrahúslækni ella ein serlækni. Forvaktin hevur ábyrgd av seingjadeildini og skaðaklinikkini. Forvaktin kann fáa telefoniska vegleiðing frá bakvaktum á Landssjúkrahúsinum. Møguleiki er fyri skjótum sjúkraflutningi til Landssjúkrahúsið um neyðugt. Harafturat er ein kirurgisk serlæknavakt. Ongar akuttar skurðviðgerðir verða gjørdar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og heldur eingir akutt innlagdir skurðsjúklingar eru á sjúkrahúsinum. Tí verður skotið upp, at hendan vaktin verður niðurløgd.

Heintiskipan: Bæði Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús hava tveir anestesisjúkrarøktarfrøðingar í tilkallivakt alt samdøgrið. Vakt nummar tvey er serliga orsakað av støðum, har sjúklingar verða fluttir til Landssjúkrahúsið, og tá ið tørvur er á, at ein anestesisjúkrarøktarfrøðingur fylgir við. Eitt fyrireikingararbeiði eigur at vera gjørt við tí fyri eygað at seta í verk eina heintiskipan í staðin, har starvsfólk frá Landssjúkrahúsinum fara eftir sjúklinginum. Tá ið ætlanirnar verða gjørdar, skulu atlit takast fyri, at viðurskiftini at flyta sjúklingar til Landssjúkrahúsið eru ymisk, fyri ávikavist Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús.

Sjúkrahúsverkið hevur stóran tørv á at økja skurðkapasitetin, fyri at minka um bíðilistarnar. Tí eigur starvsfólkatilfeingið at verða gagnnýtt so væl sum gjørligt.

Viðmerkjast skal, at sparingar í sambandi við broyting av tilbúgvingini fara óskerdar til tað sjúkrahúsið, har tær verða framdar. Sjúkrahúsið kann so brúka fíggingina til at økja virksemið og minka um bíðilistarnar.

Átøk:

55. **Broytingar í tilbúgvingunum:** Broytingar skulu gerast í tilbúgvingunum á teimum trimum sjúkrahúsunum, sambært uppskoti undir punkt *7.9 Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

56. **Uppskot til heintiskipan:** Ein skipan eigur at verða fyrireikað, har starvsfólk frá Landssjúkrahúsinum fara eftir sjúklingum, sum hava tørv á at verða fluttir frá Klaksvíkar Sjúkraúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi til Landssjúkrahúsið. Skipanin skal taka atlit fyri, at viðurskiftini at flyta sjúklingar til Landssjúkrdahúsið eru ymisk fyri ávikavist Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

[49] *Klinisk audit er ein háttur at menna góðsku*

2026 - 2027 Ítøkilig átøk	Langtíðarmál 2035
36. Virksemisætlan	Eitt sameint sjúkrahúsverk við trimum sjúkrahúsum í menning
37. Felags visitatión	Eitt sameint sjúkrahúsverk, har fakligir førleikar í nógvum fakbólkum kunnu nýtast fleksibult millum sjúkrahúsini
38. Kapasitetskonferensa	Ein felags læknamanning
39. Felags støv millum sjúkrahúsini	Dimensioneringaætlanin á serlæknaøkinum er gjøgnumførd (munandi fleiri serlæknar)
40. Útitænasta er ein møguleiki í øllum viðkomandi sáttmálum	Eitt sjúkrahúsverk sum í nógv minni mun er bundið av útlendskum læknakonsulentum
41. KS og SSH fáa eina serliga uppgávu í sambandi við at stytta bíðilistarnar	Miðvís faklig menning soleiðis at viðgerðir uttanlands verða ein minkandi partur av útreiðslunum
42. Miðspjadd ambulatorium á KS og SSH	Gransking verður 2% av rakstrarútreiðslunum
43. Plastikkkirurgiska funktiónin á SSH skal útbyggjast	Sjúkrahúsverkið er eitt etablerað universitetssjúkrahús
44. Aðrar funktiónir á KS og SSH komandi árini	Partar av læknaútbúgvingini kunnu takast í Føroyum
45. Fremja ætlan um universitetssjúkrahús, undir hesum munandi meira gransking	Umlegging til dagskurð, ambulanta viðgerð og viðgerð í heiminum
46. Gera ætlan um læknaútbúgving (verður nærri lýst í átaki 66)	Tað planlagda virksemið veksur á hvørjum ári
47. Seta fleiri serlæknar (dimensioneringsætlan)	Viðgerðartrygd (differentierað)
48. Menningarætlanir fyri hvørt sergreinaøki	
49. Krav um, at Sjúkrahúsverkið árliga økir planlagda virksemið	
50. Miðvíst arbeiða fyri at leggja um frá innlegging til dagskurð, ambulanta viðgerð og subakutta viðgerð	
51. Árlig pulja til at stytta um bíðilistar	
52. Bíðitíðir fyri allar viðgerðir verða almannakunngjørdar	
53. Menningarmál og profilar fyri tey trý sjúkrahúsini	
54. Broytt visitatión av medisinskum sjúklingum til KS	
55. Broytingar í tilbúgvingunum	
56. Uppskot til heintiskipan	

Talva 7.1 Sjúkrahúsverkið – Langtíðarmál 2035 og átøk fyri styttri tíðarskeið

Landssjúkrahúsið:

- Akuttsjúkrahús fyri alt landið
- Umfatandi planlagt virksemi í flestu sergreinum
- Menningarmál hjá Landssjúkrahúsinum:
  - Høvuðsábyrgd fyri miðvísa fakliga menning, herundir at taka viðgerðir heim
  - Høvuðsábyrgd fyri víðariútbúgving av læknum (talið skal økjast)
  - Høvuðsábyrgd fyri at menna gransking í Sjúkrahúsverkinum
  - Høvuðsábyrgd saman við Fróðskaparsetrinum at fremja ætlan um universitetssjúkrahús og komandi læknaútbúgving
  - Økja planlagda virksemið í ymiskum sergreinum, so hvørt sum talið á serlæknum veksur

- **Profilur 2026-2028:**
  - Bráðmóttøka fyri allar akuttar sjúklingar, skaðastova, skurð og anæstesi
  - Deildir: Intensiv deild, medisinskar seingjadeildir, skurðseingjadeildir, psykiatrisk seingjadeild, føðideild, barnadeild og dagdeild fyri barna- og ungdómspsykiatri
  - Funktiónir: hjarta, lungna, nýramedisin/dialysa, maga/tarm, diabetes, hormonsjúkur, gikt, arbeiðsmedisin, infektiónsmedisin, krabbamein, blóðsjúkur, neurologi, húð, ortopedi, kirurgi, mamma, urologi, endoskopi, eygu, oyrna-nasa-háls, gynekologi, sár, stomi, psykiatri fyri vaksin, demens, ergoterapi, fysioterapi, kostráðgevi, rannsóknarstova, røntgendeild (rgt., CT, MR og nuklearmedisin), palliatión
  - Størri virksemi á nógvum økjum, tá ið talið á serlæknum veksur
  - Minka um bíðilistar

Talva 7.2 Yvirskipað menningarmál

Suðuroyar Sjúkrahús:

- Sjúkrahús við akuttfunktión til lokaløkið og planløgdum funktiónum fyri lokaløkið og alt landið

- Menningarmál hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi:
  - Fyrireika tíðina eftir at tunnilin væntandi er liðugur. Akutt-virksemið verður nógv minni tá
  - Víðka planlagda virksemið
  - Høvuðsuppgávan verður planlagdar funktiónir fyri lokaløkið og alt landið
  - Eftirútbúgving av læknum og gransking

- **Profilur 2026-2028:**
  - Akuttfunktión (nógvir sjúklingar verða fluttir til Landssjúkrahúsið), skaðastova (størri skaðar verður fluttir til Landssjúkrahúsið), sera fáar akuttar skurðviðgerðir
  - Seingjadeild
  - Planlagdar funktiónir: Hjartamedisin, dialysa, ortopedkirurgi, kirurgi, urologi, endoskopi, operatión og anestesi, ergoterapi, fysioterapi, rannsóknarstova, røntgendeild (rgt. og CT), pínuklinikk, neurorehabilitering (lokal), ljósmóðir.
  - Nýggjar funktiónir: Uppgávur í sambandi við bíðilistar, miðspjadd ambulatorium og endurstovnað og víðkað plastikkkirurgi
  - Komandi árini gera ætlan um uppaftur fleiri planlagdar funktiónir á SSH

Talva 7.2 Yvirskipað menningarmál

Klaksvíkar Sjúkrahús:

- Sjúkrahús við planløgdum funktiónum fyri lokaløkið og alt landið. Harafturat ein avmarkað akuttfunktión

- Menningarmál hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi:
  - Víðka planlagda virksemið
  - Høvuðsuppgávan verður planlagdar funktiónir fyri lokaløkið og alt landið
  - Eftirútbúgving av læknum og gransking

- **Profilur 2026-2028:**
  - Skaðastova (minni skaðar), medisinskir sjúklingar til eftirviðgerð aftan á útgreining á Landssjúkrahúsinum (tó sjúklingar við opnari innlegging)
  - Seingjadeild
  - Planlagdar funktiónir: Ortopedkirurgi, kirurgi, endoskopi, urologi, operatión og anestesi, ergoterapi, fysioterapi, rannsóknarstova, røntgendeild (rgt. og MR), svøvnkøva, neurorehabilitering, ljósmóðir
  - Nýggjar funktiónir: Uppgávur í sambandi við bíðilistar og miðspjadd ambulatorium
  - Komandi árini gera ætlan um uppaftur fleiri planlagdar funktiónir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Talva 7.2 Yvirskipað menningarmál

7.10 Psykiatri og sálarlig heilsa

Heilsupolitikkurin er ætlaður at vera ein yvirskipaður politikkur, ið viðger heildarviðurskiftini í heilsuverkinum. Ætlanin hevur ikki verið at orða langtíðarmál og átøk fyri einstakar sergreinar.

Hóast hetta, er eitt ávíst sjúkuøki nevnt aftur og aftur á hoyringarfundunum – nevniliga psykiatriøkið. Bæði barna- og ungdómspsykiatri og psykiatri fyri vaksin.

> *Viðmerkingarnar snúgva seg í stóran mun um vantandi kapasitet og bíðitíðir á psykiatriøkinum og vantandi samanhang í sjúklingagongdunum. Serliga verður víst á trupulleikar við uppfylging aftan á útskriving ella aftan á ambulanta viðgerð í sjúkrahúshøpi.*

Her er umráðandi at nevna, at Heilsustýrið væntar, at talið á fólki við sálarligum trupulleikum og sjúkum fer at vaksa komandi árini (sí 3. part). Heilsustýrið heldur tí, at tørvur er á, at heilsuverkið fyrireikar seg til eina framtíð, har nógv fleiri sjúklingar hava sálarligar trupulleikar og sálarliga sjúku. Harafturat nevnir Heilsustýrið, at eyðkenni fyri sálarligar sjúkur er, at tørvur er á langtíðarviðgerð og viðgerð/tænastu frá fleiri pørtum í heilsuverkinum og samstarvsfeløgum. Sostatt er neyðugt at menna samanhangandi tilboð til fólk við sálarsjúku og tryggja neyðugan kapasitet.

Nevnast kann eisini, at betrað tænasta í psykiatriini, var eitt av teimum hægst raðfestu økjunum í spurnakanningini.

Trupulleikin við bíðitíð til útgreining og viðgerð í sjúkrahúshøpi kemur týðiliga fram í yvirlitinum yvir bíðitíðir hjá Sjúkrahúsverkinum. Psykiatriin er greitt tað økið, við longst bíðitíðum. Bíðitíðin hevur stórar avleiðingar fyri sjúklingar og avvarðandi, og harafturat gerst tað torført hjá øðrum ábyrgdarhavarum á økinum at veita hjálp, tí psykiatriska útgreiningin manglar.

BÍÐITÍÐ

	Bíðitíð mánaðir	Tal á bíðilista
Barna- og ungdómspsykiatri	**16**	**262**
ADHD vaksin	**30**	**722**
Demens	**6**	**33**
Psykiatri vaksin	**16**	**123**

Talva 7.3 Bíðitíð til útgreining og viðgerð á psykiatriøkinum

Ein annar stórur trupulleiki á psykiatriøkinum er, sum áður nevnt, vantandi samanhangur. Tað gerst ikki lættari at tryggja samanhang í sjúklingagongdum, tí heilt nógvir ábyrgdarhavarar ofta eru uppi í viðgerðini og tænastuni, tá ið tað snýr seg um borgarar við sálarligum trupulleikum og sjúkum. Allir hesir ábyrgdarhavarar skulu arbeiða tætt saman, fyri at veita eina samanhangandi tænastu.

Tá ið talan er um børn og ung við sálarligum avbjóðingum, eru tað serliga hesir partar, ið skulu arbeiða saman fyri at veita eina samanhangandi hjálp: Fólkaskúli, miðnámsútbúgvingar, Sernám, Gigni, kommunulæknar, Almannaverkið, kommunur og barna- og ungdómspsykiatri.

Fyri vaksin undir 67 ár er talan um: Kommunulæknar, Almannaverkið og psykiatri fyri vaksin.

Fyri borgarar eldri enn 67 ár er talan um: Kommunulæknar, kommunur/eldrasamstørv og psykiatri fyri vaksin.

> *Útsagnirnar frá hoyringarfundunum vísa, at tað ikki hevur eydnast hesum pørtum í nóg stóran mun at veita eitt samanhangandi tilboð til borgarar við sálarligum avbjóðingum. Í hesum sambandi skal nevnast, at Barnaverkætlanin skal virka fyri at skapa betri samanhang í tvørgeiraligum tilboðum, serliga tá ið tað snýr seg um børn og ung við torgreiddum trupulleikum. Eisini verður arbeitt við einari barnalóg, sum skal tryggja hetta.*

Afturat teimum pørtunum, ið eru nevndir omanfyri, eru eisini sálarfrøðingar, sum hava sáttmála við Heilsutrygd.

Avbjóðingar við sosialum og geografiskum ójavnað verða eisini nevndar. Hetta tí, at talan er um partvíst brúkaragjald á økinum, og tí at ongin sálarfrøðilig viðtala er í Suðuroy.

Í 2018 varð *Heildarætlan fyri sálarliga heilsu í Føroyum*[50] gjørd fyri at menna psykiatriøkið. Nú sjey ár seinni má staðfestast, at stórar og óloystar avbjóðingar framvegis eru á økinum.

Arbeiðið við heilsupolitikkinum hevur víst, at týðandi trupulleikar eru á psykiatriøkinum, og tørvur er á einari samlaðari ætlan fyri økið. Ætlanin skal fevna um bæði børn, ung og vaksin.

Átak:

57. **Psykiatriætlan:** Sum uppfylging uppá hendan politikk eigur at verða gjørd ein psykiatriætlan fyri komandi 10 árini. M.a. skulu evnini í ætlanini snúgva seg um at fyribyrgja mistrivnaði og sálarsjúku (herundir sálarsjúku saman við misnýtslu), nøktandi kapasitet á psykiatriøkinum og samanhangandi sjúklingagongdum á psykiatriøkinum. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Kommunufelagið, Sjúkrahusverkið, Almannaverkið o.o.*

[50] ***Heildarætlan fyri sálarliga heilsu í Føroyum***, *Heilsu- og innlendismálaráðið, 2018*

8. Góðskumenning og dáta

Hesin parturin snýr seg um tey langtíðarmál og átøk, ið verða mett neyðug fyri at menna góðsku og dáta í føroyska heilsuverkinum komandi árini.

	Síða
• 8.1 Íkast til heilsupolitikkin um góðskumenning og dáta	**59**
• 8.2 Langtíðarmál	**59**
• 8.3 Átøk	**60**

8.1 Íkast til heilsupolitikkin um góðskumenning og dáta

Tørvurin á góðskumenning og dátum er nógv umrøddur á hoyringarfundunum. Sammett við heilsuverk aðrastaðni, hevur føroyska heilsuverkið sera avmarkaða innsavning av dátum og eftirfylgjandi miðvísa góðskumeting og -menning. Fleiri hoyringarpartar nevna hetta.

> *Vantandi dátur og góðskumenning merkja, at góðskan í heilsuverkinum í stóran mun er ókend, og tað er ónøktandi fyri bæði sjúklingar og fakfólk. Afturat hesum mangla dátur fyri virksemið. Vantandi heilsudátur ger tað trupult at planleggja og granska á heilsuøkinum. Dátur og hagtøl hava stóran týdning fyri møguleikarnar at fylgja heilsustøðuni í landinum.*

Vantandi dátur og góðskuuppfylging vera sostatt mett at vera ein stórur trupulleiki fyri heilsuverkið.

8.2 Langtíðarmál

Fleiri gera vart við stóra trotið á hagtølum í heilsuverkinum. Hagtøl um diagnosur, kanningar og viðgerðir finnast í talgildu heilsuskipanini, men skrásetingarnar eru ófullfíggjaðar og ringar at fáa fatur á. Hetta ger tað sera torført at arbeiða við góðskumenning. Eingin heildar-góðskumenningarskipan er, sum regluliga mátar góðskuna, og skipaðar sjúklinganøgdsemiskanningar verða ikki gjørdar. Hetta ávirkar bæði planlegging og gransking.

Nøkur undantøk eru tó.

Á krabbameinsøkinum eru nøkur álítandi hagtøl, og Apoteksverkið hevur langa siðvenju við góðskumeting og -menning. Harafturat eru nøkur staðbundin tiltøk í heilsuverkinum, har arbeitt verður við góðskumenning.

Í grannalondunum er góðskumeting og -menning fastur partur av heilsuverkinum.

Fyri at fáa gongd á, hevur Heilsustýrið, saman við stovnunum í heilsuverkinum tikið stig til eina ætlan fyri eina heilsuskrá, sum skal savna hagtøl frá øllum heilsuverkinum. Ein stór og tíðarkrevjandi verkætlan. Skráin fer ikki at rigga optimalt, fyrr enn hagtøl verða flutt sjálvvirkandi frá viðkomandi KT-skipanum. Hetta verður ikki veruleiki, fyrr enn ein nýggj talgild heilsuskipan verður tikin í nýtslu.

> *Mest týðandi langtíðarmálið er, at fakliga og sjúklingaupplivda góðskan í heilsuverkinum er á sama stigi sum í grannalondunum. Harafturat er tørvur á skipaðari innsavning av álítandi hagtølum um virksemi, diagnosum, kanningum, viðgerðum og sjúklinganøgdsemi. Og ein rættilig góðskumenningarskipan skal tryggja, at hagtølini verða nýtt til at betra góðsku og sjúklingatrygd.*

Hetta krevur stórt arbeiði, drúgva tíð og íløgur fyri at eydnast. Tí er avgerandi, at viðkomandi krøv verða sett til eina komandi talgilda heilsuskipan í sambandi við innsavning av hagtølum. Harafturat er neyðugt at hava eins skrásetingarmannagongdir í øllum heilsuverkinum.

Langtíðarmálini fram til 2035 eru hesi:

- Fakliga góðskan og sjúklinganøgdsemið eru á sama stigi, sum í grannalondunum
- Álítandi hagtøl um virksemi, diagnosur, kanningar, viðgerðir og sjúklinganøgdsemi
- Góðskumenningarskipan, sum fevnir um alt heilsuverkið

8.3 Átøk

Niðanfyri verða nevnd tey átøk, sum verða mett neyðug at seta í verk í sambandi við góðskumenning og dáta komandi árini.

Átøk í 2026:

Tað fer at taka tíð at gera eina góðskumenningarskipan fyri heilsuverkið. Tí eigur at vera hugsað um, hvat kann gerast, meðan bíðað verður. Tíbetur er tað ikki so, at alt góðskuarbeiðið má steðga, til heilsuskrá og nýggj talgild heilsuskipan eru tøk.

Tí verður mælt til hesi átøk:

58. **Nøgdsemiskanningar:** Eitt upplagt evni at raðfesta er nøgdsemiskanningar. Slíkar kanningar eru lutfalsliga einfaldar at gera. Heilsuverkið hevur áður gjørt nøgdsemiskanningar. Tann seinasta var í 2010. Nøgdsemiskanningar mugu gerast javnan, soleiðis at heilsuverkið kann brúka svarini til at menna góðsku og tænastu. Mælt veður til, at ein nøgdsemiskanning verður gjørd í 2026. *Ábyrgdarhavandi/partar: Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd/kommunulæknar o.o.*

59. **Góðskunevnd fyri heilsuverkið:** Tørvur er á einari samlaðari skipan av góðskuarbeiðnum í heilsuverkinum. Tí eigur ein góðskunevnd við luttakarum frá ymiskum pørtum av heilsuverkinum, fakbólkum og sjúklingaumboðum at verða sett. Góðskunevndin skal seta út í kortið, hvussu arbeiðast skal við góðsku í heilsuverkinum. *Ábyrgdarhavandi/partar: Heilsumálaráðið, Heilsustýrið og stovnar í heilsuverkinum.*

60. **Heilsuskrá:** Heilsustýrið hevur sett eitt arbeiði í gongd at gera eina landsumfatandi heilsuskrá, sum skal savna hagtøl frá øllum heilsuverkinum. Hagtølini skulu brúkast til góðskumeting, góðskumenning, planlegging og gransking til gagns fyri sjúklingar og borgarar. Talan er um eina stóra og tíðarkrevjandi verkætlan, ið hevur avgerandi týdning fyri framtíðar menning av heilsuverkinum. Verandi heilsuskipan kann ikki automatiskt veita dátur til eina heilsuskrá. Tí skal arbeiðið við nýggjari heilsuskrá samskipast neyvt við arbeiðið at fáa eina nýggja heilsuskipan. Hetta so at tryggjað verður, at heilsuskipanin kann veita dátur til heilsuskránna. Mælt verður til, at arbeiðið við at gera eina heilsuskrá heldur fram, og at heilsuskráin verður liðug og framd, tá ið ein nýggj heilsuskipan verður tikin í nýtslu. *Ábyrgd: Heilsustýrið.*

Átøk í 2027-28:

61. Kliniskt audit: Klinisk audit er ein háttur at menna góðsku, sum er sera nógv nýttur í heilsuverkum um allan heim. Kliniskt audit verður gjørt á tann hátt, at tveir ella fleiri óheftir serfrøðingar gjøgnumganga nakrar journalir á einum øki, fyri at lýsa góðskuna. Úrslitini verða so nýtt til at gera broytingar fyri at betra fakligu góðskuna. Fyrimunurin við kliniskum audit er, at ikki er neyðugt at hava skipaði hagtøl, av tí at teksturin í journalini verður nýttur. So her er ikki neyðugt at bíða eftir nýggjari heilsuskipan. Mælt verður til, at kliniskt audit sum háttalag verður nýtt á ein skipaðan hátt í heilsuverkinum. Komandi góðskunevnd eigur at fáa uppgávuna at gera eina nærri ætlan. *Ábyrgd: Komandi góðskunevnd.*

62. **Nýta altjóða tilmæli um góðsku og sjúklingatrygd:** Í altjóða høpi finnast nógv tilmæli um, hvussu góðska kann betrast og mennast. Eitt dømi er átakið,"Choosing wisely",[51] sum snýr seg um at gera tilmæli um, hvørjar kanningar og viðgerðir eiga at avtakast, tí tær ikki geva sjúklingunum virði. Her er fokus á at beina burtur svinn. Komandi góðskunevnd eigur at fáa til uppgávu at gera eina nærri ætlan hesum viðvíkjandi. *Ábyrgd: Komandi góðskunevnd.*

63. **Royndir við kliniskum dátugrunnum:** Royndir við kliniskum dátugrunnum eiga at verða gjørdar. Í kliniskum dátugrunnum verða hagtøl um fakligu góðskuna á einum ávísum sjúkuøki, savnað, og fylgt verður upp uppá, um sjúklingaviðgerðin lýkur viðkomandi leiðreglur. Stovnsetan av kliniskum dátugrunnum er eitt stórt og tíðarkrevjandi arbeiði, og neyðugt er at gera tað í stigum. Gott hevði verið at gjørt tað í samstarvi við eitt útlendskt heilsuverk. Arbeiðið við kliniskum dátugrunnum verður munandi lættari, tá ið ein heilsuskrá er gjørd. Skotið verður upp, at komandi góðskunevndin ger eina ætlan fyri, hvussu fyrstu royndirnar við kliniskum dátugrunnum skulu skipast. Heilsustýrið eigur at hava ein fakligan leiklut í arbeiðnum. Harafturat er tørvur á, at lóggávan viðvíkjandi dátugrunnum verður endurskoðað. *Ábyrgd: Komandi góðskunevnd og Heilsustýrið.*

[51] ***Choosing Wisely*** *er eitt altjóða átak, hvørs mál er at betra samskiftið millum lækna og sjúkling, fyri at fáa betri avgerðir um heilsutænastur. Arbeitt verður við at eyðmerkja og minka talið á óneyðugum kanningum, viðgerðum og mannagongdum, sum ikki gagna sjúklinginum, ella sum kunnu vera skaðiligar.*

2026 Átøk	2027-28 Átøk	2029-35 Átøk	Langtíðarmál 2035
58. Nøgdsemis-kanningar 59. Góðskunevnd fyri heilsuverkið 60. Heilsuskrá	61. Kliniskt audit 62. Nýta altjóða tilmæli um góðsku og sjúklingatrygd 63. Royndir við kliniskum dátu-grunnum	Heilsuskrá og nýggj heilsuskipan tikin í nýtslu Góðskumenningarskipan fyri alt heilsuverkið tikin í nýtslu	Fakliga góðskan og sjúklinganøgdsemið eru á sama stigi sum í grannalondunum Álítandi hagtøl um virksemi, diagnosur, kanningar, viðgerðir og sjúklinganøgdsemi Góðskumenningar-skipan, sum fevnir um alt heilsuverkið

Talva 6.1 Samanhangandi sjúklingagongdir – langtíðarmál og átøk fyri styttri tíðarskeið

9. Útbúgvin starvsfólk og uppgávulyfting

Hesin parturin viðger langtíðarmál og átøk, sum eiga at verða sett í verk fyri at tryggja, at nóg mikið av útbúnum starvsfólki eru til heilsuuppgávurnar komandi árini.

	Síða
• 9.1 Íkast til heilsupolitikkin um útbúgvin starvsfólk og uppgávuflyting	**64**
• 9.2 Langtíðarmál	**64**
• 9.3 Átøk	**65**

9.1 Íkast til heilsupolitikkin um útbúgvin starvsfólk og uppgávuflyting

Ein sera stórur partur av hoyringarpørtunum vísir á týdningin av at hava nóg mikið av útbúnum starvsfólkum á heilsuøkinum. Væntað verður, at heilsuuppgávan kemur at økjast munandi næstu árini, orsakað av broyttu fólkasamansetingini. Mælt verður til, at hava eitt dagført yvirlit yvir metta starvsfólkatørvin fyri ymsu fakbólkarnar, so okkurt kann gerast, meðan tíð er. Víst verður á, at tað á serlæknaøkinum er gjørd ein dimensioneringsætlan fyri komandi árini. Frágreiðingin, *Í góðum hondum*,[52] vísir eisini á starvsfólkatørvin.

> *Ítøkilig øki verða nevnd, har starvsfólkatrot er ella at starvfólkatrot kann væntast, m.a. serlæknar (íroknað kommunulæknar), útbúgvingarstørv fyri yngri læknar, serútbúnir sjúkrarøktarfrøðingar, læknaskrivarar og starvsfólk á eldraøkinum (serliga heilsurøktarar og -hjálparar, eisini sjúkrarøktafrøðingar). Ein stórur partur av starvsfólkunum, sum starvast á eldraøkinum hava ikki heilsuútbúgving.*

Víst verður á, at eitt stórt stig longu er tikið við at tvífalda upptøkuna á sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingini. Víst verður eisini á møguleikarnar fyri at seta á stovn nýggjar útbúgvingar í Føroyum.

Fleiri hoyringarpartar nevna tørvin á miðvísari eftirútbúgving, og fleiri nevna uppgávuflyting millum fakbólkar, sum kann geva smidligari starvsfólkanýtslu.

9.2 Langtíðarmál

Ein av størstu avbjóðingunum hjá heilsuverkinum er tørvurin á starvsfólki. Eitt týðandi langtíðarmál er at tryggja nóg mikið av skikkaðum starvsfólki til vaksandi uppgávuna hjá heilsuverkinum. Heilsuverkið hevur tætt samstarv við eldraøkið, og tískil er eisini avgerandi at tryggja nóg mikið av skikkaðum starvsfólki á hesum økinum.

Tí skal tryggjast at útbúgvingarkapasiteturin til heilsuútbúgvingarnar er nóg stórur. Harafturat er umráðandi at tryggja skipaða eftirútbúgving av starvsfólkum, so neyðugu førleikarnir eru til staðar.

Eitt týðandi mál er eisini, at heilsuverkið framhaldandi er eitt gott arbeiðspláss, sum er kent fyri gott arbeiðsumhvørvi og góðan trivnað. Umráðandi er at fáa meira fleksibilitet og møguleika fyri uppgávuflyting millum yrkisbólkar, soleiðis at tilfeingið kann gagnnýtast so væl sum gjørligt.

Í nógv ár hevur læknatrot verið ein av størstu trupulleikunum í heilsuverkinum. Trotið hevur gjørt fakligu menningina í heilsuverkinum trupla og hevur elvt til bíðilistar. Í løtuni eru útlit fyri batum, tí nógvir føroyingar útbúgva seg til lækna uttanlands. Men samstundis eiga nøktandi víðari útbúgvingarmøguleikar fyri yngri læknar at verða tryggjaðir í Føroyum, fyri harvið at økja sannlíkindini fyri, at teir velja sær lívsstarv her.

> *Læknatrot hevur ávirkað heilsuverkið gjøgnum mong ár. Tí eigur eitt langtíðarmál eisini at vera at fremja ætlanina um læknaútbúgving ella partar av læknaútbúgving í Føroyum.*

[52] ***Í góðum hondum: Starvsfólkatørvur á vælferðarøkinum - avbjóðingar og uppskot til loysnir, 2022*** *http://tilfar.lms.fo/logir/alit/2022.03%20Í%20góðum%20hondum%20-%20Starvsfólkatørvur%20á%20vælferðarøkinum%20-%20avbjóðingar%20og%20uppskot%20til%20loysnir..pdf*

Langtíðarmálini fram til 2035 eru hesi:

- Nóg mikið av útbúnum starvsfólkum til vaksandi uppgávurnar í heilsuverkinum og á eldra- og almannaøkinum
- Heilsuverkið er framhaldandi eitt gott arbeiðspláss við góðum arbeiðsumhvørvi og trivnaði
- Fleksibilitetur millum yrkisbólkar og uppgávuflyting
- Partar av læknaútbúgving setast í verk í Føroyum

9.3 Átøk

Mælt verður til niðanfyristandandi átøk árini 2026-2028, fyri at tryggja nóg mikið av útbúnum starvsfólki til heilsuverkið.

Átøk í 2026:

64. **Útbúgving av sersjúkrarøktarfrøðingum:** Sundhedsstyrelsen hevur góðkent átta serútbúgvingar fyri sjúkrarøktarfrøðingar, t.d. anæstesisjúkrarøktarfrøðingar. Higartil hevur tað verið so, at sjúkrarøktarfrøðingar sjálvir skulu taka serútbúgving uttanlands. Tí hevur eingin ætlan verið fyri, hvussu nógv verða útbúgvin, og um talið hóskar til tørvin. Hetta hevur elvt til trot á sersjúkrarøktarfrøðingum. Tørvurin á anæstesisjúkrarøktarfrøðingum er mest týðandi trupulleikin og er viðvirkandi til avbjóðingarnar við bíðilistum til skurðviðgerðir. Harafturat hevur tørvurin við sær, at útreiðslurnar til vikarar økjast. Tað er neyðugt at seta í verk eina fasta skipan soleiðis, at heilsuverkið hevur ábyrgd av, at talið og slagið av sersjúkrarøktarfrøðingum er nøktandi. *Ábyrgd: Sjúkrahúsverkið.*

65. **Víðariútbúgving fyri yngri læknar:** Framstig eru í væntu á læknaøkinum, tí nógvir føroyingar eru í holt við at útbúgva seg til lækna uttanlands. Eftir lokna læknaútbúgving skulu tey útbúgva seg til serlæknar. Tað eigur at verða tryggjað, at tey í størst møguligan mun kunnu taka víðariútbúgving ella part av víðariútbúgving í Føroyum, tí hetta kann vera avgerandi fyri, um tey gerast serlæknar her. Í løtuni eru samráðingar við Sundhedsministeriet og Sundhedsstyrelsen um samstarv um høvuðsútbúgvingar (serlækna-útbúgving) fyri læknar, har ein partur kann takast í Føroyum. Tryggjast skal, at hendan avtala verður gjørd og ætlaði vøksturin í serlæknatalinum kann gerast veruleiki. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið.*

66. **Fyrireika læknaútbúgving í Føroyum:** Lógin um at menna Sjúkrahúsverkið til eisini at vera universitetssjúkrahús, hevur eisini við sær eina ætlan um, at partar av læknaútbúgvingini skulu setast í verk í Føroyum. Rekruttering av læknum hevur sum áður nevnt verið ein stórur trupulleiki í nógv ár. Møguleiki fyri at taka partar av læknaútbúgvingini í Føroyum, fer at betra tilknýtið hjá teimum læknalesandi til landið. Læknaútbúgving og víðariútbúgving til serlækna tekur 12 ár tilsamans í minsta lagi. Verður tilknýtið til Føroyar ikki hildið viðlíka í longu lestrartíðini, er vandi fyri, at tey ikki venda heimaftur eftir loknan lestur. Talan er um eina stóra uppgávu, sum fer at taka ár at fyrireika og seta í verk. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið.*

67. **Útbúgving av læknaskrivarum:** Áður var útbúgvingin til læknaskrivara ein lærlingaútbúgving. Tað hevði við sær, at útbúgvingin kundi takast í Føroyum við styttri skúlasteðgum í Danmark. Hendan útbúgvingin er nú broytt í Danmark og

gjørd til "sundhedsadministrativ koordinator". Nýggja útbúgvingin er øðrvísi, nógv meira teoretisk og við minni starvsvenjing. Broytingin hevur havt við sær trot á læknaskrivarum. Tí skal støða takast til, um tað í hesum sambandi er tørvur á nýggjum útbúgvingartiltøkum í Føroyum. *Ábyrgd/partar: Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Heilsu*málaráðið og Sjúkrahúsverkið.

68. **Útgreining av starvsfólkatørvi:** Eitt útgreiningararbeiði fyri at kanna framtíðar starvsfólkatørv eigur at verða gjørt á øllum heilsuøkinum. Soleiðis fæst eitt yvirlit yvir starvsfólkatørvin í framtíðini og betri grundarlag fyri at meta um tørv á útbúgvingarplássum og øðrum átøkum. Í heilsupolitikkinum verður stórur dentur lagdur á heilsuframa og fyribyrging. Tí skulu eisini útbúgvingar- og eftirútbúgvingarmøguleikar viðvíkjandi heilsuframa og fyribyrging vera tøk. Í útgreiningini skal ljós varpast á, um tey tiltøk, sum longu eru sett í verk, hava havt nóg stóran virknað. Harafturat eigur tað í útgreiningini at verða hugt eftir møguleikum fyri uppgávuflyting millum yrkisbólkar. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Kommunufelagið og stovnar á heilsuøkinum.*

Átøk í 2027-28

69. **Skipaðar eftirútbúgvingarætlanir:** Stovnarnir í heilsuverkinum eiga at gera skipaðar eftirútbúgvingarætlanir, fyri at tryggja nøktandi eftirútbúgving í øllum heilsuverkinum. *Ábyrgd/partar: Stovnar í heilsuverkinum.*

70. **APN-útbúgving:** Fróðskaparsetrið setur kandidatútbúgvingina "Avanseraður kliniskur sjúkrarøktarfrøðingur" á stovn. Endamálið við útbúgvingini er at betra røkt og viðgerð gjøgnum evidensbaserøða praksis, gransking og betranartiltøk. *Ábyrgd/partar: Fróðskaparsetrið.*

2026 Átøk	2027-28 Átøk	2029-35 Átøk	Langtíðarmál 2035
64. Útbúgving av sersjúkrarøktarfrøðingum	69. Skipaðar eftirútbúgvingarætlanir	Uppfylging viðvíkjandi útgreining av starvsfólkatørvi	Nóg mikið av útbúnum starvsfólki til vaksandi uppgávurnar í heilsuverkinum og á eldra- og almannaøkinum
65. Víðariútbúgving fyri yngri læknar	70. APN-útbúgving	Seta í verk ætlan um skipaða eftirútbúgving	Heilsuverkið er framhaldandi eitt gott arbeiðspláss við góðum arbeiðsumhvørvi og trivnaði
66. Fyrireika læknaútbúgving í Føroyum		Partar av læknaútbúgving byrja	Fleksibilitetur millum yrkisbólkar og uppgávuflyting
67. Útbúgving av læknaskrivarum			Partar av læknaútbúgving verða settir í verk í Føroyum
68. Útgreining av starvsfólkatørvi			

Talva 6.1 Samanhangandi sjúklingagongdir – langtíðarmál og átøk fyri styttri tíðarskeið

10. KT og tøkni

Partur 10 snýr seg um langtíðarmál og átøk, sum skulu tryggja, at KT og tøkni verða betri gagnnýtt í heilsuverkinum komandi árini.

	Síða
• 10.1 Íkast til heilsupolitikkin um KT og tøkni	**68**
• 10.2 Langtíðarmál	**68**
• 10.3 Átøk	**69**

10.1 Íkast til heilsupolitikkin um KT og tøkni

Fleiri hoyringarpartar nevna at troyta møguleikar í KT og tøkni. Sjúklingar skulu hava talgildar møguleikar í samskiftinum við heilsuverkið, eitt nú talgilda viðtalu og atgongd til egnar heilsudátur. Hoyringarpartarnir vísa á, at hesir møguleikar eru avmarkaðir í dag. Eisini mugu starvsfólk í øllum heilsuverkinum hava góð og samanhangandi KT-amboð tøk í klinikkini, og medicotekniska útgerðin má dagførast.

10.2 Langtíðarmál

Nógvar viðmerkingar frá hoyringarfundunum snúgva seg um at gagnnýta KT og aðrar tøkniligar møguleikar í heilsuverkinum. Serliga er dentur lagdur á tørvin á talgildum samskifti millum sjúklingar og heilsuverkið gjøgnum telemedisin og líknandi, og sjúklingarnir skulu hava lætta atgongd til egnar dátur.

> *Ynski eru eisini um, at starvsfólkini í heilsuverkinum hava atgongd til hóskilig og tíðarhóskandi KT-amboð í teirra arbeiði. Ein vælvirkandi heilsuskipan er ein fortreyt fyri at tryggja samanhangandi sjúklingagongdir. Verandi journalskipan er yvir 20 ára gomul og lýkur ikki krøvini til eitt nútímans KT-arbeiðsplass í heilsuverkinum. Arbeiðið við at fáa eina nýggja heilsuskipan er farið í gongd.*

Nýggju tøkniligu møguleikarnir við t.d. vitlíki eiga at verða troyttir í heilsuverkinum. Og tryggjast má, at aldurin á medicoteknisku útgerðini á sjúkrahúsunum ikki er ov høgur, tí hetta kann hava við sær, at útgerðin er slitin ella ótíðarhóskandi.

Langtíðarmálini fram til 2035 eru hesi:

- Alt samskifti við heilsuverkið kann vera talgilt
- Sjúklingar hava lætta atgongd til egnar dátur
- Starvsfólk í heilsuverkinum hava tíðarhóskandi KT-arbeiðsplass
- Heilsuverkið nýtir nýggjastu tøkni í rakstrinum
- Tíðarhóskandi medicotøknilig útgerð

10.3 Átøk

Mælt verður til fleiri átøk fyri at taka fyrstu stigini til at realisera langtíðarmálini um KT og tøkni í 2035. Átøkini verða nevnd niðanfyri.

Átøk í 2026:

71. **Talgildingarætlan:** Sum borgarar, hava vit longu vant okkum við, at nógv, sum vit gera, er gjøgnum talgildar miðlar. Hetta er tá ið vit t.d. skulu samskifta við bankar, keypa atgongumerki ella gera okkara sjálvuppgávu. Tað eigur eisini at vera soleiðis, tá ið vit samskifta við heilsuverkið. Tí eigur ein talgildingarætlan við denti á samskifti millum borgara og heilsuverk at verða gjørd. Ein tílík ætlan kann møguliga fáa íblástur úr øðrum londum. Dømi um talgilding av samskiftinum millum sjúklingar og heilsuverk eru talgildar viðtalur, teldupostviðtalur, elektronisk bóking, talgild atgongd til egnar heilsudátur o.a. Í ætlanini skal vera tíðarætlan og kostnaðarmeting. Um borgarin ikki vil samskifta talgilt við heilsuverkið, skal møguleiki fyri øðrum samskifti vera til staðar. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, stovnar í heilsuverkinum og KT-Landsins.*

72. **Royndir við talgildum viðtalum millum Suðuroyar Sjúkrahús og Landssjúkrahúsið:** Í 2025 er ein royndarskipan fyri sjúklingar í Suðuroy sett í verk, har sjúklingar kunnu koma á Suðuroyar Sjúkrahús fyri at samskifta við heilsustarvsfólk á Landssjúkrahúsinum. Hendan royndarskipan skal víðkast við fleiri brúkarum. *Ábyrgd: Sjúkrahúsverkið og KT-Landsins.*

73. **Ætlan fyri medicotøkniliga útgerð:** Medicotøkniliga økið mennist við fullari ferð um allan heim. Nýggj útgerð verður støðugt ment, og ofta verður útgerðin ótíðarhóskandi, áðrenn hon er slitin. Tíðarhóskandi medicotøknilig útgerð er heilt avgerandi fyri, at heilsuverkið kann veita hágóðskukanningar og -viðgerðir. Dømi eru um ótíðarhóskandi útgerð á sjúkrahúsunum, og miðalaldurin á medicotøkniligu útgerðini á sjúkrahúsunum er lutfalsliga høgur (10 ár). Ein ætlan fyri neyðuga útskifting av medicotøkniligari útgerð skal tí gerast, fyri at tryggja at útgerðin lýkur krøvini í einum nútímans heilsuverki. Ætlanin skal fremjast tey næstu árini. *Ábyrgd: Sjúkrahúsverkið.*

74. **Fyrireika nýggja heilsuskipan (journal):** Sum áður nevnt, er eitt arbeiði at fyrireika nýggja talgilda heilsuskipan, farið í gongd. Talan er um eina sera stóra verkætlan, sum fer at taka fleiri ár, og sum krevur stórar íløgur. Skipanin skal tryggja tíðarhóskand KT-amboð á heilsuøkinum. Ein týðandi partur av verkætlanini er at tryggja, at komandi heilsuskipanin kann lata tær dátur um sjúklingar, diagnosur, virksemi o.a., sum heilsuverkið hevur fyri neyðini. Leiðslan av verkætlanini liggur í Sjúkrahúsverkinum, men alt heilsuverkið er partur av henni. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið, Heilsumálaráðið, Heilsustýrið o.o.*

Átøk í 2027-28:

75. **Møguleiki fyri talgildari viðtalu kring alt landið:** Við støði í talgildingarætlanini skulu talgildar viðtalur víðkast til alt landið og fevna um bæði sjúkrahús og kommunulæknar. *Ábyrgd: Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd og KT-Landsins.*

76. **Rættur til talgilda viðtalu á sjúkrahúsi og hjá kommunulæknum:** Serliga talgildar viðtalur kunnu spara flutningstíð fyri fólk. Við árslok 2028 verður útbreiðslan av talgildum viðtalum væntandi komin so langt, at sjúklingum kann tryggjast rættur til talgilda viðtalu (tó undantikið støður, har kanning o.a. krevur uppmøting). Sjálvsagt skulu sjúklingar, ið ynskja uppmøting, framhaldandi hava møguleika fyri hesum. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Heilsutrygd/kommunulæknar.*

77. **Møguleiki fyri teldupostviðtalu hjá kommunulæknum:** Við støði í talgildingarætlanini verður gjørdur møguleiki fyri teldupostviðtalum hjá kommunulæknum. Við hesum verður enn eitt stig tikið fyri at gera tað lætt fyri borgaran at koma í samband við heilsuverkið og spara flutningstíð. *Ábyrgd/partar: Heilsutrygd/ kommunulæknar og KT-Landsins.*

78. **Ætlan fyri nýggja tøkni:** Stór tøknilig menning er á heilsuøkinum, við eitt nú vitlíki, tólmennum og tykisveruleikatólum.[53] Ein ætlan skal gerast fyri, hvussu nýggj tøkni kann nýtast í heilsuverkinum við tí endamáli at tryggja betri góðsku og gagnnýta tilfeingið betur. Í hesum sambandi verður neyðugt at brúka royndir úr útlandinum. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið o.o.*

2026 Átøk	2027-28 Átøk	2029-35 Átøk	Langtíðarmál 2035
71. Talgildingarætlan	75. Møguleiki fyri talgildari viðtalu kring alt landið	Nýggj heilsuskipan takast í nýtslu	Alt samskifti við heilsuverkið, kann vera talgilt
72. Royndir við talgildum viðtalum í Suðuroy	76. Rættur til talgilda viðtalu á sjúkrahúsi og hjá kommunulækna	Útskifting av medicotøkniligari útgerð heldur fram	Sjúklingar hava lætta atgongd til egnar dátur
73. Ætlan fyri medicotøkniliga útgerð	77. Møguleiki fyri teldupostviðtalu hjá kommunulæknum	Nýggj tøkni í heilsuverkinum – íverksetan heldur fram	Starvsfólk í heilsuverkinum hava tíðarhóskandi KT- arbeiðspláss
74. Fyrireika nýggja heilsuskipan (journal)	78. Ætlan fyri nýggja tøkni		Heilsuverkið nýtir nýggjastu tøkni í rakstrinum
			Tíðarhóskandi medicotøknilig útgerð

Talva 10.1 KT og tøkni - langtíðarmál og átøk fyri styttri tíðarskeið

[53] *Virtual reality*

11. Onnur viðurskifti

Partur 11 snýr seg um onnur átøk á heilsuøkinum.

Síða

- 11.1 Javni í heilsu **72**
- 11.2 Heilivágur **72**
- 11.3 Flutningur til heilsutilboð **73**
- 11.4 Sjúkraflutningstænastan (ambulansutænastan) **73**
- 11.4 Læknavaktin **73**

11.1 Javni í heilsu

Í triðja parti lýsir Heilsustýrið heilsustøðuna, og vísir í tí sambandi á sosialan ójavnað í heilsu, sum ein stóran heilsutrupulleika. Heilsustýrið vísir á, at í flestu vandatættum sæst ein sosialur ójavni í heilsu. Í kanningini, *Hvussu hevur tú tað?*, sæst, at parturin av fólki við stuttari útbúgving, er yvirumboðaður, tá ið talan er um ósunnan heilsuatburð. Tað er eisini hjá teimum við stuttari útbúgving, at vit síggja størsta partin við ringari sjálvmettari heilsu, strongd, drúgvari sjúku og einsemi. Sostatt verður ein stórur partur av vandatættunum savnaður í einum samfelagsbólki.

> *Á hoyringarfundunum verður eisini víst á, at ójavni í heilsu er ein yvirskipaður trupulleiki í samfelagnum, og serliga tá ið tað snýr seg um fólk, ið bera brek. Víst verður til altjóða breksáttmálan[54], sum Føroyar hava bundið seg til í 2009, har staðfest verður, at øll hava rætt til góða heilsu.*

Tað kann ikki vísast til nakað einstakt átak, ið kann tryggja heilsujavnað. Men ójavni í heilsu er ein trupulleiki, sum fokus áhaldandi eigur at vera á. Hetta er ikki ein trupulleiki, sum heilsuverkið einsamalt kann loysa. Allir samfelagsgeirar mugu hjálpa til. Heilsuverkið eigur at ganga á odda fyri at tryggja javnað í heilsu, og eigur sostatt altíð at geva gætur, um tørvur er á serligari tænastu við atliti at sosialum trupulleikum, tá ið heilsuverkið hevur samband við borgarar og sjúklingar.

Tí eiga øll átøk eftir hesum heilsupolitikki at økja um heilsujavnan ella í minsta lagi ikki økja um ójavnan.

11.2 Heilivágur

Á nógvu hoyringarfundunum í sambandi við heilsupolitikkin, er lítið nevnt um heilivágsøkið. Hetta bendir á, at økið yvirskipað er vælvirkandi. Men heilivágur er ein týðandi partur av heilsuøkinum og fevnir um ein sera stóran part av samlaða kostnaðinum í heilsuverkinum. Tí eigur heilivágsøkið sjálvsagt eisini at vera viðgjørt í heilsupolitikkinum.

Apoteksverkið upplýsir, at ein nýggj strategi fyri økið kemur í 2026. Hendan kemur í staðin fyri eina eldri strategi, *Álit um Apoteksverkið í framtíðini.*[55] Strategiin fyri heilivágsøkið eigur at verða gjørd í samstarvi við næstu samstarvspartarnar hjá Apoteksverkinum, og eigur at fevna um fleiri týðandi evni, t.d:

- Tryggja heilivágsveiting
- Egin framleiðsla
- Serliga kostnaðarmikil heilivágur
- Rekommandatiónslistar
- Antibiotikanýtsla
- Klinisk farmasi
- Skamtlutan
- Minka um svinn

Sum tey fyrstu stigini á heilivágsøkinum, verður mælt til trý ítøkilig átøk:

Átøk:

79. **Nýggj strategi fyri heilivágsøkið:** Ein nýggj strategi fyri heilivágsøkið skal gerast í 2026. Strategiin fyri heilivágsøkið verður gjørd í samstarvi við næstu samstarvspartarnar hjá Apoteksverkinum. *Ábyrgd/partar: Apoteksverkið o.o.*

80. **Skamtlutan:** Skamtlutan er ein tænasta, sum Apoteksverkið veitir. Apotekið veitir heilivágin býtt í skamtar eftir dato og tíð á degnum, har

[54] *Sáttmáli sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, sum bera brek https://landsstyri.cdn.fo/savn/1382/162-08-skjal-1-st-sattmali-um-rattindi-brek.pdf?t=173746061&s=MLfgiKJ_r7cFjNSolloevAfHXAM*

[55] *Álit um Apoteksverkið í framtíðini, Apoteksverkið, 2006 https://landsstyri.cdn.fo/savn/hbkmd3ph/alit-um-apoteksverkid-i-framtidini.pdf?s=1Vac_Jj8-ePQ7DdeC5uaLGrad7k*

tað skal takast. Apoteksverkið letur í løtuni skamtlutaðan heilivág til 1.600 borgarar. Hetta er við til at veita borgarum og heimarøkt trygd fyri, at rættur heilivágur verður tikin, og kann hetta vera avgerandi fyri sjúklingagongdina. Eisini verður heilivágssvinn avmarkað við hesari tænastuni. Arbeiðast skal fyri, at fleiri nýta skipanina við skamtlutan. *Ábyrgd/partar: Apoteksverkið.*

81. **Klinisk farmasi á sjúkrahúsum og eldraøki:** Bæði á sjúkrahúsum og eldraøkinum eru trupulleikar við at tryggja, at sjúklingar og borgarar fáa ordinerað rættan heilivág. Hetta eiga kommunulæknar og sjúkrahús í útgangsstøðinum at tryggja. Kortini er hetta ein avbjóðing, sum sæst í heilsuverkum kring allan heim. Ein loysn, ið verður nýtt nógvastaðni, er, at farmaceutar og farmakonomar hjálpa við ráðgeving og ítøkiligari heilivágsgjøgnumgongd, fyri at tryggja rættar ordinatiónir til sjúklingarnar. Hesa tænastuna veitir Apoteksverkið longu í ein vissan mun, men hon eigur at veitast í øllum landinum. *Ábyrgd/partar: Apoteksverkið o.o.*

11.3 Flutningur til heilsutilboð

Fleiri hoyringarpartar vísa á trupulleikar við flutningi til heilsutilboð. Talan er serliga um sjúklingafeløg. Atfinningarnar snúgva seg um vantandi tilboð um flutning til heilsutilboð á sjúkrahúsunum og mun í tænastustignum hjá kommununum.

Núverandi reglur á økinum kunnu gera tað trupult hjá summum borgarum at koma til heilsutilboð, og hetta elvir sostatt tilójavnað í heilsu.

Átak:

82. **Flutningur til heilsutilboð:** Mælt verður til, at ein nærri lýsing av økinum verður gjørd. *Ábyrgd/partar: Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið og Kommunufelagið.*

11.4 Sjúkraflutningstænastan (ambulansutænastan)

Sjúkraflutningstænastan veitir sjúkraflutning í øllum landinum. Á nógvu hoyringarfundunum í sambandi við heilsupolitikkin er lítið nevnt um sjúkraflutningstænastuna. Hetta bendir á, at økið yvirskipað er vælvirkandi. Í spurnakanningini var sjúkraflutningstænastan eisini eitt av teimum økjunum, ið hevði mest nøgdsemi.

Sjúkraflutningstænastan gjørdi eina menningarætlan í 2024, ið nevnist *Tilmæli – Dagføra sjúkraflutningstænastuna.*[56]

Átak:

83. **Sjúkraflutningstænastan:** Mælt verður til, at sjúkraflutningstænastan heldur fram at menna økið við støði í menningarætlanini frá 2024. *Ábyrgd/partar: Sjúkrahúsverkið.*

11.5 Læknavaktin

Læknavaktin veitir læknahjálp uttan fyri upplatingartíðirnar hjá kommunulæknunum. Á hoyringarfundunum hava viðmerkingarnar um læknavaktina fyri tað mesta snúð seg um tænastustøðið, sum t.d. bíðitíð og kunning. Harafturat verður nevnt, at nýggi møguleikin fyri psykiatriskari ráðgeving frá psykiatriskum sjúkrarøktarfrøðingi er ein bati. Læknavaktin varð eisini mett av borgaranum í spurnakanningini. Ein meiriluti upp á uml. 60% mettu, at tey vóru sera væl nøgd ella væl nøgd við læknavaktina. Men kortini má nevnast, at økið sum heild varð lægst mett av øllum økjunum.

Átak:

84. **Læknavaktin:** Mælt verður til, at heilsuverkið hevur serligt uppmerksemi á læknavaktina, og hvussu hendan tænastan kann betrast í komandi sjúklinganøgdsemiskanningum. *Ábyrgd/partar: Heilsutrygd/kommunulæknar og Sjúkrahúsverkið.*

[56] *Tilmæli - Dagføra sjúkraflutningstænastuna, Sjúkrahúsverkið, 2024 http://tilfar.lms.fo/logir/alit/2024.06%20Tilmæli%20um%20at%20dagføra%20Sjúkraflutningstænastuna.pdf*

III VERKSETAN

Í hesum parti er eitt yvirlit yvir átøkini, ið mælt verður til at seta í verk í árunum 2026 – 28. Enn einaferð verður gjørt vart við, at hesi átøk bert eru tey fyrstu stigini, sum skulu takast fyri at náa langtíðarmálunum í 2035. Sostatt er neyðugt, at fleiri átøk verða sett í verk komandi árini, tá ið heilsupolitikkurin verður eftirmettur.

Fyri hvørt átak er lýst, hvør hevur ábyrgd ella er ein týðandi partur í verksetanini. Harafturat eru viðmerkingar um kostnað fyri átøk, har tað er gjørligt at seta eina upphædd. Í øðrum førum krevst ein neyvari lýsing, fyri at gera eina kostnaðarmeting.

Fleiri átøk snúgva seg um at broyta arbeiðshættir o.tíl. Í hesum førum verður ofta mett, at hetta verður gjørt innan verandi fíggjarkarm.

Verksetan: Heilsuframi og fyribyrging

2026	Tilmæli	Kostnaður	Ábyrgd/partar
1	**Rørsluátøk um alt landið**	400.000 kr. í 2026 og 2027 til fyrireiking og tiltøk. Fíggjartørvurin skal hereftir metast	Heilsustýrið, ÍSF, Fróðskaparsetrið og Undirvísingarstýrið
2	**Avgjøld á sunnum og ósunnum matvørum**	Uppskot um broyting av MVG og lýsing av, hvørja nettoávirkan uppskotið hevur á landskassan, skulu gerast	Fíggjarmálaráðið, Heilsumálaráðið, Heilsustýrið og TAKS
3	**Almenn kostráð frá Heilsustýrinum**	Verandi arbeiðsorka	Heilsustýrið og Heilsufrøðiliga Starvsstovan
4	**Tilboð um royki- og nikotinavvenjing**	Verandi játtan	Heilsustýrið og Apoteksverkið
5	**Roykilóg**	Verandi arbeiðsorka	Heilsumálaráðið
6	**Økja undirtøkuna fyri koppseting**	Verandi játtan	Heilsustýrið, Heilsutrygd/ kommunulæknar og Gigni
2027-28	**Tilmæli**	**Kostnaður**	Ábyrgd/partar
7	**Fólkaheilsuætlan til 2035**	Verandi arbeiðsorka til at gera ætlan	Heilsumálaráðið og Heilsustýrið
8	**Heilsugóður skúla- og barnagarðsmatur**	Kommunurnar planleggja og verkseta royndarskipan	Kommunur og Kommunufelagið
9	**Dýrari tubbak og nikotinvørur**	Uppskot um dýrari tubbak og lýsing av, hvørja nettoávirkan uppskotið hevur á landskassan, skulu gerast	Fíggjarmálaráðið
10	**Heilsustarvsfólk vegleiða um royking**	Verandi arbeiðsorka. Samráðingarmál við kommunulæknar	Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd/ kommunulæknar Gigni og Kommunufelagið
11	**Minka rúsdrekkanýtslu hjá ungum**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Heilsumálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Gigni Heilsustýrið, Kommunufelagið o.o.
12	**Átøk móti rúsevnismisnýtslu**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Heilsustýrið, viðgerðarstovnar, Gigni o.o
13	**Lággáttartilboð til ung í mistrivnaði**	Fremjast í sambandi við Barnaverkætlanina	Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Gigni, Almanna- og mentamálaráðið og Kommunufelagið
14	**Sjúklingaundirvísing til fólk við varandi sjúkum**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Sjúkrahúsverkið
15	**Tarmkrabbascreening og viðgerð**	Sambært uppskoti frá Sjúkrahúsverkinum: Íløgur 11 mió. kr. Árligur kostnaður 11,5 mió. kr. Kann setast í verk stigvíst	Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið
16	**Screening og viðgerð fyri burðartunglyndi**	120.000 kr. árliga	Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Gigni

Verksetan: Heilsutænastur í nærumhvørvinum

2026	Tilmæli	Kostnaður	Ábyrgd/partar
17	**Fleiri fastir kommunulæknar**	Játtan er tøk	Heilsutrygd
18	**Ætlan fyri tænastur í heilsumiðstøðum**	Verandi arbeiðsorka til at gera ætlan	Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Heilsustýrið, Heilsutrygd/kommunulæknar, Sjúkrahúsverkið, Kommunufelagið o.o.
2027-28	**Tilmæli**	**Kostnaður**	Ábyrgd/partar
19	**Øll hava fastan kommunulækna**	Ein kommunulækni kostar millum 1,5 – 2,0 mió. kr. um árið. Afturat hesum er kostnaður til avleitt verksemi	Heilsumálaráðið, Heilsutrygd/kommunulæknar og Kommunufelagið
20	**Heilsumiðstøðir verða víðkaðar**	Kostnaður sambært "Ætlan fyri tænastur í heilsumiðstøðum", átak 18	Heilsumálaráðið, Heilsustýrið, Heilsutrygd/kommunulæknar, Sjúkrahúsverkið og Kommunufelagið
21	**Uppgávuætlan fyri kommunulæknar**	Verandi arbeiðsorka til at gera ætlan	Heilsumálaráðið, Heilsutrygd/kommunulæknar Sjúkrahúsverkið og Kommunufelagið
22	**Heilsufaklig leiðsla av kommunulæknunum**	200.000 kr. eru játtaðar. Kostnaður er tilsamans 1,3 mió. kr.	Heilsumálaráðið
23	**Viðgerð í heiminum**	Verandi arbeiðsorka til at gera ætlan	Sjúkrahúsverkið, Kommunufelagið og Heilsutrygd/kommunulæknar

Verksetan: Samanhangandi sjúklingagongdir

2026	Tilmæli	Kostnaður	Ábyrgd/partar
24	**Fastir røktarheimslæknar**	Arbeitt verður við at gera uppskot, herundir meting av kostnaði	Heilsumálaráðið, Heilsutrygd/ kommunulæknar og Kommunufelagið
25	**Skjót boð aftan á ávísing**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
26	**Betrað endurvenjing**	Sambært *"Álit um betri samskipan innan endurvenjing"*	Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og Kommunufelagið
27	**Liðugt viðgjørdir sjúklingar á sjúkrahúsunum**	Arbeitt verður við málinum	Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið og Kommunufelagið
28	**Samanhangandi innsatsur á tannøkinum**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Heilsumálaráðið, Heilsutrygd, Sjúkrahúsverkið, Kommunufelagið, Almannaverkið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Tannlæknafelagið/Tannrøktarafelagið
2027-28	**Tilmæli**	**Kostnaður**	Ábyrgd/partar
29	**Gjøgnumganga óskynsom markamót**	Uppskot skal gerast Eigur ikki at hava eykakostnað við sær	Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og Útbúgvingarmálaráðið og Kommunufelagið
30	**Skipa sjúklingagongdir fyri fólk við varandi sjúkum**	Verandi arbeiðsorka til at skipa sjúklingagongdir	Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd/ kommunulæknar og Kommunufelagið
31	**Ráðgeving til kommunulæknar**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið og Heilsutrygd/ kommunulæknar
32	**Útskrivingarfrágreiðing (epikrisa)**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið og Heilsutrygd/ kommunulæknar
33	**Praksiskonsulentskipan**	Samráðingarmál við kommunulæknar	Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Heilsutrygd/kommunulæknar
34	**Sjúklingasamskipari**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd/kommunulæknar og Kommunufelagið.
35	**Menning av palliativa økinum**	Sambært álitinum *Palliatión í Føroyum*	Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið, Kommunufelagið o.o.

Verksetan: Sjúkrahúsverkið

2026	Tilmæli	Kostnaður	Ábyrgd/partar
36	**Virksemisætlan**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
37	**Felags visitatión**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
38	**Kapasitetskonferensa**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
39	**Felags størv millum sjúkrahúsini**	Eykakostnaður til flutning, flutningstíð v.m.	Sjúkrahúsverkið
40	**Útitænasta er ein møguleiki í øllum viðkomandi sáttmálum**	Eykakostnaður til flutning, flutningstíð v.m.	Fíggjarmálaráðið
41	**KS og SSH fáa eina serliga uppgávu í sambandi við at minka um bíðilistarnar**	Sí átak 51: Pulja til at minka um bíðilistar	Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið
42	**Miðspjadd ambulatorium á KS og SSH**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Sjúkrahúsverkið
43	**Plastikkkirurgiska funktiónin á SSH skal útbyggjast**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Sjúkrahúsverkið
44	**Aðrar funktiónir á KS og SSH komandi árini**	Verandi arbeiðsorka til planlegging	Sjúkrahúsverkið
45	**Fremja ætlan um universitets-sjúkrahús og munandi meira gransking**	Sambært *Álit um universitets-sjúkrahús*[57]	Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið
46	**Gera ætlan um læknaútbúgving** (er nærri lýst í átaki 66)	Verandi arbeiðsorka til plan-legging. Fyri at meta um útreiðslur til at fremja ætlan um læknaút-búgving, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Fróðskaparsetrið og Sjúkrahúsverkið
47	**Seta fleiri serlæknar (dimensioneringsætlan)**	Sambært álitinum, *Tørvurin á serlæknum í føroyska heilsuverk-inum*	Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið
48	**Menningarætlanir fyri hvørt sergreinaøki**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
49	**Krav um, at Sjúkrahúsverkið árliga økir planlagda virksemið**	Verandi arbeiðsorka	Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið
50	**Miðvíst arbeiða fyri at leggja um frá innlegging til dagskurð, ambulanta viðgerð og subakutta viðgerð**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
51	**Árlig pulja til at minka um bíðilistar**	6 mió. kr. árliga	Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið
52	**Bíðitíðir verða almanna-kunngjørdar**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið

[57] *Álit um universitetssjúkrahús, Heilsumálaráðið, 2023 https://landsstyri.cdn.fo/savn/1grjmpet/álit-um-universitetssjúkrahús-12092023.pdf?s=RPuZrC2rXiare73-G6WA1p_w5GE*

53	**Menningarmál og profilar fyri tey trý sjúkrahúsini**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
54	**Broytt visitatión av medisinskum sjúklingum til KS**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
55	**Broytingar í tilbúgvingunum**	Sparingar í sambandi við broyting av tilbúgvingini, fara til tað sjúkrahúsið har tær verða framdar	Sjúkrahúsverkið
56	**Uppskot til heintiskipan**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
57	**Psykiatriætlan**	Verandi arbeiðsorka til at gera ætlan	Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Barna-og útbúgvingarmálaráðið, Kommunufelagið, Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið o.o.

Verksetan: Góðskumenning og dáta

2026	Tilmæli	Kostnaður	Ábyrgd/partar
58	**Nøgdsemiskanningar**	600.000 kr. pr. kanning	Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd/ kommunulæknar o.o
59	**Góðskunevnd fyri heilsuverkið**	Verandi arbeiðsorka	Heilsumálaráðið, Heilsustýrið og stovnar í heilsuverkinum
60	**Ætlan um heilsuskrá**	Í fyrstu syftu verandi arbeiðsorka til fyrireiking. Hetta skal eftirmetast komandi árini. Fyri at meta um útreiðslur til íverksetan og rakstur av einari fullfíggjaðari heilsuskrá, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Heilsustýrið
2027-28	**Tilmæli**	**Kostnaður**	Ábyrgd/partar
61	**Kliniskt audit**	Verandi arbeiðsorka	Komandi góðskunevnd
62	**Nýta altjóða tilmæli**	Verandi arbeiðsorka	Komandi góðskunevnd
63	**Royndir við kliniskum dátugrunnum**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Komandi góðskunevnd og Heilsustýrið

Verksetan: Útbúgvin starvsfólk og uppgávuflyting

2026	Tilmæli	Kostnaður	Ábyrgd/partar
64	**Útbúgving av sersjúkrarøktar-frøðingum**	Kostnaður til útbúgving.	Sjúkrahúsverkið
65	**Víðariútbúgving fyri yngri læknar**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Heilsumálaráðið og Sjúkrahús-verkið
66	**Læknaútbúgving í Føroyum** (Gera ætlan)	Verandi arbeiðsorka til plan-legging. Fyri at meta um útreiðslur til at fremja ætlan um læknaútbúgving, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Sjúkrahúsverkið og Fróðskapar-setrið
67	**Útbúgving av læknaskrivarum**	Ætlan er gjørd	Barna- og Útbúgvingarmálaráðið, Heilsumálaráðið og Sjúkrahús-verkið
68	**Útgreining av starvsfólkatørvi**	Verandi arbeiðsorka til at gera ætlan	Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Fíggjar-málaráðið, Kommunufelagið og stovnar á heilsuøkinum
2027-28	**Tilmæli**	**Kostnaður**	Ábyrgd/partar
69	**Skipaðar eftirútbúgvingarætlanir**	Verandi játtan	Stovnar í heilsuverkinum
70	**APN-útbúgving**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Fróðskaparsetrið

Verksetan: KT og tøkni

2026	Tilmæli	Kostnaður	Ábyrgd/partar
71	**Talgildingarætlan**	Verandi arbeiðsorka til at gera ætlan	Heilsumálaráðið, stovnar í heilsuverkinum og KT-Landsins
72	**Royndir við talgildum viðtalum í Suðuroy** (er byrjað)	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
73	**Ætlan fyri medicotøkniliga útgerð**	Verandi arbeiðsorka til at gera ætlan, herundir lýsa útreiðslur til at fremja ætlanina	Sjúkrahúsverkið
74	**Fyrireika nýggja heilsuskipan**	Verkætlan um heilsuskipan hevur egna játtan	Sjúkrahúsverkið, Heilsumálaráðið o.o.
2027-28	**Tilmæli**	**Kostnaður**	Ábyrgd/partar
75	**Møguleiki fyri talgildari viðtalu kring alt landið**	Talgildingarætlanin skal lýsa tíðarætlan og kostnað	Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd og KT-Landsins
76	**Rættur til talgilda viðtalu á sjúkrahúsi og hjá kommunulækna**	Verandi arbeiðsorka	Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Heilsutrygd/kommunulæknar
77	**Møguleiki fyri teldupostviðtalu hjá kommunulæknum**	Talgildingarætlanin skal lýsa tíðarætlan og kostnað	Heilsutrygd/kommunulæknar og KT-Landsins
78	**Ætlan fyri nýggja tøkni**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið o.o.

Verksetan: Onnur viðurskifti

2026	Tilmæli	Kostnaður	Ábyrgd/partar
79	**Nýggj strategi fyri heilivágsøkið í 2026**	Verandi arbeiðsorka	Apoteksverkið o.o.
80	**Skamtlutan**	Verandi arbeiðsorka	Apoteksverkið
81	**Klinisk farmasi á sjúkrahúsum og eldraøki**	Fyri at meta um útreiðslur, má fyrireikingararbeiði gerast fyrst	Apoteksverkið o.o.
82	**Flutningur til heilsutilboð**	Verandi arbeiðsorka	Heilsumálaráðið, Almanna og mentarmálaráðið og Kommunufelagið
83	**Sjúkraflutningstænastan**	Verandi arbeiðsorka	Sjúkrahúsverkið
84	**Læknavaktin**	Verandi arbeiðsorka	Heilsutrygd/Kommunulæknar og Sjúkrahúsverkið

Fylgiskjal 1

Bólkar við fakfólki og politikarum

Ráðgevarabólkur

Landsstýriskvinnan útnevndi ein ráðgevarabólk. Í bólkinum vóru sjey heilsufakligir luttakarar úr ymiskum pørtum av heilsuverkinum og trý sjúklingaumboð. Bólkurin hevur verið ráðgevi hjá Heilsumálaráðnum og hevur raðfest tilmælini í heilsupolitikkinum. Limirnir í ráðgevarabólkinum vóru:

Jákup N. Olsen	Sjúklingaumboð
Tóra við Keldu/Ruth Thomsen	Sjúklingaumboð
Hildur Túná Fjørdal	Sjúklingaumboð
Tummas í Garði	Sjúkrahúsverkið
Sólrun Foldbo	Gigni
Bjarni á Steig / Guðrið Andorsdóttir	Heilsustýrið
Magni Mohr	Fróðskaparsetur Føroya
Marna E. Jensen	Eldraøkið
Sigurð Marner Simonsen	Heilsuskúli Føroya
Turið H. Johannesen	Kommunulækni

Politiskur fylgibólkur

Arbeiðið varð skipað við einum politiskum fylgibólki við umboðum úr øllum flokkum á tingi, og einum umboði úr Kommunufelagnum. Limirnir vóru:

Árni Skaale	Fólkaflokkurin
Johan Dahl	Sambandsflokkurin
Hans Jacob Thomsen	Javnaðarflokkurin
Liljan Weihe	Tjóðveldi
Hanna Jensen	Framsókn
Jenis av Rana	Miðflokkurin
Tórbjørn Jacobsen	Kommunufelagið

Stýrisbólkur

Arbeiðið er gjørt undir leiðslu av einum stýrisbólki við fýra aðalstjórum, deildarstjóra í Heilsumálaráðnum og stjóranum í Kommunufelagnum. Limirnir í stýrisbólkinum vóru:

Bjørgfríð Ludvig	Heilsumálaráðið
Jan Simonsen	Heilsumálaráðið
Eyðun Mohr Hansen	Almanna- og mentamálaráðið
Poul Geert Hansen	Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Bjarni A. Bjarnason	Fíggjarmálaráðið
Eyðun Christiansen	Kommunufelagið

Umsitingarligur fylgibólkur

Ein umsitingarligur fylgibólkur hevur eisini verið knýttur at arbeiðnum. Hetta vóru stovnsleiðarar á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommununum. Tey vóru:

Egil á Bø	Heilsutrygd
Hjalti Gunnarstein	Apoteksverkið
Eyðfríð L. Jacobsen	Tórshavnar Kommuna
Steinar Eirikstoft	Sjúkrahúsverkið
Alexandra á Dul	Sjúkrahúsverkið
Hanus Toftheyggj	Sjúkrahúsverkið
Bjarni á Steig	Heilsustýrið
Edvard Heen	Almannaverkið

Verkætlanarbólkur

Ein verkætlanarbólkur í Heilsumálaráðnum hevur skipað praktiska arbeiðið við heilsupolitikkinum:

Per Busk	Verkætlanarleiðari
Petur Joensen	Fulltrúi
Rannvá B. Mohr	Fulltrúi

Fylgiskjal 2

Bygnaður í heilsuverkinum

Heilsuverkið fevnir um sjúkrahús, apotek, Heilsustýrið og ein hóp av stovnum, ráðum og nevndum. Harumframt samskiftir heilsuverkið við nógv, sum ikki beinleiðis eru partur av almenna heilsuverkinum, men sum uppskotini í heilsupolitikkinum tó í ávísan mun verða viðkomandi fyri, eitt nú eldraøkið og Almannaverkið. Í hesum parti er ein stutt lýsing av bygnaðinum í almenna heilsuverkinum.



Aðrir stovnar og ráð við tilvísing til Heilsumálaráðið

- Viðgerðarstovnar
- Hvíldarheimið Naina

- Etiska ráðið
- Sjúklingaráðið
- Farsóttarnevndin
- Vísindasiðsemisnevndin
- Visitatiónsnevndin

Bygnaður í almenna heilsuverkinum

Heilsuverkið hevur nógv samband við:

Stovnar undir landinum	Almannaøkið og barna- og útbúgvingarøkið
Kommunalt	Eldraøkið
Privat	Tannlæknar Fysio- og ergoterapeutar Sálarfrøðingar
Uttanlands	Sjúkrahús í Danmark
Landslæknin	

Sjúkrahúsverk Føroya

Sjúkrahúsverkið fevnir um tey trý sjúkrahúsini: Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús. Í talvuni niðanfyri eru hagtøl um sjúkrahúsini.

2026	Landssjúkra-húsið	Klaksvíkar sjúkrahús	Suðuroyar sjúkrahús
Seingjatal	127	22	26
Seingjadagar 2024	41.335	6.895	4.627
Ársverk	850	160	120
Innleggingar 2024	9.800	1.300	1.200
Ambulantar viðtalur 2024	186.000	26.000	14.000
Játtan 2025 mió. kr.	800	111	98
Serviðgerð uttanlands, flutningur og sjúklingahotell – nýtsla 2024 í mió. kr.	192		
Uttanlandsviðgerðir – tal á ferðum 2024	2.700		

Hagtøl um sjúkrahúsini

Heilsustýrið

Uppgávurnar hjá Heilsustýrinum eru serliga:

- Heilsufaklig ráðgeving til myndugleikar og stovnar
- Veita borgarum og almenninginum kunning um heilsufaklig viðurskifti
- Hava um hendi fólkaheilsuarbeiði, heilsufremjan og fyribyrging
- Tilbúgving
- Skipa, viðgera og menna hagtøl á heilsuøkinum
- Skipa, umsita og menna heilsuskráir
- Umsita, reka og menna vevnaðarskrá, diagnosuskrá, genomskrá og ættarbandsskrá

Heilsutrygd

Heilsutrygd umsitur og avroknar stuðul til meginpartin av primeru heilsutænastunum í Føroyum, teirra millum kommunulæknaviðtalur, stuðul til hjálparráð, ískoyti til viðgerð hjá tannlækna, fysioterapeuti, sálarfrøðingi, kiropraktor o.a. Somuleiðis umsitur Heilsutrygd, í samstarvi við Apoteksverkið, skipanina við heilivágstilskoti.

Heilsutrygd umsitur kommunulæknaøkið (36 størv), Gigni (fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung) og Økisheilsuskipanina (kliniskir dietistar).

Apoteksverkið

Apoteksverkið fevnir um apotekini og Landsapotekaraembætið. Stovnurin hevur einkarætt at framleiða, innflyta, útflýggja, hava á goymslu, handla og pakka heilivág.

Framleiðsluapotekið í Tórshavn er einasta stað í Føroyum, ið framleiðir heilivág. Upp móti 200 ymiskar vørur verða framleiddar. Skamtaður heilivágur verður framleiddur til umleið 1.600 brúkarar og blandaðar viðgerðir til nýtslu á Landssjúkrahúsinum.

Hvíldarheimið Naina

Hvíldarheimið Naina er sjálvsognarstovnur. Heimið, sum hevur pláss fyri 25 fólkum, er ætlað fólkum, sum aftan á sjúku ella aðrari orsøk, tørva hvíld fyri at koma fyri seg aftur.

Viðgerðarstovnar

Heilbrigdi
Viðgerðarheimið á Velbastað hevur til endamáls at virka sum viðgerðarstaður fyri rúsdrekkamisnýtarar o.o. Eisini hevur stovnurin familjuviðgerð.

Blákrossheimið
Blákrossheimið er viðgerðarstaður fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu og hevur bæði samdøgurs- og ambulanta viðgerð.

Frælsi
Viðgerðarstovnurin Frælsi er eitt avvenjingartilboð fyri ung í aldrinum 18-24 ár, sum eru bundin av rúsdrekka og rúsevnum.

Fylgiskjal 3

Luttakarar á hoyringarfundum

Kost og Føðslufelagið

Sjúklingaráðið

Útoyggjafelagið

Blákrossheimið

Viðgerðarstovnurin Frælsi

Radiografar í Føroyum

Bioanalytikarafelagið

Ljósmøðrafelagið

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

Heilsurøktarafelagið

Heilsuhjálparafelagið

Heilsutrygd

Apoteksverkið

Landsfelag Pensjónista

MEGD (Epilepsifelag Føroya, Heilafelagið, ADHD felagið, Alzheimerfelagið, Autismufelagið, CP Føroyar, Sinnisbati, Hjartafelagið, Javni, Nýrafelagið, Hoyr, Stofskiftisfelagið og Føroya Psoriasisfelag)

Tannrøktarafelagið

Tannlæknafelagið

Fysioterapeutfelag Føroya

Ergoterapeutfelagið

Krabbameinsfelagið

ÍSF

Serlæknafelag Føroya

Kommunulæknafelag Føroya

Felagið fyri Yngri læknar

Fróðskaparsetur Føroya

Gigni

Heilsuskúli Føroya

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Almanna- og mentamálaráðið

Kommunufelagið

Almannaverkið

Sjúkrahúsleiðslan

Depils- og deildarleiðslur á sjúkrahúsunum

Heilsustýrið

PharmaDanmark

Landslæknin

sniða.fo

HEILSUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Health